| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>20. juni 2018 | Blað nr.: 480 |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 20. juni 2018 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr: 138/18 – 169/18**

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Jacobina Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Helena á Dam Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Ruth Vang
Bjørg Dam

**LUTTÓKU EISINI:**
Jóan Petur Hentze
Eyðfríð Jacobsen
Eyðna Justinussen
Marius Múller
Sigurð Ó. Vang
Barbara Vang

**LUTTÓKU IKKI:**
Heðin Mortensen
Bergun Kass

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>20. juni 2018 | Blað nr.: 481<br>Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 138/18 | 18/00020-1 | Mál beind í nevndir 2018 | 483 |
| 139/18 | 14/01679-3 | Innrætting av Saltsølubygninginum | 484 |
| 140/18 | 18/02041-2 | Søla matr.nr. 22y Kaldbak, Við Krossá 10, 180 Kaldbak. | 492 |
| 141/18 | 18/02215-2 | Søla av grundstykki á Dánjalstrøð. Stykkið nr. 1. | 494 |
| 142/18 | 16/04642-1 | Val av hegn- og vatnsýnisnevnd fyri 4 ár | 496 |
| 143/18 | 15/03776-1 | Útbygging av høllini í skúlanum á Argjahamri | 497 |
| 144/18 | 17/01053-1 | Integratión, samskipan og átøk | 504 |
| 145/18 | 18/00057-2 | Útbygging av frítíðarskúlanum á Argjahamri | 514 |
| 146/18 | 17/04201-3 | Føroya Symfoniorkestur: Umskipan, samstarv o.a. | 518 |
| 147/18 | 17/03195-1 | Nýggjur umlættingar- og rehabiliteringsdepil | 521 |
| 148/18 | 17/03897-1 | Bráðfeingistørvur á dagstovnaplássum | 527 |
| 149/18 | 14/00772-13 | Bygginevndin fyri Hoyvíkar kirkju- kirkjugarður í Hoyvík (2007-2036) | 538 |
| 150/18 | 14/03118-2 | Ferðslukanningar kring økið við skúladepilin í Marknagili | 547 |
| 151/18 | 14/05065-1 | Miðbýarætlan - Steinatún | 558 |
| 152/18 | 15/03761-9 | Veiðifelagið Byrsumúli : Áheitan um at fáa samstarv í lag við kommununa fyri at betra um viðurskiftini hjá skjótingini í høvuðsstaðnum. | 564 |
| 153/18 | 18/02331-1 | Heildarloysn fyri kommunulæknaviðtalur í Tórshavnar kommunu | 569 |
| 154/18 | 17/00899-1 | Bústaðarpolitikkur | 573 |
| 155/18 | 18/01973-1 | Íbúðarbygging undir Kongavarða | 581 |
| 156/18 | 18/01975-1 | Bústaðarskylda | 584 |
| 157/18 | 17/03502-1 | Frílendi í Hoydølum - skýli á matr. nr. 58a, Hoyvík | 587 |
| 158/18 | 17/02742-21 | Umsókn um brúksrætt til økið norðanfyri gøtuna niðan til Tølthøllina burtur av Flætnahaga, tað ið verður nevnt Lítlafjall (2008-1137) | 591 |
| 159/18 | 17/00267-2 | Støðutakan um leingjan av sáttmálanum við Sp/f Gundurs | 598 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | Bussar um framhaldandi koyring av bussleiðini | |
| 160/18 | 18/00747-3 | Umsókn um at broyta byggisamtyktina í sambandi við matr. nr. 1292f og 1292a, Tórshavn | 600 |
| 161/18 | 18/01992-1 | Orkuumvæling í Svimjihøllini – Knýta svimjihøllini í fjarhita | 603 |
| 162/18 | 18/01897-1 | Arbeiðsbólkur at endurskoða reglurnar um samsýning av kommunustýrislimum | 605 |
| 163/18 | 17/03883-2 | Skúlin á Fløtum - hølisviðurskifti (Realskúlin) | 608 |
| 164/18 | 17/01361-1 | Listaverkstøð í Finsen | 617 |
| 165/18 | 18/00052-3 | Talgildu Føroyar | 625 |
| 166/18 | 18/01522-1 | Eykajáttan 2018 | 629 |
| 167/18 | 18/00018-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2018 | 634 |
| 168/18 | 14/03251-17 | Bygging av dagstovni í Kollafirði | 636 |
| 169/18 | 17/01304-1 | Flytilig áskoðarapláss o.a. í.s.v. útbyggingina av Høllini á Hálsi | 640 |

***138/18 Mál beind í nevndir 2018***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 7/18 | 18/00020-1 |
| 2 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 30/18 | 18/00020-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 50/18 | 18/00020-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 70/18 | 18/00020-1 |
| 5 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 110/18 | 18/00020-1 |
| 6 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 138/18 | 18/00020-1 |

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

# 139/18 Innrætting av Saltsølubygninginum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 10.03.2014 | 2/14 | 14/01679-3 |
| 2 Vinnunevndin | 11.08.2014 | 30/14 | 14/01679-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.08.2014 | 215/14 | 14/01679-3 |
| 4 Býráðsfundur | 14.08.2014 | 177/14 | 14/01679-3 |
| 5 Býráðsfundur | 18.09.2014 | 196/14 | 14/01679-3 |
| 6 Vinnunevndin | 18.09.2014 | 32/14 | 14/01679-3 |
| 7 Fíggjarnevndin | 18.09.2014 | 256/14 | 14/01679-3 |
| 8 Vinnunevndin | 01.06.2015 | 18/15 | 14/01679-3 |
| 9 Fíggjarnevndin | 10.06.2015 | 143/15 | 14/01679-3 |
| 10 Býráðsfundur | 22.06.2015 | 116/15 | 14/01679-3 |
| 11 Vinnunevndin | 15.05.2017 | 31/17 | 14/01679-3 |
| 12 Fíggjarnevndin | 16.05.2017 | 107/17 | 14/01679-3 |
| 13 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 138/17 | 14/01679-3 |
| 14 Vinnunevndin | 11.06.2018 | 25/18 | 14/01679-3 |
| 15 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 165/18 | 14/01679-3 |
| 16 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 139/18 | 14/01679-3 |

**Málslýsing:**
Innrætting av Saltsølubygninginum

Arbeiðið at klæða saltsølubygningin á Vestaru bryggju, verður væntandi liðugt í august 2013.

Tá tað er liðugt at klæða, ber til at innrætta bygningin av nýggjum. Verðandi innrætting er fyri tað mesta í vánaligum standi, og eigur tí at verða burturbeind og gjørd av nýggjum.

Bygningurin stendur á havnaøki, og er tað tí natúrligt, at hann verður brúktur til virksemi, í hevur samband við sjóvinnu. Hann eigur at innrættast soleiðis, at hann kann brúkast til ymiskar tørvir, og til fleiri smærri og kanska onkra miðalstóra fyritøku.

Leiguupphæddin verður avspeglað í íløgukostnaðinum, tí skulu loysnir finnast, har tað er ein standard leigupakki, hvar tað so er møguligt at velja ymiskar kvalitetir til.

Mælt verður til gera byggiprogram og dispositiósuppskot.

Arbeiðið at gera dispositiónsuppskot verður fíggjað av rakstri hjá Tórshavnar havn.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at gera byggiprogram og dispositiónsuppskot. Arbeiðið at gera dispositiónsuppskot, verður fíggjað av rakstri hjá Tórshavnar havn.

**Vinnunevndin 21. mai 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Vinnusamskiparin á Tórshavnar havn leggur fram uppskot til leigukonsept og skipan av innihaldi í saltsølubygninginum, sum nevndin síðani umrøður og tekur støðu til.

**Vinnunevndin 2. august 2013:**
Nevndin samtykti at heimila umsitingini at arbeiða víðari eftir framlagda leisti.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt víðari við uppskotinum um leigukonsept og skipan av innihaldi í saltsølubygninginum.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at at taka undir við uppskotinum, og at leggja tað alment fram, soleiðis at møguligir leigarar kunnu geva sín áhuga til kennar.

**Vinnunevndin 26. august 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Uppskot til byggiprogram og dispotiónsuppskot er gjørt og undir einum nevnt skipanaruppskot.

Tað samlaða skipanaruppskotið er goymt undir journal nr. 2013-1269.

Úrdrag úr skipanaruppskotinum:
Bygningurin er í 5 hæddum, sum skulu innrættast til 2.799 $m^2$ skrivstovur, 288 $m^2$ til WC/brúsurúm, 2.152 $m^2$ til felagsøki/trappur, 710 $m^2$ til goymslu, 360 $m^2$ til verkstað, 75 $m^2$ til tøknirúm, 579 $m^2$ til matstað og 238 $m^2$ til annað.

Uppskotið leggur upp til, at smærri fyritøkur kunnu deilast um ávísar felags funktiónir, so sum fundarhølir, prent, kantinu o.s.fr.
Nakrar kjarnur verða gjøgnumgangandi á øllum hæddum, t.e. trappur, wc og slokur til innleggingar.

Góðskustøðið á ymsu økjunum verður fjølbroytt. Av tí, at verkstøð og goymslur skulu virka í sama bygningi sum matstova og skrivstovur, verður spennið stórt millum rá arbeiðsrúm og tignarlig fundarrúm.

Ætlanin er, at nýbyggingin skal liva upp til øll dagsins krøv til nýmótans altjóða skrivstovu umhvørvi, samstundis sum spor av gamla saltsølubygninginum verða varðveitt. T.d. er ætlanin, at innsíðan av útveggjum eru gomlu betongveggirnir, sum bert verða pussaðir og málaðir.

Skrivstovuøkini liggja fram við útveggjunum, við undantak av á 1.- 2.- og 3. hædd, har onki ljós kemur til í tí partinum, sum vendir norðureftir móti Bacalao. Skrivstovuøkini verða skyldraði frá høvuðsgongdini gjøgnum bygningin, men ikki deild upp í smærri skrivstovur. Loysnir fyri uppdeiling í smærri skrivstovur skal finnast, sum so leigarin ger eftir tørvi.

Bygningurin verður upphitaður við sjógvhita.

Mettur kostnaður til projektering er kr.3.653.000, umframt kr.527.000 sum er brúkt til skipanaruppskot og fyrireiking.
Projekteringin tekur umleið 4 mánaðir.

Byggingin tekur væntandi 18 mánaðir, frá undirskriving av arbeiðstøkusáttmála til avlevering.

Mettur kostnaður fyri innrætting 59 mió.

**Útleigan**
Aftan á at leigukonseptið fyri bygningin hevur ligið alment frammi, hevur tað verið ein ávísur áhugi fyri at leiga í bygninginum, men tað eru ikki allir leigararnir, sum hóska so væl til ætlaninar, tað at fyritøkurnar í høvuðsheitum skuldu arbeiða við sjóvinnu og menning av hesari.

Um tað verður leigað til øll tey, sum hava víst áhuga, er bygningurin fult útleigaður. Mælt verður til at leiga út til tær fyritøkurnar, sum vit halda passa til konseptið, fyri eisini at geva pláss til meira hóskandi leigarar, sum koma við tíðini.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at taka undir við skipanaruppskotinum, og at játta kr. 4,18 mió til skipanaruppskot og endaliga projektering, og at arbeiðið eftirfylgjandi verður bjóðað út í innbodnari fakenterprisu.

Mælt verður eisini til, at gera eitt sokallað «memorandum of understanding» við tær fyritøkurnar, sum hóska til konseptið, soleiðis at tær kunnu flyta inn í bygningin, tá hann er liðugt umvældur.

**Vinnunevndin 25. november 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 4. desember 2013:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og játta kr. 4,18 mió. av íløgukarminum hjá Tórshavnar havn fyri 2013 og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 12. desember 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Uppskot til skitsuprojekt er gjørt, og verður lagt fyri nevndina.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at góðkenna skitsuprojektið

Umboð fyri SNA Arkitektar kemur á fundin at greiða frá.

**Vinnunevndin 10. mars 2014:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Umboð fyri SNA Arkitektar greiddi frá málinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið hevur verið boðið út í innbodnari fakenterprisu. Tilboðini vóru opnaðið tann 16. juni 2014.

Áðrenn farið varð undir projektering av innrætting, varð samlaði kostnaðurin mettur til kr. 59 mió.

Beint áðrenn tilboðini vórðu opnaðið, metti rágevarin at kostnaðurin bleiv kr. 64,5 mió, umframt ókent og projektering/eftirlit.

Fyri at fáa kostnaðin nakað niður hava samráðingar verið við teir, sum høvdu tey lægstu tilboðini, umframt at sjógvhitin og fyrilestrarsalurin í siloni er tikin burtur úr projektinum.

Ístaðin fyri sjógvhita, er gjørt klárt til at binda í ein møguligan framtíðar fjarðhita.

Samráðst hevur verið við allar teir, sum høvdu lægsta tilboðið, uttan ElNet, sum er í summarfrí. Sáttmálaupphæddin fyri el, er tí ein meting.
Aftan á samráðingar er støðan hendan:

| **Slag** | **Arbeiðstakarar** | **Meting 2013 mió kr.** | **Meting 2014 mió kr.** | **Tilboð mió kr.** | **Sáttmáli mió kr.** |
|---|---|---|---|---|---|
| **Bygnings** | Húsavarðatæn. | | 26.3 | 35.4 | 32.5 |
| **Gólv** | Jims Gólválegging | | 2.4 | 3.2 | 2.1 |
| **Málari** | Uni Zacariasen | | 2.0 | 1.7 | 1.6 |
| **Múrari** | Articon | | 5.7 | 8.3 | 5.2 |
| **El** | ELNet | | 11.2 | 9.4 | 8.6 |
| **HVS** | Renovent | | 16.9 | 17.5 | 14.5 |
| **Arbeiðstøku-upphædd** | | | **64.5** | **75.5** | **64.5** |
| **Trygging,ókent, eftirlit o.a** | | | | | 9.4 |
| **Saml. kostn** | | **59.0** | | | **73.9** |

Um so er, at tað í byggitíðini verður tikið støða til, at gera fyrilestrarsalin lidnan, kann hettar gerast fyri 4.5 mió kr.

Um tikið verður undir við at innrætta fyri 73,9 mió kr., er samalði kostnaðurin fyri innrætting og klæðing umleið 94 mió.
Hetta merkir, at vit fáa 7.100 $m^2$ fyri góðar 13.200 kr/$m^2$

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at gera arbeiðtøkusáttmálar sambært nevnda uppskoti, og at játta 73,9 mió kr, at fíggja av íløgum hjá Tórshavnar havn fyri 2014 og 2015.

**Vinnunevndin 11. august 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 14. august 2014:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, samtykkir at taka undir við vinnunevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundir 14. august 2014:** Marin Katrina Frýdal setti fram soljóðandi broytingaruppskot: Mælt verður til, at bygningurin burturav verður upphitaður við sjóvarhita, og at málið verður beint aftur í vinnunevndina til at útvega neyðuga fígging.

Fyrst varð atkvøtt um uppskotið hjá Marinu Katrinu Frýdal at beina málið aftur í nevnd, ið fall við 5 atkvøðum fyri og fimm ímóti, meðan 4 býráðslimir ikki greiddu atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Jákup Dam.

Jógvan Arge setti síðani fram soljoðandi broytingaruppskot:

Mælt verður býráðnum til at taka undir við, at bygningurin burturav verður upphitaður við sjóvarhita, fíggjað av íløgum hjá Tórshavnar havn fyri 2014 og 2015.

Broytingaruppskotið hjá Jógvani Arge fall við 3 atkvøðum fyri og 8 ímóti. 2 býráðslimir greiddu ikki atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Elin Lindenskov og Sigrún Mohr.

Borgarstjórin setti síðani fram soljóðandi broytingaruppskot:

Mælt verður býráðnum til at taka undir við vinnunevndini við teirri broyting, at spurningurin um endaliga orkuloysn verður lagdur fyri býráðið aftur í seinasta lagi um tveir mánaðir.

Broytingaruppskotið hjá borgarstjóranum varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, ongari ímóti, og 3 býráðslimir greiddu ikki atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Tróndur Sigurðsson, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Sigrún Mohr.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
SNA, sum hevur staðið fyri projekteringini av bygninginum, hevur saman við SMJ, sum hava staðið fyri projektering av hitaverkinum, gjørt eina meting av meirkostnaðinum fyri at brúka sjógvhita til upphiting, og hvussu nógv ár ganga, til íløgan er afturgoldin. (sí skjal j.nr. 14/01679-9)

Meirkostnaðurin er mettur til kr. 4.177.470.

Mett verður, at íløgan er afturgoldin um á leið 30 ár.

**Vinnunevndin 18. september 2014:** Ein meiriluti, Sjúrður Olsen, Halla Samuelsen, Jákup Dam og Bjørghild Djurhuus, mælir býráðnum til at hita bygningin við sjóhita og at fíggja meirútreiðsluna við møguligum sparingum á projektinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Fíggjarnevnd 18. september 2014:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen, Annfinn Brekkstein og Marin Katrina Frýdal, mælir býráðnum til at taka undir við vinnunevndini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundir 18. september 2014:** Einmælt samtykt at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini.

**Ískoyti:**
Vinnunevndin samtykti á fundi tann 18. september 2014 at hita bygningin við sjóhita, sum kostaði kr. 4.177.470,- og at hetta skuldi fíggjast við sparingum. Tað hevur ikki eydnast at finna neyðugar sparingar.

Fyrilestrarsalurin, sum er tann ovasti parturin av siloini, bleiv tikin burtur úr projektinum, men hesin kundi verða tikin innaftur í projektið fyri 4,5 mió.
Fyrilestrarsalurin hevur í verðandi uppskoti ikki vindeygu. Um fyrilestrarsalurin hevur vindeygu, kann hann nýtast til ymisk endamál. Íseting av vindeygum kostar 1,25 mió.
Fyri at fáa meira nyttu burtur úr húsinum, er fyrilestrarsalurin ein týðandi partur.

Óvantaðar útreiðslur av at byggja fyrilestrarsal v.m í restini av byggitíðini eru mettar til 0,5 mió.

| Meirkostnaður: | |
|---|---|
| Sjógvhiti | 4.177.470 |
| Fyrilestrarsalur | 4.500.000 |
| Vindeygu | 1.250.000 |
| Óvantað | 500.000 |
| Samlað | 10.427.470 |

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at samtykkja at játta kr. 10.427.470 til liðugtgerð av Sjóvinnuhúsinum, at fíggja av íløgum hjá Tórshavnar havn 2015.

**Vinnunevndin 01. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Fyrilestrarsalur:
Í samlaðu játtanini var peningur ikki avsettur til endaliga liðugtgerð av fyrilestrarsali. Hædd var ikki tikin fyri ljóðviðurskiftum (aukustikki), stólum og ljóð/ ljós útgerð, tí ivasamt var, hvat hølini skuldu brúkast til.

Tilboð er komið upp á ljós/ljóð útgerð, eins og tilboð er komið frá teimum, sum eru á staðnum, og hava staðið fyri tí, sum er gjørt.
Kostnaðurin fyri hettar er kr.  2.972.614.

Køkur:
Tá avtala var gjørd um umvæling, var avgjørt ikki at gera gólv, loft og veggir í køkin, eins væl og onnur útgerð heldur ikki var við í tilboðnum. Ætlanin var, at tann, sum leigar hølini, skuldi standa fyri umvæling og útbúnaði.

Við tí í huga, at ein møguligur leigari skal kunna taka útgerðina við, tá hann flytur út, er tað helst rættast at útleigarin (Tórshavnar havn) stendur fyri gerð av gólvi, lofti, veggjum, HVS, el og ventilatión.
Kostnaðurin fyri hetta er kr 870.399.

Av ymiskum grundum er arbeiðið at gera bygningin endalig lidnan, seinkað nógv. Hettar hevur ikki gjørt arbeiðið biligari. Fyri at kunna gera bygningin endaliga lidnan er neyðugt at játta kr. 500.000 til prís- og lønarvøkstur o.a.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt verður til at játta tilsamans 4.343.013 til liðugtgerð av fyrilestrarsali, køki og til prís og lønarvøkstur, at fíggja av íløgkarminum fyri Tórshavnar havn 2017.

**Vinnunevndin 15. mai 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2017:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Køkur
Arbeiðið gera køkin hevur drigið út. Í mai 2017 var mett, at kostnaðurin fyri køkin var kr. 870.399, men nú arbeiðið skal byrja, er kostnaðurin kr. 1.972.653.
Um arbeiðið skal gerast, er neyðugt við einari meirjáttan upp á  (1.983.729 – 870.399) kr. 1.113.330 fyri køkin.

Karusellúthurð
Tað er nógv gongd um høvuðsúthurðina til Sjóvinnuhúsið. Tá verðandi hurð verður opna, gevur hetta nógvan gjøgnumtrekk inn í bygningin, serliga inn í matstovuna, sum liggur á veghæddini.
Kostnaðurin fyri eina karusellhurð er kr. 1.139.136

**Tilmæli frá havnarmeistaranum**: Mælt verður til at játta kr. 2.252.465 til liðugtgerð av køki og íseting av karusellúthurð, at fíggja av íløgukarminum fyri Tórshavnar havn 2018.

**Vinnunevndin 11. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við Vinnunevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

# 140/18 Søla matr.nr. 22y Kaldbak, Við Krossá 10, 180 Kaldbak.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 166/18 | 18/02041-2 |
| 2 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 140/18 | 18/02041-2 |

**Upprunin til málið:** Útstykking í Kaldbak, frá uml. 2008

**Lýsing av málinum – samandráttur.** Sí mál 14/01389 samtykti býráðið 14.12.2017, at lýsa grundstykkini í Kaldbak til sølu til mettan marknaðarprís.

Grundstykki matr.nr. 22y, er til víddar 511m2, varð mett til kr. 210.276,50

Grundstykkið hevur staðið á sølulista hjá Meklaranum Betri Heim.
Boð áljóðandi kr. 200.000,00 er innkomið, og onki mótboð. Meklarin hevur fyribils tikið grundstykkið av sølulista og bíðar eftir, at kommunan tekur avgerð í málinum.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin.

**Upplýsingar frá umsitingini.** Sí omanfyri.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.** Ongi.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.** Ongi.

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar.

**Skjøl.** Endalig søluváttan frá meklara. Kortskjal. Býráðssamtykt 14/01389

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>20. juni 2018 | Blað nr.: 493 |
| | | Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni mæla til at selja stykkið fyri innkomið boð kr. 200.000,00

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

# 141/18 Søla av grundstykki á Dánjalstrøð. Stykkið nr. 1.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 167/18 | 18/02215-2 |
| 2 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 141/18 | 18/02215-2 |

**Upprunin til málið:** Kommunan hevur 4 grundstykkir í eini útstykking á Dánjalstrøð á sølulista hjá ognarmeklara. Grundstykkini verða latin við vegatkomu og tekniskum innleggingum, men óutgrivin.

**Lýsing av málinum – samandráttur.** Grundstykkini hava staðið á sølulista hjá ognarmeklara. Prísuppskot kr. 1,1 mill. kr. Tað hevur verið ein avbjóðing í sølutilgongdini, at kommunan hevði ætlanir um at fíggja vegin við sølu av hesum 4 grundstykkjunum, áðrenn møguligur sáttmálið uppá útstykkingarveg var undirskrivaður.

Seinni hevur býráðið so samtykt, at fara undir vegagerðina. Mett tíðarætlan uml. 7. mðr. Harumframt ganga so nakrir mánaðar, eftir hetta at fáa grundstykkini og vegin við parkeringsøkjum og felagsøkjum frámatrikulerað. Leystliga mett ganga helst eini 10 mánaðar til endaliga skeytið kann skrivast og tinglýsast.

Meklarin upplýsir, at síðstu tíðina, hava verið fleiri fyrispurningar, og at ein keypari er komin við boðskjali og bankaváttan á kr. 1.1 mill. kr. fyri stykkið nr. 1.

Meklarin hevur fyribils skrivað viðkomandi keypara stykkið upp til stykkið nr. 1 og verður hetta stykkið tí tikið av sølulista.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin.

**Upplýsingar frá umsitingini.**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.**

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum.** Ongir.

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**Ongar.

**Skjøl**. Sølutilfarð sum liggur hjá meklara.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla til at skriva undir eina treytaða keypsavtalu áljóðandi kr. 1.1 mill. kr. við viðkomandi keypara, sum verður tíðaravmarkað til 1 ár.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

# 142/18 Val av hegn- og vatnsýnisnevnd fyri 4 ár

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 27/16 | 16/04642-1 |
| 2 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 142/18 | 16/04642-1 |

**Málslýsing:**
Sbrt. § 44 í lóg nr. 171 "Om hegn og markfred" frá 18. mai 1937 og § 15 í lóg nr. 169 "Om benyttelse af indsøer og vandløb" frá 18. mai 1937 velur býráðið 3 hegn- og vatnsýnismenn.
Samstundis verða valdir 3 tiltakslimir.

Í 2012 vóru hesi vald: Jan Poulsen, Torvald Lutzen, Just Rubeksen, Eddie Joensen, Jákup av Skarði, Anna Rubeksen og Snorri á Bøgarði. Tiltakslimir vóru: Karlon Winther, Heri Ó. Dam og Hans Silvan Johannesen.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 3 limir í nevndina, umframt 3 tiltakslimir.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald vórðu

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Hans Silvan Johannesen | Vivi Kirke Davidsen |
| Jákup av Skarði | Leivur Hansen |
| Edith Vang | Jóannes Guttesen |
| Torvald Lützen | Anna Rubeksen |
| Heri Ó Dam | Karlon Winther |

**Ískoyti:**
Jákup av Skarði hevur boðað frá, at hann sigur seg úr Hegn- og vatnsýnisnevndini.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja nýggjan lim í nevndina.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Tikið til eftirtektar at velja Kára Mortensen sum nýggjan lim í nevndina.

# 143/18 Útbygging av høllini í skúlanum á Argjahamri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.10.2015 | 203/15 | 15/03776-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 09.11.2015 | 216/15 | 15/03776-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 11.11.2015 | 276/15 | 15/03776-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 25.11.2015 | 238/15 | 15/03776-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 02.12.2015 | 302/15 | 15/03776-1 |
| 6 Býráðsfundur | 10.12.2015 | 238/15 | 15/03776-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 09.12.2015 | 333/15 | 15/03776-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 07.12.2015 | 255/15 | 15/03776-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 13.01.2016 | 8/16 | 15/03776-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 13/16 | 15/03776-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 50/16 | 15/03776-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 53/16 | 15/03776-1 |
| 13 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 39/16 | 15/03776-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 25.02.2016 | 83/16 | 15/03776-1 |
| 15 Mentamálanevndin | 18.06.2018 | 208/18 | 15/03776-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 202/18 | 15/03776-1 |
| 17 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 143/18 | 15/03776-1 |

**Málslýsing:**
***Søga***
Skúlin á Argjahamri www.argjaskuli.fo varð liðugt bygdur á sumri 2011 og varð tikin í brúk í august 2011. Fimleikarhøllin í skúlanum er 22 m. x 22 m. og hevur umleið 196 m2 í goymslurúmum. P/F MAP Arkitektar var ráðgevarafelag og P/F Articon bygdi skúlan í partalagsavtalu.

Ítróttavirksemið er umfatandi í Tórshavnar kommunu og hevur verið í støðugum vøkstri farnu árini. Torført er at nøkta eftirspurningin og tørvin hjá ítróttafeløgum. Nýtslustigið av høllini er at kalla fult hvønn dag eftir skúlatíð og í vikuskiftunum.

***Uppskot til loysn***
Upprunaliga var ætlan, at fimleikahallirnar skuldu hava støðd sum ítróttarhøll. Hetta ber framvegis til at fremja við eini uppíbygging á tilsamans 685 m2., so møguleiki verður fyri hondbóltskappingarvølli á 20 m x 40 m, umframt frástøðugeira til vegg, 2,8 metrar frástøðu til vegg vestureftir (verandi bygningslutir í vestaru framsíðu, kunna í stóran mun endurnýtast). og 2,7 metur frástøðu eystureftir. 1,5 m. frástøða suðureftir og 1,2 frástøða móti sitiplássum norðureftir.

Við at skera í verandi vegg norður eftir, og flyta hann 1,9 metrar inn í verandi goymslur, ber til at fáa pláss fyri 3 røðum av sitiplássum. Við 0,5 m til hvørt sitipláss, verða 210 sitipláss í uppskotinum.

Pláss er gjørt til at útvega tvey skiftingarrúm aftrat, og tvær goymslur eru varðveittar til verandi goymslu.

Roknað verður við, at verandi el- og HVS-skipanir kunnu trekkjast víðari fram, og stórvegis eykaútreiðslur verða ikki til samlaðu dimensioneringina av hesum anleggum.

***Kostnaðarmeting***
Fyribils verður mett at talan kann verða um eina bygging fyri umleið 15 mio.kr., umframt ráðgeving, ókent v.m. á umleið 1 mio.kr. Onkrar óvissur eru, sum mugu kannast nærri í fyrireikingunum. Mett byggitíð, íroknað projektering er 16 mánaðir, og mett verður, at projektering kann byrja í januar 2016.

***Nyttuvirði***
Við útbyggingini fæst ein hondbóltsvøllur afturat, sum kann brúkast til hondbólt, flogbólt o.a. og ÍA, sum er felag á Argjum, kann í høvuðsheitum fara úr Høllini á Hálsi og so verða sjey tímar tøkir har. Um t.d. Fleyr fer úr Gundadalshøllini verða 11 tímar tøkir har. Hesar tilsamans 18 tímarnar kundu Kyndil, H-71 og Neistin so fingið aftrat.

Møguligt býti millum tey feløg, sum fara at brúka høllina í Skúlanum á Argjahamri kundi verið, at ÍA fær (í mun til støddarbýti millum hondbóltsfeløgini) 15 tímar og Fleyr fær 20 tímar.

Umframt venjing kunnu kappingardystir eisini vera á Argjahamri, og trýstið verður tað minni á Høllina á Hálsi og  á Hoyvíkshøllina. Verkætlanin er tískil áhugaverd, tí talan verður um lutfalsliga høga nyttu fyri ein sámiligan kostnað.

***Onnur viðurskifti í byggitíðini***
Byggingin fer at órógva virksemið í skúlanum nakað, bæði virksemið í høllini, í skúlanum sum heild og tað kvøldskúlavirksemi, sum er í skúlanum, serliga í sambandi við sprongiarbeiðið, og tá veggurin vestureftir verður tikin niður. Hetta krevur neyva ráðlegging saman við skúlanum og Ítróttaranleggum, ið samskipar tað virksemið, sum er í høllini eftir skúlatíð. Tí má byggingin í ávísan mun lagast til skúlan, virksemið hjá Ítróttaranleggum, feløgini, sum brúka høllina og til Kvøldskúlan.

***Fyrireikingar***
Til tess at realisera hesa ætlan, er uppskot at fara undir samskifti við P/F Articon og P/F MAP arkitektar um verkætlanina. Hetta grundað á, at talan er um feløg, ið vóru við í upprunaligu verkætlanini, og at fleiri fyrimunir eru í at halda fram við somu feløgum. Úrslitið av hesum verður so grundarlag fyri endaligari støðutakan um bygging.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini at fara undir samskifti við omanfyri nevndu feløg um útbygging av høllini í Skúlanum á Argjahamri at leggja fyri nevndina aftur í november 2015.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2015:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Ískoyti:**

Samráðingar hava verið við P/F Articon og P/F MAP Arkitektar um málið og fyriliggur nú møguleiki fyri at gera avtalu, har feløgini saman við kommununi halda fram í upprunaliga partalagnum um Skúlan á Argjahamri uppá hesa útbyggingina, sum kann verða framd fyri 15,5 mio.kr. umframt kommununar MVG á 6,25%. Verkætlanin kann byrja í desember 2015 og verða avhendað til skúlaársbyrjan 18. august 2016.

Í máli nr. 14/04763 sæst nærri frágreiðing um, hvussu henda útbygging gevur fleiri hallartímar til feløgini í høvuðsstaðnum. Talva við tímum í høllunum er viðfest.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini at gera endaliga avtalu um partalag uppá útbyggingina fyri í mesta lagi kr. 15,5 mió umframt mvg, og at arbeiðið verður fíggjað av karminum til ítróttahallarbygging løgukonta 5775 ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 09. november 2015:** Útsett til komandi fund.

**Fíggjarnevndin 11. november 2015:** Útsett.

**Mentamálanevndin 25. november 2015:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson og Sigrun Mohr, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur undir við av víðka høllina í skúlanum á Argjahamri, men mælir til at byggiarbeiðið verður boðið út millum byggifeløg.

Ein annar minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur undir við at víðka høllina í skúlanum á Argjahamri, men mælir til at arbeiðið verður boðið út.

**Fíggjarnevndin 02. december 2015:** Samtykt at heita á umsitingina um at koma við nýggjum tilmæli til útbjóðingarhátt, sum verður at leggja fyri aftur fíggjarnevndina á eyka fundi.

**Ískoyti:**
Sum uppfylging uppá viðgerðina í fíggjarnevndini 2. desember 2015 verður mælt mentamálanevndini til at taka støðu til annan av tveimum útbjóðsháttum:

a). Undirhondsboð
b). Innboðin øvugt licitatión

Í báðum málum verður ásett eitt evsta mark fyri HVÚ (hondverkaraútreiðslur) á 12,5 mió.kr. Vinnandi tilboðið er tað, sum kemur tættast at tí ella lægri. Tilboðið skal skipast sum ein heildararbeiðstøka, sum fer yvir í eitt partalag saman við Tórshavnar kommunu og Sp/f MAP ark. sum ráðgeva.

**Útgreining av báðum útboðsháttunum:**
*Viðv. Undirhondsboði*
Mælt verður til at annar tilboðsgevarin verður P/F Articon og víst verður á ein annan. Ætlanin er síðani at fara á ástaðarfund við hesar við fyriliggjandi tilfari uppá verandi skúla og tilhoyrandi frágreiðing um ætlanina, og harfrá biðja um tilboð við støði í áður ásettari upphædd og fyribils atkomuvegi vestanfyri, so byggingin tarnar og órógvar skúlan minst møguligt. Vent verður síðani aftur til mentamálanevndina og fíggjarnevndina við úrslitinum av tilgongdini.

*Viðv. Innboðin øvugt licitatión*
Ætlandi kann farast undir projektering primo januar og 3 mánaðir fram. Ráðgevaratoymið við Sp/f MAP ark. sum høvuðsráðgeva fær, treytað av hóskandi semju, uppgávuna vegna teirra leiklut og kunnleika til áður gjørda projektering av Skúlanum á Argjahamri. Síðani er ætlanin at hava innbodna licitatión í apríl 2016, og farast kann undir byggingina áðrenn summarfrítíðina 2016. Innbjóðing verður send til 3-5 av teimum størri byggifeløgunum í Føroyum. Um hesin hátturin verður valdur, fer umsitingin í samráðingar við ráðgevaratoymið um projektering og vendir aftur til mentamálanevndina og fíggjarnevndina primo januar 2016.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu millum útboðsháttin undirhondsboð ella innboðin øvugt licitatión, sum lýst omanfyri og at heimila umsitingini at fremja neyðugar atgerðir í hesum sambandi og venda aftur til nevndina við einum úrsliti primo januar 2016.

**Mentamálanevndin 07. december 2015:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson og Sigrun Mohr, mælir til at bjóða arbeiði út sum eitt undirhondsboð sum lýst omanfyri.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 09. december 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge og Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við mentamálanevndini og mælir býráðnum til at bjóða arbeiðið út í innbodna øvugta licitatión.

**Býráðsfundur 10. desember 2015:** Fyrst varð atkvøtt um minnilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið fall við 3 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam.

Ímóti atkvøddu:
Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu.
Elin Lindenskov, Rúni Djurhuus og Annfinn Brekkstein.

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Elin Lindenskov og Rúni Djurhuus.

Greiddu ikki atkvøðu.

Jógvan Arge, Annfinn Brekkstein, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur biðið Sp/f MAP arkitektar um at geva tilmæli um hvørji feløg skulu fáa møguleika at geva undirhondsboð uppá at útbyggja høllina í Skúlanum á Argjahamri. Sí hjálagt tilmæli og tíðarætlan.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við tilmælinum hjá MAP at heita á TG Verk og Articon um at geva undirhondsboð uppá at útbyggja høllina í Skúlanum á Argjahamri.

**Mentamálanevndin 13. januar 2016:** Ein meiriluti Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
**Ískoyti:**
Tilboð uppá at útbyggja høllina í skúlanum á Argjahamri eru innkomin. Í útbjóðingartilfarinum varð somuleiðis biðið um alternativt tilboð at víðka áskoðaraplássini í verandi parti av høllini.

Tilboðini eru áljóðandi:

**Sp/f TG Verk:**

| | | |
|---|---|---|
| Tilboð | kr. | 16.983.149 uttan mvg. |
| Alternativt tilboð | kr. | 17.757.943 uttan mvg. |

**P/F Articon:**

| | | |
|---|---|---|
| Tilboð | kr. | 18.423.318 uttan mvg. |
| Alternativt tilboð | kr. | 19.083.662 uttan mvg. |

Umsitingin hevur sett í verk sparingar av tilboð hjá Sp/f TG Verk, sum hevði lægstu tilboðini. Alternativa tilboðið snýr seg í høvuðsheitum um at fáa áskoðarapláss framvið allari høllini, sambært viðheftu tekningum t.e. umleið 200 áskoðarapláss.

Ætlanin er at arbeiðið verður framt í partalagi millum Tórshavnar kommunu, Sp/f TG Verk og Sp/f MAP arkitektar.

Samlaði kostnaðurin á verkætlanina er áljóðandi:

| | | |
|---|---|---|
| Alt.tilboð hjá TG Verk við sparingum | kr. | 15.211.778 |
| Prosjektering, eftirlit, MAP ark. | kr. | 1.445.119 |
| Prosjektumsiting og byggileiðsla | kr. | 145.763 |
| Arbeiðstøkurygging o.a. | kr. | 45.000 |
| Ókent | kr. | 608.471 |
| Mvg (6,25%) | kr. | 1.043.869 |
| **Tilsamans** | **kr.** | **18.500.000** |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at skrivað verður undir partalagssáttmála millum Tórshavnar kommunu, Sp/f TG Verk og Sp/f MAP ark. og at játtað samlaða kostnaðin á 18,5 mio.kr. íroknað mvg at útbyggja høllina í skúlanum á Argjahamri, og at arbeiðið verður fíggjað av karminum til ítróttahallarbygging løgukonta 5775 ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Útsett.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur nú fingið gjørt sáttmálarnar klárar, ið liggja til grund fyri partalagnum í sambandi við bygginging av ítróttahøll í Skúlanum á Argjahamri.
Sí hjáløgd skjøl t.e. partalagssáttmáli við tilhoyrandi skjølum, umframt ráðgevarasáttmáli við Sp/f MAP ark. og arbeiðstakarasáttmáli við Sp/f TG-Verk. Eisini sæst mynd av nýggjari leið til arbeiðsvegin, ið er broytt í mun til viðgerðina seinast.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heimilað at skrivað verður undir partalagssáttmála millum Tórshavnar kommunu, Sp/f TG-Verk og Sp/f MAP ark, umframt ráðgevarasáttmála við Sp/f MAP ark. og arbeiðstakarasáttmála við Sp/f TG-Verk

**Fíggjarnevndin 25. februar 2016:** Samtykt.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar. Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin ella skal fíggjast av honum.

Nú verkætlanin, "Høllin á Argjahamri" L57025 skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest eitt hall á kr. 881.000.

Stýrisbólkurin fyri Útbygging av Høllini á Argjahamri hevur eftirmett verkætlanina. Mett verður, at prosjektering og byggiarbeiði sum heild er væl útint, og tekur høllin seg sera væl út. Mett verður somuleiðis, at partalagið gekk sum heild væl ímillum byggiharra, arbeiðstakara og ráðgeva; men at ov lítið av peningi varð sett av ókendum kostnaði til hesari

verkætlan frá byrjan, og tískil fór kostnaðurin nakað útyvir játtanina. Tíðarætlanin helt als ikki, og ymsar avbjóðingar vóru við at gera so stórt arbeiði, samstundis sum virksemi í bygninginum skuldi halda fram.

Samanumtikið verður mett, at verkætlanin er væleydnað.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, virkandi tekniski stjórin, deildarleiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at loka verkætlan L57025 og at hallið verður fíggjað av konto 6175 Umsiting og røkt av fastari ogn. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 18. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttan til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

## 144/18 Integratión, samskipan og átøk

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 03.04.2017 | 15/17 | 17/01053-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 01.05.2017 | 17/17 | 17/01053-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.05.2017 | 109/17 | 17/01053-1 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 06.11.2017 | 44/17 | 17/01053-1 |
| 5 Trivnaðarnevndin | 11.12.2017 | 50/17 | 17/01053-1 |
| 6 Trivnaðarnevndin | 05.03.2018 | 15/18 | 17/01053-1 |
| 7 Trivnaðarnevndin | 07.05.2018 | 21/18 | 17/01053-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 154/18 | 17/01053-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 18.06.2018 | 211/18 | 17/01053-1 |
| 10 Trivnaðarnevndin | 20.06.2018 | 30/18 | 17/01053-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 203/18 | 17/01053-1 |
| 12 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 144/18 | 17/01053-1 |

**Málslýsing:**
**Bakstøði**
Í samgonguskjalinum hjá sitandi býráðssamgongu verður sagt, at arbeiðast skal fyri, at tilmælini um integratiónspolitikk fyri Tórshavnar kommunu verða fylgd, og at tilboð fyri tilflytarar í kommununi verða raðfest og løgd í fasta legu.

Sett verða harumframt ymisk ítøkilig mál og ætlanir:

- At integratiónssamskipari verður settur at veita tænastur til tilflytarar, at savna og menna tilboð
- At skipa verður eitt altjóða hús sum royndarskipan at leiðbeina tilflytarum
- At virkast skal fyri, at sjálvboðin, lesandi, eldri tilflytarar og onnur, ið kunnu/vilja hjálpa, taka lut
- At virka verður fyri, at føroyskt undirvísing til tilflytarar á Kvøldskúlanum verður ment, og
- At kommunan skal ganga á odda við at bjóða starvsvenjing til tilflytarar á kommunalum arbeiðsplássum sum lopfjøl til, at hesi kunnu nýta teirra egnu førleikar.

**Í hesum uppriti verður lýst, hvussu hetta kann skipast, so tað verður samanhangur millum verandi tænastur á integratiónsøkinum og ætlanirnar hjá samgonguni.**

**Tørvur**
Sum partur av altjóða samfelagnum eru Føroyar í broyting. Hetta sæst millum annað aftur í fólkasamansetingini, har fleiri útlendingar flyta til landið at arbeiða, íðka ítrótt ella sum partur av familju. Hetta er gongd, sum hevur vundið uppá seg síðan aldarskiftið. Í árinum 2000 búðu 286 fólk í Føroyum, sum høvdu annan ríkisborgararætt enn norðurlendskan, í 2014 var samsvarandi talið 894.

Við ymiskum mentanum er kommunan vorðin uppaftur meira fjølbroytt, men skulu øll, bæði útlendingarnir, sum flyta higar, og tey, sum búgva her frammanundan, fáa fullgóða nyttu og uppliving av ymiskleikanum, so er tað umráðandi, at nýggju borgararnir so skjótt sum til ber verða innlimaðir í samfelagið, tað verið seg stovnsliga integratión (arbeiðsmarknaðartilknýti), mentanarliga integratión (mál, mentan og samfelagsviðurskifti), sosiala intgratión (gerandislig sambond) og politiska integratión (demokratisk luttøka).

Ásannandi hetta lat kommunan gera eitt álit um integratiónspolitikk, sum varð liðugt við ársenda 2015. Politikkurin skal vera brúgv hjá nýggju borgarunum til føroyska samfelagið, og tí varð í álitinum lýst, hvussu fólkasamansetingin í Tórshavnar kommunu sær út (tjóðskap, aldur v.m.), hvørjar avbjóðingarnar eru, og hvat kommunan kann gera við tað. Í álitinum eru 8 høvuðstilmæli, sum eisini verða tikin upp her.

**Bygnaður**
Integratión er sambært kommunustýrisskipanini politiskt ábyrgdarøki hjá trivnaðarnevndini. Av samgonguskjalinum framgongur, at talan um serliga politiskt raðfest øki.

Integratión í praksis er tó tvørsektorielt, tvs., at øll fakøki í umsitingini og virkisøkini annars hava ábyrgd av integratión, nøkur meira enn onnur.

Uppskot er tí, at meðan skipaða og samskipandi integratiónsarbeiðið verður bygt upp, eigur yvirskipaða fyrisitingarliga ábyrgdin, eisini samsvarandi serligu politisku raðfestingini, at liggja hjá stjórnini, sum leggur út í kortið ítøkiligar málsetningar samsvarandi politiskum samtyktum.

Landspolitiskt varar Uttanríkis- og vinnumálaráðið yvirskipað av integratión. Uppgávan er løgd til Útlendingastovuna, har integratiónssamskipari er settur. Kommunurnar hava hóast hetta rættiliga stórt frælsi til sjálvi at taka stig til integratiónsátøk innan hennara uppgávuøki, og sum mett verður tørvur er á. Samstundis kunnu kommunur samstarva sínamillum um integratión eins og Útlendingastovuna.

**Verandi tænastur á integratiónsøkinum**
Kommunan hevur sum er eina røð av tænastum til borgararnar í kommununi, sum eisini fevma um tænastur til tilflytarar. Tænastan til tilflytarar er eins og tænastan til hinar borgararnar í kommununi desentral og verður framd á avvarðandi fakøki.

**Børn og ung og tilflytarar**
Kommunan hevur sum tænastuveitari og myndugleiki innan dagstovnaøkið og barnaverndarøkið nógv samskifti við foreldur, harundir kravdar foreldraviðtalur. Á sama hátt er innan skúlaverkið, har ábyrgdin hjá kommununi tó er ikki hin sama við tað, at lærarar eru settir av landinum.

Sum lýst í tilmælinum um integratiónspolitikk eru avbjóðingarnar innan barnaøkið serliga hersar:

- Alt kunningartilfar er á føroyskum
- Misskiljingar vegna mentanarmunir
- Tulkatænasta

Kommunan er í gongd við at nágreina, hvussu kunningin á dagstovnaøkinum kann betrast bæði í mun til ítøkiligt tilfar til tilflytararnar og sum amboð til starvsfólkini. Partur av hesum er eisini at betra fatanina av mentanarmunum, tvs. at skapa eitt tvørmentanarlig umhvørvi.

Metast má, at skipað tulkatænasta, har tulkar eru góðkendir eisini í mun til verju av viðkvæmum persónsupplýsingu v.m., er mál fyri fleiri myndugleikar bæði hjá landinum og kommununum. Í integratiónsálitinum hjá landsstýrninum frá 2011 verður sagt, at tulkatænasta skal skipast, men ikki hvussu.

Atlit kann tó eisini takast til, at ikki øll tulking nýtist at vera um persónsviðkvæm viðurskifti, men um meira almenn viðurskifti, ið ikki setir somu krøv til tulkaran, og tað í hesum sambandi snýr seg um at skipa ein "tulka-banka" av sjálvbodnum og/ella fakligum tulkum.

**Kvøldskúlin og tilflytarar**
Kvøldskúlatilboðið í føroyskum máli til tilflytarar hevur góða undirtøku, men avbjóðingar eru fleiri. Yvirskipað er tørvur á, at krav verður sett tilflytarum um at læra seg málið. Í dag er talan um, at tilflytarin sjálvur ynskir at læra málið.

Onnur avbjóðing er, at sjálv undirvísingin er ikki skipað sum føst játtan ella tilboð, tí Mentamálaráðið stendur fyri størsta partinum av fíggingini. Tað fyriliggur heldur eingin formaliserað námsætlan fyri undirvísingina. Tað er Mentamálaráðið, sum skal skipa móðurmálsundirvísingina, íroknað upplýsing um mentan og samfelag, har tað eisini er møguligt hjá tilflytarum at fáa hægri málsliga undirvísing.

Ein triðja avbjóðing er, at teir flestu tilflytararnir eru eisini á arbeiðsmarknaðinum, og at undirvísingin má verða tillagað til tað, tvs. bæði dagtilboð og kvøldtilboð, møguliga eisini intensiv vikuskiftistilboð.

**Snarskivan og tilflytarar**
Snarskivan er tænastudepilin hjá borgarum í Tórshavnar kommunu, staðið har kommunan møtir borgaranum. Snarskivan er sostatt eitt slag av millumliðið millum borgaran og umsitingina í Tórshavnar kommunu. Snarskivan veitir eina røð av tænastum beinleiðis til borgaran, og virkar sum eitt kunnandi og ráðgevandi millumlið, tá talan er um mál, ið verða viðgjørd úti á fakdeildunum.

Kommunan møtir tilflytarum fyrstu ferð í Snarskivuni, har tey koma at skráseta flyting í kommununa. Her fáa tey m.a. ráðgeving um p-tøl, lækna, barnaansing og líknandi tænastur, sum tilflytarar hava tørv á at fáa greiði á sum skjótast.

Seinasta árið hevur verið miðað ímóti at menna eina betri tænastu til tilflytarar. Ein faldari við hentum upplýsingum á enskum máli er gjørdur sum partur av vælkomupakkanum til tilflytarar. Í næstum verður í samstarvi við Útlendingastovuna skipað fyri fundi við eina røð av tilflytarum úr ymiskum londum. Hetta fyri at fáa nærri at vita um teirra upplivingar í sambandi við flyting í kommununa, og við støði í hesum at framleiða málrættaða kunning til tørvin hjá tilflytarum.

Hetta er liður í arbeiðum at menna eitt sonevnt "tilflytarhorn" í Snarskivuni, har Tórshavnar kommuna verður sjónliggjørd sum ein fjølbroytt kommuna, og at kommunan ynskir, at øll kenna seg vælkomnan og væl kunnaðan. Hetta "horn" skal eisini avspeglast talgilt á torshavn.fo, sum skal útbyggjast við tilfari til tilflytarar á enskum máli. Hetta skal eisini avspeglast á sosialu miðlunum hjá Tórshavnar kommunu soleiðis, at fyrispurningar um kunning og ráðgeving, sum kemur inn við Snarskivuna, um telefon, tpost o.s.fr., er skjótur at nøkta og bera fram á talgildu miðlunum.

**Hugskotið og tilflytarar**
Hugskotið, sum er íverksetarahúsið hjá Tórshavnar kommunu, ráðgevur persónum og fyritøkum um at stovna og reka egið virkið. Hugskotið ráðgevur sum er fleiri tilflytarum og eisini eru tað fleiri tilflytarar, sum leiga sær skrivstovuhøli í Hugskotinum, har teir arbeiða við at menna egin hugskot.

**Diversity**
Diversity er eitt tiltak hjá Tórshavnar kommunu, sum varð hildið á fyrsta sinni í 2016. Endamálið við tiltakinum var at heiðra fjølbroytni og á hendan hátt varpa ljós á ymiska tilfeingi í kommununi. Hetta var gjørt bæði gjørt út frá einum integratiónshugsunarhátti, men eisini sæð í ljósinum av, at samfeløg, har ymiskleiki er sjónligur, hava betri gróðrarlíkindi fyri nýhugsan og íverksetan.

**Tey átta integratiónstilmælini og samgonguskjalið**
Í stuttum kunnu tey níggju integratiónstilmælini í integratiónsálitinum hjá kommununi frá 2015 lýsast soleiðis:

1. Tulkatænasta – tryggja, at samskifti serliga millum stovn og foreldur og innan barnavernd verður fatað og skilt rætt bæði í mun til almenna kunning og viðbrekin mál
2. Starvsvenjing – útlendsku tilflytararnir hava í størri og minni mun útbúgvingar. Kommunan kann økja møguleikan fyri, at fakligu førleikararnir verða gagnnýttir innan fakøkið.
3. Málundirvísing – eggja til og krevja, at tilflytarar læra føroyskt mál, harundir eisini børn. Streingja á landsmyndugleikarnar um at skipa málundirvísingina betri og differentierað.
4. Kunning og ráðgeving – kunning um rættindi og skyldur, eitt nú kunningardag, ensktmælt kunningartilfar, “tilfytara-corner” á Snarskivuni
5. Mentorskipan – taka stig til sjálvbodna mentorskipan, har sjálvboðim hjálpa útlendskum tilflytara at finna seg til rættis á ymsan hátt, eitt nú luttøku í felagslívi (ítrótt v.m.), greiða frá fyrbrigdum, sum tilflytarin varnast og undrast á osfr.
6. Tilgongdir og tilfar í sambandi við familjusamførd børn – taka stig til serstakar tilgongdir og tilfar eitt nú í sambandi við eyka málundirvísing og tillagað tilfar
7. Tvørmentan – við tvørmentanarligum umhvørvi, har høvuðseykenni er opinleiki mótvegis mentanarmunum til tess at minka um málsligar og mentanarligar misskiljingar
8. Integratiónsskrá – samskipað integratiónsskrá til einstaka tilflytaran, og er skipaður eftir tørvin á vegleiðing og stuðli

Samgonguskjalið vísir til hetta og leggur so ítøkilig mál aftrat, serliga um at seta í starv integratiónssamskipara, og at skipa eitt altjóða hús. Niðanfyri verða hesi bæði mál nærri lýst sum grundarlag fyri víðari tilgongd.

**Integratiónssamskipari**
Til tess at byggja upp, skipa og samskipa kommunalu integratriónsátøkini, og at fáa miðsavnaða orku til endamálið, er skilagott at seta integratiónssamskipara í starv, sum burturav fæst við hetta.

Mett verður, at integratiónssamskiparin tørvar egið fysiskt stað, har viðkomandi kann tosa við tilflytarar uttan órógv og sum beinleiðis inngongd hjá tilflytarum til restina av kommununi, eitt slag av “front office” fyri restina av tænastunum hjá kommununi.

Tað skal vera gjørligt hjá tilflytarum at støkka inn á gólvið og hitta integratiónssamskiparan, sum so kann leiðbeina borgaran til restina av kommununi. Eisini skal samskiparin vegleiða og vísa borgaran til rætta myndugleikan, tá ið spurt verður um tænastu, ráðgeving v.m., sum ikki liggur hjá kommununi, tað veri seg til Útlendingastovuna ella aðrar almennar ella privatar stovnar.

Inngongdin hjá tilflytarum til kommununa og tænastur hennara skal vera tann sama sum hjá borgarunum annars, tvs. um Snarskivuna, eisini til tess at sjónliga signalera, at kommunan ynskir tilflytarum vælkomnar.

Umframt henda meira sjónliga partin, skal integratiónssamskiparin eisini seta í gongd og samskipa tey átøk, sum áløgd verða ella tørvur er á.

Harumframt skal hann í samskifti við ymsu fakøkini koma við hugskotum til átøk, vísa á tørv v.m., eins og at hann skal kunna lofta teimum avbjóðingum, ið fakøkini hava, og koma við uppskotum um loysnir í samstarvi við avvarðandi partar.

Uppgáva hjá integratiónssamskiparanum verður tí eisini at fáa skipað grundarlagið undir tilboðum og tænastum samsvarandi teimum átta integratiónstilmælunum so sum tulkatænastu, mentorskipan og starvsvenjingar v.m. í tann mun, ið kommunan sjálv kann fremja hesi.

Integratiónssamskiparin skal hava hóskandi útbúgving og royndir, men metast má, at í starvi sum hesum eru persónligu eginleikararnir eisini sera týdningarmiklir aftrat fakliga profilinum. Samskiparin fær fjøltáttaðar uppgávur og skal samstarva breitt við fleiri fakbólkar og skipanir internt og eksternt.

Setast kann spurningur við, hvørt talan skal vera um fulltíðar ella parttíðar starv, og um talan er um varandi starv skilt soleiðis, at endamál eisini má vera, at ymsu virkisøkini hjá kommununi við tíðini hava bygt upp førleikar og fortreytir til sjálvi at lyfta teirra viðkomandi integratiónsuppgávur.

Sæð í hesum ljósinum kundi starvið í fyrsta umfari verið skipað sum tíðaravmarkað verktætlanarstarv.

Integratiónsamskiparin verður eftir omanfyri standandi fysiskt staðsettur í Snarskivuni, men mett verður, at starvið yvirskipað vísir til stjórnina, í øllum førum ta tíð, tað tekur at byggja integratiónsarbeiðið upp.
Mett verður skilagott, at integratiónssamskiparin er knýttur at fakligum stýrisbólki ella kontaktbólki, ið er mannaður við viðkomandi deildarleiðarum ella starvsfólkum í mun til faklig viðurskifti, tænastur, tørv v.m. Hetta kundi eitt nú veri sosialdeildarleiðarin, leiðarin á Snarskivuni, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini, leiðarin á starvsfólkadeildini og leiðarin á Kvøldskúlanum, ella eftir tørvi.

**Altjóða hús**
Í samgonguskjalinum er skrivað, at altjóða hús skal skipast sum royndarverkætlan at leiðbeina tilflytarum. Um hetta er avmarkaða endamálið, so kann hetta skipast sum afturvendandi kvøldsetur ella líknandi eitt nú á Býarbókasavninum ella øðrum tøkum høli hjá kommununi.

Um hugsað verður breiðari, so kann eitt altjóða hús eisini vera karmur um tvørmentanarligt virksemi, tvs. karmur, har føroyingar og tilflytrarar hittast eitt nú til mentanarlig tiltøk, fyrilestrar v.m.

Annað endamál við altjóða húsinum kundi verið sum sosialt tilhaldsstað hjá tilflytarum tó soleiðis, at endamálið má framhaldandi vera integratión skilt soleiðis, at altjóða húsið fremur samveru millum tilflytarar og føroyingar. Havast skal eisini í huga, at tilflytararnir umboða fleiri tjóðskapir.

Spurningur er, um altjóða hús sum royndarverkætlan skal hugsast sum egið hús/stað, ella um talan heldur er um skipan/bygnað, ið samskiparin stendur fyri, har ymisk høli verða nýtt. Í samgonguskjalinum er eisini nevnt, at sjálvboðin, lesandi, eldri tilflytarar og onnur, ið kunnu/vilja hjálpa, taka lut, og tað kundi m.a. verið ein møguleiki í mun til fyriskipan av tiltøkum í altjóða húsinum.

Mett verður skilagott, at integratiónssamskiparin fær sum uppgávu at nágreina konsept fyri altjóða húsið.

**Fígging v.m.**
Integratión sum sjálvstøðug uppgáva hevur onga beinleiðis fígging. Fleiri tilmæli og átøk hava heldur ikki við sær beinleiðis tørv á nýggjari fígging, meðan eitt nú málundirvísing er tengt at játtan frá landsstýrinum.

Skal setast ein integratiónssamskipari, so skal starvið fyrst normerast og flokkast, eins og fígging skal fáast til vega til løn og rakstur. Alt eftir, hvussu virksemið við altjóða húsi verður skipað, er eisini fíggjartørvur knýttur at tí, eins og integratiónssamskiparin kann hava tørv á játtan til ávís integrtatiónsátøk.

Spurningur er, um stovnast skal nýggj konta á fíggjarætlanini til Integratiónssamskipan og átøk.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, miðfyisitingarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at umrøða málini í hesum uppriti nærri sum grundarlag fyri raðfesting, fíggjarætlan v.m.

**Trivnaðarnevndin 03. apríl 2017:** Umrøtt. Biðið verður um starvs- og uppgávulýsing í mun til integratiónssamskiparastarvið til næsta fund.

**Ískoyti:**
Biðið er um starvs- og uppgávulýsing til starv sum integratiónssamskipari.

Til tess at byggja upp, skipa og samskipa kommunalu integratriónsátøkini, og at fáa miðsavnaða orku til endamálið, verður skipað nýtt starv sum integratiónssamskipara. Starvið er fulla tíð.

Integratiónssamskiparin skal vera samskipandi millumlið millum tilflytarar og kommununa. Integratiónssamskiparin skal í hesum sambandi vegleiða og kunna tilflytarar um viðurskifti, tænastur og tilboð í kommununi, harundir at vísa til rætta myndugleika, tá tað ikki er kommunan, eitt nú Útlendingastovuna ella aðrar almennar ella privatar stovnar.

Integratiónssamskiparin hevur fjøltáttaðar uppgávur og skal samstarva breitt við fleiri fakbólkar og skipanir innanhýsis og uttanhýsis. Integratiónssamskiparin skal virða og duga at seta seg inn í avbjóðingar hjá tilflytarum sum heild, verða tænastusinnaður, uppsøkjandi og fyrikomandi.

Integratiónssamskiparin skal seta í gongd og samskipa tey átøk, sum áløgd verða ella kommunan metir tørvur verða á. Integratiónssamskiparin skal í samstarvi við ymsu deildirnar í fyrisitingini taka stig til og koma við hugskotum til átøk, vísa á tørv v.m., eins og at hann skal kunna lofta teimum avbjóðingum, ið deildirnar og tænastuøkini annars hava á integratiónsøkinum, og koma við uppskotum um loysnir í samstarvi við avvarðandi partar.

Uppgáva hjá integratiónssamskiparanum er eisini at skipa grundarlag undir skipanum og tilboðum samsvarandi integratiónstilmælunum (frá desember 2015) so sum kunning, tulkatænastu, mentorskipan og starvsvenjingar v.m. í tann mun, ið kommunan sjálv kann fremja hesi ella í samstarvi við aðrar myndugleikar.

Integratiónssamskiparin skal hava útbúgving á bachelor- ella kandidatstigi. Umframt fullgóðan málsligan førleika á enskum og føroyskum, skal integratiónssamskiparin hava gott innlit í kommunalu skipanina og føroysk samfelagsviðurskifti annars.

Integratiónssamskiparin hevur skrivstovu í Snarskivuni tó við tilvísing til trivnaðarfyristingina. Aftrat sær hevur integratiónssamskiparin fakligan kontaktbólk, ið er mannaður við viðkomandi deildarleiðarum ella starvsfólkum í mun til faklig viðurskifti, tænastur v.m.

Víðari tilgongd:
Sum víst í málslýsingini til undanfarna fund í trivnaðarnevndini, hevur integratión sum sjálvstøðug uppgáva onga beinleiðis fígging. Fleiri tilmæli og átøk hava heldur ikki við sær beinleiðis tørv á nýggjari fígging.

Starvið sum integratiónssamskipari skal normerast av fíggjarnevndini, eins og fígging skal fáast til vega til løn, rakstur og møgulig integratiónstiltøk. Ítøkiligi fíggjartørvurin hongur lutvíst saman við ítøkiligu lønarútreiðslunum, tvs. sáttmála, starsvaldur v.m., og virksemisstiginum annars, men metast má, at starvið krevur kr. 500-700.000 árliga.

Alt eftir, hvussu virksemið við altjóða húsi verður skipað, er eisini fíggjartørvur knýttur at tí.

Spurningur í hesum sambandi er, hvørt integratión skal hava sítt egna rakstrarstað.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at skipa starv sum integratiónssamskipari sambært omanfyri standandi starvs- og uppgávulýsing, og í hesum sambandi útvega fígging til løn, rakstur og integratiónsátøk. Mælt verður til at skipa serstaka rakstrarkontu til integratión.

**Trivnaðarnevndin 1. mai 2017:** Nevndin hevur onkra viðmerking til starvs- og uppgávulýsingina, sum verður tillagað samsvarandi. Samtykt at taka undir við tilmælinum um at skipa starv sum integratiónssamskipari og beinir málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2017:** Samtykt at Kr. 200.000 verða at játta til at løna integratiónssamkipara restina av árinum fíggjað soleiðis, ið verður at fíggja soleiðis:
1311 Miðfyrisiting kr. 100.000
1312 Trivnaðarfyrsiting kr. 100.000

Starvið er tíðaravmarkað í eitt ár.

**Ískoyti:**
Starvið sum integratiónssamskipari er sett frá 1. november 2017. Samskiparin kemur á fundin at umrøða ymisk viðurskifti innan integratión saman við nevndini sum grundarlag fyri seinni arbeiðsætlan.

**Trivnaðarnevndin 06. november 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Integratiónssamskiparin leggur fram uppskot til arbeiðsætlan.

**Trivnaðarnevndin 11. desember 2017:** Siri Helgadóttir Tórgarð, samskipari, kunnaði um ætlanir fyri 2018.

**Ískoyti:**
Eitt av høvuðstilmælunum í sambandi við integratiónsátøkini er at fáa sett í verk skipaða starvsvenjing til tilflytarar.

Gjørt er uppskot til eitt pilotprojekt hesum viðvíkjandi, sí hjálagt.

Endmálið er at skipa eina starvsvenjing, ið miðar í móti at skapa eina heildarintegratión, sum fevnir um mál, mentan, arbeiði og samfelag. Hetta merkir eitt nú, at í starvsvenjingin er skipað bæði sum arbeiði og málmenning, har tað eisini fáa undirvísing.

Uppskotið leggur upp til eina royndarverkætlan, har samlaða kostnaðarmetingin er kr. 1,8 mió, og sum fevnir um 12 tilflytarar, ið fáa løn í starvsvenjingartíðarskeiðinum, settum lærara í ¾ tíð og samsýning til mentorar umframt útreiðslur til undirvísingartilfar v.m.

Uppskotið verður lagt fram.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at viðgera uppskotið og at fáa heimild til at arbeiða víðari við ætlanini.

**Trivnaðarnevndin 05. mars 2018:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Eitt av høvuðstilmælunum í sambandi við integratiónsátøkini er at fáa sett í verk skipaða málundirvísing til tilflytarar. Gjørt er upprit um føroyskt sum fremmandamál, sí hjálagt.

Málið er grundarsteinur undir góðari integratión. Við góðum mál førleikum ber til at kunna seg um samfelagið, mentanina og fáa innlit í sosiala siðvenju. Sum foreldur gerst tað lættari at hjálpa og stuðla børnunum. Og tað gerst lættari at fáa eitt gott og gevandi arbeiðslív.

Umframt at lýsa verandi støðu og undirvísingartilboð, verður í uppritinum mælt til, at kommunan gongur á odda at skipa nýggjan leist til tilflytarar at læra føroyskt sum fremmandamál, ið eisini er tillagað til ymiskt førleikastig og ymiskt torleikastig.

Uppritið verður lagt fram.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at viðgera uppritið og at geva umsitingini heimild til at arbeiða víðari við ætlanini.

**Trivnaðarnevndin 07. mai 2018:** Samtykt at fáa sett ætlanina í verk, harundir at fáa til vega fígging, og at beina málið til ummælis í mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mikudagin.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at heita á umsitingina um at avvarandi partar í umsitingini og Kvøldskúlanum greina málið nærri og koma aftur í mentamálanevndina.

**Ískoyti:**
Viðv. skúlatilboði
Við greiningunum í málinum er fingið eitt enn betri grundarlag fyri at fara undir m.a at betra um eitt nú málundirvísingina og onnur átøk. Mett verður mest hóskandi at fingið dagført undirvísingartilboð skipað innan Kvøldskúlaskipanina og innan galdandi lóg, ið m.a. hevur eina samansetta fígging frá kommununi og Mentamálaráðnum. Skúlin hevur í mong ár havt skipaða undirvísing fyri tilflytarum, ið er ment og útbygd stigvíst. Kvøldskúlin og integratiónssamskiparin hava gjørt eitt dagført upprit um málundirvísing, ið er hjálagt.

Viðv. tilskundan til uppmøting og læring
Í fjør viðgjørdi býráðið mál 17/01123 viðv. prísskipan hjá Kvøldskúlanum 2017-18. Sí hjáløgt skjal frá viðgerðini tá. Ein partur av samtyktini var at innføra eitt depositum á 2000 kr fyri byrjanarskeið, ið næmingurin fær aftur um hann møtir 85% og fer til próvtøku. Sum heild hevði tað áðrenn ikki gingið nøktandi við at møta hjá næmingum og har fleiri møta tí passar teimum best. At læra mál er oftast sera krevjandi og krevur eisini ávísa tilskundan.

Útlendingalóggávan í Føroyum, ið er danskt málsøkið, hevur í høvuðsheitum verið óbroytt síðani aldarskiftið, meðan tað í Danmark eru gjørdar hópin av tillagingum, ið eru ætlaðar at møta teimum avbjóðingunum, ið danir hava innan sítt økið, herundir viðv. væntandi málførleikum hjá tilflytarunum.

Í verandi støðu ber til sbrt. galdandi lóggávu at fáa varandi uppihaldsloyvi í Føroyum uttan at hava nøktandi málsligan førleika. Mælt verður til, at býráðið formliga heitir á landsstýrismannin í Uttanríkis- og vinnumálum, um at fáa dagført útlendingalóggávuna soleiðis, at reglurnar í Føroyum í størri mun tilskunda og eyggja tilflytarum til skjótt og væl at ogna sær nøktandi málkunnleika og at treyt m.a. verður sett um nøktandi málføreika fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi í Føroyum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja:

a) at taka undir við hjálagda dagførda uppritinum um málundirvísing við støði í ymsum førleikastigum og torleikastigum, og beinanvegin søkja Mentamálaráðið um fígging til slík skeið at byrja eftir summarfrítíðina, har Kvøldskúlin í Havn eisini bjóðar seg til at verða høvuðsstøð fyri slíka undirvísing
b) at áheitan verður send til landsmyndugleikarnar um at fáa sett sum megintreyt fyri varandi uppihaldsloyvi, at persónar hava staðið hóskandi málroynd.

Málið at senda í býráðið um trivnaðarnevndina.

**Ískoyti**:
Fíggjarligar avleiðingar
Virksemi innan málundirvísing fyri tilflytarum er sum meginreglu fíggjað soleiðis, at landið fíggjar undirvísingarkostnaðin og Kvøldskúlin annað. Tó so, at ofta er ávís óvissa knýtt at fíggingini frá landinum. Ítøkiliga hevur Kvøldskúlin oyramerkt ávísa upphædd til at fara undir eyka byrjanarundirvísingartilboðið fyri tilflytarum við veikum bókligum førleikum. Víðari viðgerðin í nevndunum vil sýna um og hvøjar aðrar møguligar fíggjarligar avleiðingar vera í 2019 og framyvir.

**Mentamálanevndin 18. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí ískoyti, at heita á landmyndugleikarnar um saman við kommununum at fara undir røð av átøkum at fremja integratión bæði viðvíkjandi málmenning, mentan, førleikameting, arbeiðsmarknað o.a.

**Trivnaðarnevndin 20. juni 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

# 145/18 Útbygging av frítíðarskúlanum á Argjahamri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 4/18 | 18/00057-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 28.02.2018 | 78/18 | 18/00057-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 28.02.2018 | 62/18 | 18/00057-2 |
| 4 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 37/18 | 18/00057-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 155/18 | 18/00057-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 186/18 | 18/00057-2 |
| 7 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 173/18 | 18/00057-2 |
| 8 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 145/18 | 18/00057-2 |
| 9 Býráðsfundur | | | 18/00057-2 |

**Upprunin til málið:**
Sí niðanfyri

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Víst verður eisini til mál 14/01009 í sambandi við, at fimleikarhøllin er bygd út til nýggja ítróttarhøll á Argjahamri, og at tað í hesum sambandi varð tikin avgerð um at byggja frítíðarskúlan út, tí sum bygningspartar eru teir sambygdir. Talan er um 130 m2 stóran rábygning, ið er gørdur og innilokaður, men uttan vindeygu og hurðar.

Umsitingin hevur biðið MAP arbeiða víðari við hesari verkætlan við at prosjektera, søkja um byggiloyvi og gera eina samlaða kostnaðarmeting at byggja frítíðarskúlan lidnan. Her er í høvuðsheitum talan um timbur-, gólv-, stál-, el-, hvs-, ventilatións- og málaraarbeiði, vindeygu og hurðar, snyrilsstáltrappu til høllina, íroknað ráðgevarakostna, prosjektumsiting og trygging. Sí annars skitsutekning av innrætting.

Umsitingin ætlar at bjóða arbeiðið út í undirhondsboð til høvuðsarbeiðstakararnar Sp/f TG-Verk og Sp/f 10.dec. 2013. TG-Verk kennir til verandi høll á Argjahamri. Sp/f 10.dec. 2013 hevur arbeiðsroyndir við loftshæddini á Hoyvíkshøllini, sum er eitt líknandi arbeiði sum útbyggingin av frítíðarskúlanum.

Á íløguætlanini fyri 2018 eru settar kr. 1,8 mió av til endamálið á kontu 3175 barnaansing.

**Lógir, ásetingar o.a.**
ABF 06, ABR89

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
14/01009

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at bjóða bygginguna av frítíðarskúlan á Argjahamri út eftir omanfyristandandi leisti og at geva umsitingini heimild at samráðast um sáttmála at leggja fyri nevnd til endaliga støðutakan.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Gjørt er uppskot til ráðgevaraavtalu við MAP Arkitektar áljóðandi kr. 285.000, ið fevnir m.a. um myndugleikaprosjekt, útbjóðingartilfar og skipan av útboði, høvuðsprojekt, byggileiðslu, fakeftirlit og garantisýn.

Tíðarætlan fyri samlaðu verkætlanina er, at myndugleikaprosjekt skal vera sent kommununi 1. mars 2018, byggiloyvi fáast til vega og útboð til arbeiðstakarar í apríl. Ætlandi verður arbeiðstøkusáttmáli latin mentamálanevndini í mai, so at byggingin kann byrja í juni. Byggingin skal vera liðug um ársskiftið.

Biðið verður harumframt um at flyta kr. 1.800.000 av íløgukarminum 3175 Barnaansing L00001 til nýggja løgukontu Útbygging Frítíðarskúlanum á Argjahamri.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at góðkenna ráðgevarasáttmálan og at játta kr. 1.800.000 á løgukarmi

**Mentamálanevndin 28. februar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Byggiarbeiðið er boðið út í undirhondsboð til arbeiðstakararnar Sp/f BP Bygging og Sp/f TG-Verk. Innkomnu tilboðini eru soljóðandi:

BP Bygging: kr. 2.969.600,00 u/mvg.

TG-Verk: kr. 2.830.660,00 u/mvg.

Høvuðsráðgevin og umsitingin hava verið í samráðing við lægsta tilboðsgevan TG-Verk, til tess at eftirkanna tilboðið og at finna møguligar tillagingar, ið kunnu hava við sær lægri kostnað. Eftir hesar sparingar er tilboðið hjá TG-Verk kr. 2.408.822,00 u/mvg. Avleiðing av hesum er m.a., at trappurúmið/-uppgongdin til høllina ikki verður gjørd.

Umsitingin hevur síðani gjørt eina samlaða kostnaðarmeting at gera Frítíðarskúlan á Argjaharmri lidnan, tvs. tilboðskostnaðurin (hvú), ráðgevarakostnaður, prosjektumsiting, trygging og mvg íroknað, og er samlaði kostnaðurin kr. 3.147.695,00.

Sum kunnugt er játtanin kr. 1,8 mió á kontu 3175 L31007 Útbygging av frítíðarskúlanum á Argjahamri. Tað resta sostatt kr. 1,35 mió í. Kostnaðarmetingin, sum íløgujáttanin byggir á, er upprunaliga frá várinum 2017, men ásannast má, at henda hevur ikki verið nóg neyv.

Aðrar íløgujáttanir eru ikki á grein 3 í fíggjarætlanini.

Mett verður, at til ber at flyta kr. 300.000 av rakstrarkontu 3317 Ungdómshús á Argjum, ið er minninýtsla frá 2017, og kr. 200.000 av rakstrarkontu 3142 Frítíðarskúlan á Argjahamri, ið somuleiðis stavar frá minninýtslu í 2017, til verkætlanina. Játtanartørvur er tá kr. 850.000, ið mett verður ikki ber til at fáa til vega á grein 3.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at fáa til vega kr. 850.000 aftrat til verkætlanina til tess at kunna taka av tilboðnum og gera arbeiðstøkusáttmála.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
Víst verður til fíggjartørvin omanfyri, har kr. 850.000 vanta í til tess at kunna gera arbeiðstøkusáttmála við lægsta tilboðsgevan. Umframt nevndu fígging verður mett, at til ber at játta kr. 676.000 av kontu 3214 Broytingar og minni umvælingar, og kr. 172.000 av kontu 3216 Verkætlanir á ungdómsøkinum.

Viðmerkjast skal, at játtanin til kontu 3214 er ætlað til at gera realskúlan kláran til dagstovn, men onnur játtan verður ætlandi fingin til vega sum íløgu í eykajáttan (sí mál 18/01522). Viðvíkandi kontu 3216, sum er játtan til frítíðartilboðið til 3. flokk, so verður mett, at skerda játtanin onga ávirkan fær á virksemið.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og leiðarin í barna- og ungdómsdeildini mæla til at gera arbeiðstøkusáttmála vil TG-Verk fyri tilboðsupphæddina kr. 2.408.822 u/mvg og játta kr. 3.147.695 til samlaða byggi- og projektkostnaðin av løgukontu 3175 L31007 Útbygging av frítíðarskúlanum á Argjahamri.

Harumframt verður mælt til at flyta kr. 200.000 av kontu 3142 Frítíðarskúlin á Argjahamri, kr. 676.000 av kontu 3214 Broytingar og minni umvælingar, kr. 172.000 av kontu 3216 Verkætlanir á ungdómsøkinum, og kr. 300.000 av kontu 3317 Ungdómshús á Argjum til løgukontu 3175 L31007 Útbygging av frítíðarskúlanum á Argjahamri.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Jákup Dam, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Heðin Mortensen, stemmar blankt.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið i býráðið at viðgera sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

# 146/18 Føroya Symfoniorkestur: Umskipan, samstarv o.a.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 11.04.2018 | 142/18 | 17/04201-3 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 77/18 | 17/04201-3 |
| 3 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 198/18 | 17/04201-3 |
| 4 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 174/18 | 17/04201-3 |
| 5 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 146/18 | 17/04201-3 |

**Upprunin til málið:**
Skriv frá Mentamálaráðnum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ætlanin er at umskipa Føroya Symfoniorkestur frá at vera ein felagsskapur til at vera ein sjálvsognarstovn og at Tórshavnar kommuna skal vera ein av undirskrivandi stovnarunum.

Sí viðfest um at skipa Føroya Symfoniorkestur sum sjálvsognarstovn – í dag er tað ein felagsskapur. Sum uppleggið til viðtøkur er, er Tórshavnar kommuna rokna sum ein av undirskrivandi stovnarunum.

Í uppskoti er stýri við fýra limum, har MMR velur ein, sum er formaður.

Tórshavnar kommuna skal eftir hesum hava ein lim. Stýrið setur (orkestur)stjóra fyri stovnin. Stýrið kann harumframt seta fastan dirigent og verkætlanarleiðara. Orkesturstjórin mannar formliga orkestrið. Ein 3-manna programmnevnd hevur saman við orkesturstjóranum listaligu leiðsluna av orkestrinum og ger konsertskrá. Í aðra máta virkar hetta í stórum sum stýrið fyri Tjóðpall Føroya, tó at Tjóðpallurin er almennur stovnur.

Viðv. stýrisumboðanini, so er hóskandi at Tórshavnar kommuna hevur fastan stýrislim.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ikki viðkomandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tórshavnar kommuna er ein av førstu stuðlunum hjá Føroya Symfoniorskestri. Árligi rakstrarstuðulin fyri 2018 er 225 tkr. Eisini verður í løtuni viðgjørt hvørt orkestrið skal hava heimstað í nýggja musikkskúlabygninginum tá hann verður liðugur í 2019.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Onki.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ikki viðkomandi.

**Umhvørvisárin**
Ikki viðkomandi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- Uppskot til viðtøkur
- Notat hjá MMR um málið

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka undir við uppskotinum til viðtøkur. Málið verður beint í býráðið.

**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
Eftir at viðgerðin fór fram seinast, hevur MMR valt at dagføra uppskotið nakað. Hetta við støði í arbeiði hjá arbeiðsbólki við umboðum fyri Mentamálaráðið og Føroya Symfoniorkestur.

Uppskotið til viðtøkur er nú nakað tillagað og er m.a. grein 1 blivin betri orðað, umframt broytingar viðv. samanseting av stýrinum o.a. Uppskotið verður gjøgnumgingið á fundinum.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja dagførda uppskotið til viðtøkur og at Tórshavnar kommuna verður ein av stovnarunum av sjálvognarstovninum Føroya Symfoniorkestur. Málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

## 147/18 Nýggjur umlættingar- og rehabiliteringsdepil

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 02.10.2017 | 19/17 | 17/03195-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 229/17 | 17/03195-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 239/17 | 17/03195-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 42/18 | 17/03195-1 |
| 5 Eldranevndin | 09.04.2018 | 1/18 | 17/03195-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 95/18 | 17/03195-1 |
| 7 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 75/18 | 17/03195-1 |
| 8 Eldranevndin | 04.06.2018 | 2/18 | 17/03195-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 171/18 | 17/03195-1 |
| 10 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 147/18 | 17/03195-1 |

**Málslýsing:**
Víst verður til virkisætlan og tilmæli latin eldranevndini 11. september 2017 (j.nr. 17/00586), har tað m.a. verður mælt til at byggja nýggjan depil til umlætting og samdøgursrehabilitering. Hetta tilmælið verður niðanfyri útgreinað.

Mett verður skilabest við depli við 30 plássum, sum í høvuðsheitum kunnu býtast í 10 samdøgursrehabiliteringspláss og 20 umlættingarpláss, ið tó skal hugsast fleksibult eftir tørvinum hjá brúkarunum.

Í løtuni hevur heilsu- og umsorganartænastan 11 umlættingarpláss og 5 samdøgursrehabiliteringspláss.

Samdøgursrehabiliteringspláss eru stutttíðarpláss til eldri fólk, sum við tilboði um endurmenning í styttri tíðarskeið kunnu fara heim aftur til sín sjálvs at búgva, møguliga stuðlað við heimahjálp. Til samdøgursrehabilitering verður dentur lagdur á at endurmenna búfólkini og geva hjálp til sjálvhjálp gjøgnum venjing og annað.

Rehabiliteringstíðarskeiðið kann vera ymiskt alt eftir støðuni hjá einstaka borgaranum.

Umlættingarpláss eru eisini stutttíðarpláss til eldri fólk, sum búgva heima, men eru illa fyri. Tey koma til umlætting fyri at lætta um hjá avvarðandi, sum eru við til at taka sær av teimum í heiminum. Til ber at fáa afturvendandi umlætting, um mett verður, at tørvur er á tí. Tað er rættiliga vanligt, at fólk, sum fær tillutað fast røktarbúpláss, fyrst hevur verið til umlætting. Umlættingartíðarskeiði kann vera ymiskt alt eftir tørvi.

Umframt at vera týðandi tilboð til borgararnar, hava enn fleiri stutttíðarpláss til umlætting og rehabilitering stóran skipanarligan týdning fyri skipan av samlaðu heimatænastuni, harundir starvsfólkatørv, og til ber betri at tálma tørvin á nýggjum røktarheimsplássum. Tað ber eisini betri til at taka ímóti bráðfeingis støðum, liðugt viðgjørdum sjúklingum v.m., og somuleiðis kunnu fleiri stutttíðarpláss tryggja betur visitatión.

Nýggi umlættingar- og rehabiliteringsdepilin er hugsaður sum ein deild, har mestsum øll umlætting og samdøgursrehabilitering í Heilsu- og umsorganartænastuni fer fram.
Við hesi støðd fæst bæði fakligur og tænastuligur fleksibilitetur og skynsamur rakstur.

Í dag fáa umleið 40 fólk um árið gagn av tilboðnum um samdøgursrehabilitering, og vanliga standa eini 10 fólk á bíðilista. Við at økja plássini til 10 pláss, skuldi rúm verið fyri, at 80 heimabúgvandi um árið kunnu brúka samdøgursrehabiliteringstilboðið.

Viðvíkjandi umlætting, so kunnu 10 av teim 30 plássunum verða nýtt til fólk, sum hava afturvendandi tørv á umlætting t.d. 3-4 ferðir um árið. Tá vilja millum 30 og 40 fólk gagnnýta hesi 10 plássini. Higartil í ár (sept. 2017) hevur Heilsu- og umsorganartænastan fingið 224 áheitanir um umlætting. Hetta er bæði frá borgarum, sum hava fingið umlætting í ár, og frá borgarum, sum senda áheitan fyrstu ferð.

Heilsu- og umsorganartænastan hevur veitt umlætting 157 ferðir í ár. Longdin á teimum 157 umlættingunum, sum hava verið higartil í ár, er ymisk. Tað vil siga, at higartil í ár eru 67 áheitanir, sum ikki eru gingnar á møti.

Restina av teimum 30 plássunum, t.e. eisini 10 pláss, kunnu brúkast til bráðfeingispláss, liðugt viðgjørdar sjúklingar, sonevnd metingarpláss og onnur, sum hava ikki so ofta tørv á umlætting, t.d. bert eina til tvær ferðir um árið.

Upplagt er, at liðugt viðgjørdir sjúklingar, sum ikki kunnu fara heim av sjúkrahúsinum, koma á depilin til metingar og til uppvenjing, har tað betri ber til at meta um og staðfesta, hvørt borgarin kann fara heim ella skal hava búpláss á røktarheimi.

Hesin býtislykil millum rehabilitering, umlætting og bráðfeingis pláss er ikki endaligur, men skal júst vera fleksibul í mun til áleikandi tørv.

Við deplinum er møguligt at flyta verandi umlættingarpláss, t.e. 2 á Lágargarði og 2 á Boðanesheiminum, og tey 5 samdøgursrehabiliteringsplássini á Boðanesheiminum, til depilin. Hesi 9 stutttíðarplássini verða so løgd um til føst búpláss, ið tað eisini er tørvur á.

Umframt at fáa 9 nýggj føst bupláss, so ger hetta eisini, at allar røktardeildir í Heilsu- og umsorganartænastuni eru røktardeildir burturav. Hetta er meira skynsamt fyri deildirnar, sum í dag eisini fast hýsa umlætting og samdøgursrehabilitering, tí tað viðførir størri stabilitet og frið við sær.

Við at byggja 30 pláss verður mett møguligt eisini at endurnýggja tey sjey plássini á Umlættingarheiminum í V.U. Hammershaimbsgøtu, tvs. niðurleggja virksemið har. Fysisku karmarnir hava leingi verið ótíðarhóskandi og illa egnaðir til røktartørvandi og demenssjúk fólk, og rakstrarliga er talan um lítla og tí lutfalsliga kostnaðarmikla eind.

Við hesi loysnini verða sostatt: 7 umlættingarpláss endurnýggjað, 9 pláss umløgd til føst búpláss, tá umlættingin flytur í umlættingar- og rehabiliteringsdepilin, og 14 nýggj stutttíðarpláss fingin til vega aftrat teimum, sum eru í dag.

Við deplinum økist dekningsstigið, t.e. lutfallið av búplássum í mun til talið av fólki eldri enn 80 ár, bæði á føstum røktarbúplássum og á stutttíðarbúplássum, sí kolonnu fyri árið 2018 í talvuni niðanfyri, har ætlanin við 8 nýggjum umlættingarplássum til demenssjúk á Tjarnargarði (j.nr. 17/02942) eisini sæst í kolonnu fyri ár 2020.

Verkætlanartilgongd:
Ætlanin er, at depilin skal vera í rakstri seinnu hálvu av 2018. Farast skal tí beinanvegin undir at gera nærri tørvs- og kravlýsing umframt skitsuuppskot sum grundarlag fyri

útbjóðingartilfari, tíðarætlan, kostnaðarmeting og uppskoti til útbjóðingarhátt at leggja fyri eldranevndina í seinasta lagi til nevndarfundin 27. november 2017.

Staðseting og lendið kann hava ávísan týdning fyri bygningsloysn, og tí eigur at verða biðið um staðseting og grundøkið beinanvegin.

Til fyrireikingar, útvegan av skitsuuppskoti v.m. verður mett neyðugt við upphædd kr. 500.000 at játta av tøkum íløgukarmi 2775 eldrarøkt og stovna verkætlanarkontu til endamálið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at byggja nýggjan umlættingar- og samdøgursrehabiliteringsdepil við 30 plássum at standa klárt at taka í nýtslu í seinnu hálvu av 2018, og í hesum sambandi:

- at gera tørvs- og kravlýsing og skitsuuppskot sum grundarlag fyri útbjóðingartilfari, tíðarætlan, konstnaðarmeting og uppskoti til útbjóðingarhátt at leggja fyri nevndina aftur til nevndarfundin 27. november 2017,

- at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um staðseting, og

- at játta kr. 500.000 til fyrireikingar, útvegan av skitsuuppskoti v.m. av íløgukontu 2775 eldarøkt og stovna verkætlanarkontu til endamálið.

**Eldranevndin 02. oktober 2017**: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við verkætlanina at byggja ein nýggjan umlættingar- og rehabiliteringsdepil hevur býarskipanardeildin arbeitt við møguligum staðsetingum til verkætlanina. Í mun til býarplanleggingina og staðseting av almennum stovnum vísir umsitingin á eitt økið við endan av Rólantsgøtu í Hoyvík, ið liggur náttúruvakurt upp at dalinum Langa, sí kortskjalið *Rólantsgøta_kort.*

Økið er partur av matrikklunum 135fe og 138a, ogn hjá Tórshavnar kommunu, sum eru væl størri, enn hvat tørvur er á, og skal ein depil til fólk byggjast, má hóskandi øki til tess frámatrikulerast. Byggingin skal somuleiðis skipast í mun til ein byggilinju, ið skal tryggja, at

byggingin leggur seg eftir bygda umhvørvinum, og at ein hóskandi frástøða til verandi gøtu og frílendi verður hildin.

Økið liggur í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og er økið ætlað blandaðari bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt. Soleiðis er ein umlættingar- og rehabiliteringsdepil ikki í stríð við almennu byggisamtyktina. Men í sambandi við útstykkingar í A3 øki skal serstøk byggisamtykt gerast.

Byggitørvurin á deplinum er áleið 2000$m^2$. Mest loyvda byggistig í A3 øki er 0,3, og er sostatt tørvur á einum grundstykki áleið 6000-6500$m^2$ til støddar. Talan er um bygging í einari hædd við 30 kømrum við bað og duri, venjingarhøli, uppihaldsøki við serveringskøki, vaskarí, goymslur.

Ein bústaður til umlætting hóskar seg væl í einum øki, sum longu er merkt av at vera bústaðarøki. Fríøki er nærmasti granni til ætlaðu byggingina, og stuðlar tað væl undir virksemið, at fólk búgva til umlætting í eitt styttri tíðarskeið.

Sama økið var einaferð ætlað til dagstovn í Hoyvík, men er hetta ikki aktuelt longur.

**Skjøl:**
Økið við Rólantsgøtu, journal nr. 17/03195-5
Rólantsgøta_kort, journal nr. 17/03195-6

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at samtykkja nevndu staðsetingina til ein nýggjan umlættingar- og rehabiliteringsdepil, at sundurbýta uml. 6500$m^2$ av matr.135fe og 138a, at gera nýggja serstaka byggisamtykt og at beina málið í eldranevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtyktina omanfyri.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin mælir til at eldranevndin tekur undir við staðsetingini sum er ávíst og sum er samtykt av byggi- og býarskipanarnevndini, og at beina málið víðari í fíggjarnevndina og býráðið.

**Eldranevndin 09. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykti at taka undir við Eldranevndini og senda málið til kunningar/viðmerkingar hjá eigarafelagnum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Atkvøtt varð um uppskot frá Tróndi Sigursson um at beina málið aftur í nevnd.

Einmælt samtykt at beina málið aftur í fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Tørvslýsing

Til tess at gera tørvslýsingina, ið er grundarlag fyri ítøkiligari byggiskrá, so kvalifiseraða sum gjørligt, er valt at taka brúkaraumboð við servitan innan allar funktiónir við í arbeiðið. Hesi eru ein ergoterapetur, ein fysioterapeutur, ein køksleiðari og deildarleiðarin fyri verandi rehabilitering/umlætting. Harafturat hevur ein eindarleiðari verið við til tess at tryggja skynsemi í rakstri, tá bygningurin er liðugur og tikin í nýtslu.

Í stuttum verður mælt til 28 pláss býtt í tvær lonir. Við støði í hesum er gjørd meting um starsvfólkanormering og rúmskrá, umframt onnur yvirskipað viðurskifti. Talan verður eftir hesum um bygning uml. 1.800 fermetrar.

Sí tørvslýsing í hjalagda skjalið.

Í ætlan liggur at byggja depilin við Rólantsgøtu í Hoyvík. Hoyring hevur verið hjá eigarafelagnum, og er ynskið borið fram um, at bygningurin skal vera í einari hædd og hava flagtekju.

Brúkaraumboð hava serliga lagt dent á at køkur eigur at verða partur av umlættingar og rehabiliteringsdeplinum. Tí umframt tað heimliga og hugnaliga við at matur verður gjørdur á staðnum, so er kostur ein sera týðandi partur av rehabiliteringini og skal tillagast til einstaka borgarar.
Lágargarður er við at vera á markinum fyri hvussu nógvar døgurðar afturat køkurin megnar at gera afturat tí sum verður gjørt í dag.

Bygginevndin hevur góðkent tørvlýsingina, og klárt er tí at fara undir at gera byggiskrá, tíðarætlan og kostnaðarætlan.

Mett verður skilagott, at eldranevndin eisini umrøður tørvslýsinga til tess at tryggja felags fatan um verkætlanina.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og verkætlanarleiðarin mæla eldranevndini til, at taka undir við tørvslýsingini sum grundarlag fyri víðari arbeiðinum at gera byggiskrá v.m.

**Eldranevndin 04. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Eigarafelagið hevur í hoyringssvari gjørt vart við, at um kommununa velur at brúka økið í Rólantsgøtu til annað enn barnagarð, hevur eigarafelagi rætt til endurgjald.

Umsitingin hevur kannað hetta hjá løgfrøðinginum, sum arbeiddi við avtaluni við eigarafelagið og løgfrøðiliga niðurstøðan er henda:

Kommunan hevur luttikið í útstykkingararbeiðinum og hevur tá goldið fyri 2.500 m2 . Ætlanin var at byggja barnagarð á øki.

Løgfrøðiliga metingin er, at kommunan hevur goldið fyri hetta øki og tí ikki eigur at gjalda einaferð afturat, um kommunan velur at byggja annað enn barnagarð á øki. Um kommunan

ætlar at brúka meira enn 2.500 fermetrar, eigur kommunan at gjalda eigarafelagnum fyri tað, sum fer upp um 2.500 fermetrar. Tann kostnaðurin má avtalast nærri við eigarafelagið.

Tann løgfrøðiliga metingin er, at um kommunan ikki fer upp um teir 2.500 fermetrarnar, eigur kommunan ikki at gjalda eigarafelagnum nakað, tí goldið er longu fyri 2.500 fermetrar.

Enn er ikki greitt hvussu stórur ein umlættingar/rehabiliteringsdepil verður og tí er ilt at siga um kommuna hevur tørv á meira enn 2.500 fermetrum. Heldur ikki ber í løtuni til at siga hvat ein evt. kostnaður vildi verið um tørvur er á meira enn 2.500 fermetrum

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og virkandi leiðari á stjórnarskrivstovuni mæla til at Fíggjarnevndin gevur umsitingini heimild at samráðast við eigarafelagi um evt. kostnað um kommunan hevur tørv á lendi sum er størri enn 2.500 fermetrar.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við staðsetingini og at heimila umsitingini at samráðast við eigarafelagið um evt. kostnað um lendi størri enn 2.500 fermetrar. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri, tveimum ímóti og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Ruth Vang og Halla Samuelsen.

Ímóti atkvøddu: Bjørg Dam og Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Anfinn Brekkstein.

# 148/18 Bráðfeingistørvur á dagstovnaplássum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 306/17 | 17/03897-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 2/18 | 17/03897-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 22.01.2018 | 36/18 | 17/03897-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 23.01.2018 | 29/18 | 17/03897-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 18/18 | 17/03897-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 23.04.2018 | 149/18 | 17/03897-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 24.04.2018 | 129/18 | 17/03897-1 |
| 8 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 83/18 | 17/03897-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 185/18 | 17/03897-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 177/18 | 17/03897-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 18.06.2018 | 206/18 | 17/03897-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 204/18 | 17/03897-1 |
| 13 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 148/18 | 17/03897-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Talið av nýføðingum í 2016 í Tórshavnar kommunu var 21% hægri enn í 2015 (52 børn). Undanfarnu 5-6 árini hevur kommunan tillagað plásskapasitetin til eitt alsamt lækkandi barnatal við tað, at dagrøktarskipanin og virksemið í dagstovninum Vípan eru niðurløgd hesi árini.

Nú er øvugta støða, og tí hevur umsitingin í 2016 og 2017 arbeitt við ymsum loysnum til tess at tryggja øllum pláss. Í vár eru fingin áleið 30 vøggustovupláss, í leigaðum hølum, og við at fremja eina útbygging í Býlingshúsinum undir Brúnni.

Vegna framhaldandi tørv, hevur umsitingin arbeitt við øðrum loysnum. Til skúlabyrjan 2017/18 er frítíðarskúlin í Hornabø fluttur til felagseind í Kongagøtu, (sí mál 17/00817 Felagseind við skúla og frítíðarskúla í Kongagøtu) fyri á tann hátt at fáa nýggja vøggustovu í Hornabø. Sostatt eru bæði í Kongagøtu og í Hornabø gjørdar tillagingar, soleiðis at tað passar til givna virksemið.

Umframt hesi átøk, hava dagstovnar í kommununi tillagað stovnsins virksemi til tess, at teir hava kunnað tikið fleiri vøggustovubørn inn so hvørt í 2017. Tískil eru so gott sum eingi tøk pláss á dagstovnunum í kommununi.

Snarskivan, ið umsitur plássávísingina, hevur nú boðað barna- og ungdómsdeildini frá, at tørvur er á dagstovnaplássum, bæði vøggustovu- og barnagarðsplássum frá ársskifti 2017/18 at rokna, hetta serliga vegna tilflyting til kommununa. Í løtuni standa 26 børn á bíðilista til vøggustovu, umframt 10 systkinapør, sum ynskja pláss á sama stovni. Harumframt koma fleiri á lista til eftirfylgjandi mánaðirnar.

Stovnarnir eru sum omanfyri nevnt longu fullir. Til tess at tryggja øllum á bíðilista pláss, verður neyðugt at útvega høli - skjótast. Veitir kommunan ikki pláss, kann Almannaverkið sbrt. forsorgarlógini veita foreldrum

fyribils hjálp vegna vantandi barnaansing, men álagt er kommununi at endurrinda landskassanum hesar útreiðslur. Fyri stakan forsyrgjara vil talan verða um kr. 15.674 um mðr.

Ynskiligt er, at loysnin, sum nú skal finnast, er ein varandi ella langtíðarloysn skilt á tann hátt, at tað er ikki haldbart at leiga og innrætta høli fyri stutta tíð í senn, so sum tað var gjørt í Kirkjustovu frá januar til juni 2017. Hetta er kostnaðarmikið, og haraftrat er torført at fáa starvsfólk til dagstovnaøkið yvirhøvur og uppaftur torførari til eitt so stutt tíðarskeið.

Stutttíðarloysnir hava eisini tann vansa, at vøggustovubørn skulu flyta umhvørvið og kvetta relatiónir við vaksin, sum  tey hava kent í 6 mðr. til aftur at skapa nýggjar relatiónir, tá tey vera flutt.

Umsitingin er farin í gongd við at finna høli.

Eitt uppskot kundi verið vøggustova og barnagarður í gamla realskúlanum. Í umhvørvinum í Kongagøtu eru góðir møguleikar til útivirksemi, bæði spælipláss í garðinum við Móttøkuhúsinum og spæliplássi í Grasagarði, umframt at tað virksemið, sum er ætlað fyri fimleikahøllina í Finsen, gagnligt fyri dagstovnatilboðið.

Virksemið í felagseindini í Kongagøtu kann eisini verða til gagns fyri vøggustovu- og barnagarðsvirksemi. Tað eru gjørdar tillagingar til frítíðarskúla virksemi í húsinum hjá Frk. Chor, sum eisini kann verða til gagns fyri dagstovnatilboðið fyrrapartin av degnum.

Fyrimunur er, at kommunan eigur bygningin og tískil er eingin leiga, men hølini skulu klárgerast, og óvist er, hvat tað kostar.

Aðrar loysnir kundi verið sethús, men tann marknaðurin er ikki lættur at koma framat í løtuni uttan stóran kostnað.

Undir øllum umstøðum verður neyðugt at útvega fígging, so at kommunan kann veita neyðugu plássini og ansingina, alternativt veita endurgjald fyri vantandi barnaansing.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís øki í kommununi** | **Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini boða nevndini frá plásstørvi og harvið fíggjartørvi til høli og rakstur, evt. endurgjald fyri vantandi barnaansing sbrt forsorgarlógini, og at umsitingin arbeiðir við loysnum at leggja aftur fyri nevnd.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Dags dato er tørvur á 46 vøggustovuplássum og 17 barnagarðsplássum pr. 1. februar 2018.

Sum lýst omanfyri til fundin 29. november 2017 er arbeitt við at fáa til vega bráðfeingispláss og meira varandi loysnir.

Bráðfeingis ber til at skipa eina fyribils vøggustovu í gamla skúlanum á Hvítanesi. Har kunnu fáast til vega 10-12 pláss. Hetta er roynt áður, og ætlanin er, at leiðslan í Birkilund tekur sær av tilboðnum, ið er skjót at seta í verk. Staðbundna nevndin á Hvítanesi hevur givið samtykki til ætlanina treytað av, at ljósviðurskifti kring skúlan verða fingin í rættlag, at tað er væl frámerkt, hvar bilar til og frá skúlanum skulu parkera í bygdini, og at skelti verða sett upp í bygdini um, at ansa eftir børnum, ið spæla.

Harumframt verður stovnurin í Hornabø, sum byrjaði í august 2017, fyltur skjótari enn ætlað, so har verða 10-12 børn tikin inn.

<u>Realskúlin</u>
Umsitingin hevur arbeitt víðari við uppskotinum um at skipa part av gamla realskúlanum til dagstovn sum ein varandi miðbýarstovn, har hugsanin er, at hesin flytur og verður skipaður í skúlanum í Kongagøtu, tá Skúlin á Fløtum er liðugur í 2020. Seinastu árini hava ov fá pláss verið í miðbýnum. Staðsetingin er tískil góð í mun til afturvendandi tørvin á fleiri plássum í miðbýnum.

Við ávísum tillagingum kann realskúlin gerast dagstovnur við ml. 30-54 plássum alt eftir, hvussu stóran part av bygninginum, ið brúktur verður til endamálið, og hvussu samansetingin ml. vøggustovu- og barnagarðsbørn er.

Húsaumsitingin greiðir nærri frá neyðugu tillagingunum.

Víst verður í hesum sambandi eisini til mál 17/03883 Skúlin á Fløtum hølisviðurskifti (Realskúlin).

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at umrøða ætlanina við dagstovni í realskúlanum.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Málið umrøtt og nevndin tekur undir við, at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini at skipa Realskúlan til dagstovn.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtyktina frá undanfarna nevndarfundi. Víst verður somuleiðis til uppskot um fígging at gera realskúlan kláran til dagstovn, mál 17/03656.

Í løtuni verða neyvari kostnaðarmetingar gjørdar við støði í tilboðsprísum. Ætlandi flytur Heilsuhúsið út komandi vikurnar soleiðis, at partur av realskúlanum kann takast í nýtslu sum dagstovnur umleið hálvan februar. Restin av realskúlanum verður tikin í nýtslu, tá allur bygningurin er tøkur og so hvørt tillagingarnar eru gjørdar. Harumframt verða høli til Litir í leiki hjá Skúlanum á Fløtum.

Til tess at kunna seta tillagingararbeiðini í gongd, og til tess at kommunan kann bjóða foreldrum nýggju plássini út, er neyðugt at staðfesta endaliga, at dagstovnur skal skipast í realskúlanum.

Nærri yvirlit yvir, hvussu aktuelli plásstørvurin verður loystur, verður lagt fram á fundinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at samtykkja, at dagstovnur verður skipaður í realskúlanum, harumframt eisini høli til Litir í leiki hjá Skúlanum á Fløtum, og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 22. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tað er framvegis støðugt trýst á kommununa um at veita fleiri dagstovnapláss. Hóast fleiri tillagingar eru gjørdar og aðrar ávegis soleiðis, at fleiri pláss eru komin á dagstovnaøkinum, so er avbjóðingin ikki bast, um hugt verður fram til várið 2019.

Við nýútvegaðu plássunum í gamla realskúlanum kann væntast, at tey, ið d.d. eru á bíðilista, fáa bjóðað pláss til ynsktu tíð í august 2018, hetta tó treytað av, at allur bygningurin verður nýttur til dagstovnavirksemi.

Hetta loysir bráðfeingisavbjóðingina til august, men eingi pláss eru frá september. Vanliga mynstrið er, at ml. 60 og 90 børn leggjast aftrat tíðarskeiðið september-mai.

Vísandi til ætlanina, at Skúlin á Fløtum flytur úr brúna skúla í Fríðriks Petersensgøtu (sí mál 17/03883), er møguleiki at brúka bygningin til dagstovn frá sumrinum ella so skjótt til ber at hava bygningin kláran. Mett verður, at hetta er góður "buffari" at fylla upp so hvørt tørvur er á dagstovnaplássum tíðarskeiðið fram móti jólum alt eftir, hvussu nógv børn rúmast har.

Alneyðugt er tó eisini at taka avgerð um meira framtíðartryggjaðar loysnir, so henda bráðfeingisstøða, har nýggjar fyribilsloysnir er einasti handlimøguleiki, ikki gerst vanliga støðan.

Í fyrireikingararbeiðinum til talgildu plássupptøkuskipanina, sum fer at geva umsitingini munandi betri møguleika at staðfesta plásstørv mánaðir fram í tíðina, og í arbeiðinum at gagnnýta møguliga tøkan plásskapasitet á dagstovnaøkinum, hava barna- og ungdómsdeildin og húsaumsitingin pláss-skrásett allar stovnar og stovur. Hetta er gjørt eisini í mun til nýggju bygningskunngerðina, sum vísir á minsta mark fyri fermetrum til hvørt barn á dagstovni/stovu, og í mun til námsfrøðiligt viðmæli um bólkastødd av børnum í dagstovnaaldri.

Henda gjøgnumgongd vísir, at onkrir stovnar hava heldur stórt barnatal, meðan aðrir kunnu rúma fleiri børnum, verða ávísar tillagingar gjørdar. Henda støða, har onkrir stovnar skulu hava færri børn enn í dag, eigur at takast við, tá ið samlaði plásstørvurin verður viðgjørdur. Greitt verður nærri frá hesum á fundinum.

Niðanfyri verður víst á loysnir:

1. Til tess at basa bráðfeingistørvin, ið er, og sum aftur kemur á heysti 2018:
   - At allur gamli realskúlin verður nýttur til dagstovnavirksemi. Realskúlin hevur í løtuni 21 pláss. Tá allar tillagingarnar eru lidnar, rúmast bygningurin í mesta lagi 68 børnum, hetta veldst um samansetingina av vøggustovu- og barnagarðsbørnum.
   - At brúni skúli verður tillagaður og nýttur til dagstovnavirsemi frá heysti 2018. Í løtuni verður kannað, hvussu nógvum børnum, ið brúni skúli kann rúma, hvat krevst av tillagingum, og hvat tað verður mett at kosta, men roknast kann helst við trimum stovum. Eisini verður kannað, hvørt bygningurin er egnaður sum ein varandi loysn, ella um hetta er at meta sum ein fyribilsloysn.
   - At skúlin á Hvítanesi framhaldandi verður brúktur sum fyribils loysn. Loysnin er á Hvítanesi er væl umtókt og kann halda fram uttan stórvegis tiltøk.

2. Til tess at fáa til vega fleiri pláss við at tillaga innrætting á nøkrum stovnum:
   - At arbeitt verður víðari við uppskotunum um tillagingar í innrætting.
   - At avbjóðingin, ið ávísir stovnar hava við barnatalinum, verður umrødd og atlit tikið til tað yvir tíð, harundir ávís býlingshús og Kurla.

Sum omanfyri lýst eru allir verandi dagstovnar gjøgnumgingnir av barna- og ungdómsdeildini og húsaumsitingini til at meta um, á hvørjum stovni tað ber til at gera tillagingar í innrætting, so stovnurin kann rúma fleiri børnum. Burturúr hesum eru komin ymisk uppskot uppá tillagingar at økja plásskapasitetin. Fyrimunur við hesum er, at einstaka rakstrarstaðið fær betri rakstrargrundarlag, og at bygningarnir verða fullnýttir við nýggjum varandi plássum, heldur enn at økja um talið av bygningum/rakstrarstøðum.

Enn vantar at kostnaðarmeta uppskotini, sum aftur er grundarlag fyri eini raðfesting, har hetta loysir seg best. Greitt verður nærri frá hesum á fundinum.

3. Til tess at framtíðartryggja plásskapasitetin við út- og nýbygging, har tað eisini verða fingin til vega nýggj varandi pláss (íløgur):
   - At arbeiða víðari við uppskotum um at byggja út ávísar dagstovnar.
   - At arbeiða víðari við uppskoti um at byggja nýggjan og størri dagstovn á Argjum í staðin fyri verandi dagstovnin á Argjum.
   - At arbeiða víðari við uppskoti at tillaga Skúlan í Kongagøtu til varandi miðbýarstovn, tá bygningurin verður tøkur summarið 2020.

Nýggj varandi pláss er fortreyt fyri, at tað støðugt skal bera til at veita foreldrum plásstrygd. Harumframt er tað fortreyt fyri endurnýggjan av ótíðarhóskandi plássum, har antin bygningurin eigur at verða saneraður sum dagstovnur ella er ikki egnaður á annan hátt.

Uppskot fyriliggur uppá útbygging av dagstovninum á Hamrinum á Argjum. Treytað av, at nýtt lendi verður lagt aftrat verandi grundøki, kann fáast ein vøggustova og eina barnagarðsstova afturat. Kostnaðarmeting uttan lendiskeyp er nakað yvir kr. 10 mió. Til ber eisini at byggja dagstovnin í Maritugøtu út við einum vognrúmi, sum leysgevur annað høli á stovninum til 10 nýggj vøggustovupláss. Hetta uppskot er ikki kostnaðarmett enn. Metast má, at eisini aðrir stovnar við fyrimuni kunnu byggjast út, og eigur hetta at verða kannað ítøkiliga beinanvegin, íroknað kostnaðarmeting og raðfesting.

Mentamálanevndin hevur áður fingið lagt fram uppskot til nýggjan og væl størri dagstovn á Argjum (mál 17/03943) lutvíst til at endurnýggja ótíðarhóskandi stovnspláss/bygning og til at útvega uml. 40 pláss fleiri (samlaður plásskapasitetur sbrt. uppskotinum 112). Kostnaður uml. kr. 35 mió. Til ber ikki einki at gera, tí verandi stovnur krevur stórar og kostnaðarmiklar ábøtur.

Tá Skúlin á Fløtum er liðugur í 2020 og flutt verður úr skúlanum í Kongagøtu, er uppskot, at bygningurin verður gjørdur um til dagstovn at koma í staðin fyri realskúlan, sum ætlandi er fyribilsloysn. Mett verður, at bygningurin rúmar 100-120 børnum alt eftir samansetingini av vøggustovu- og barnagarðsbørnum. Fyrimunur er, at bygningurin rúmar øllum børnunum í realskúlanum umframt t.d. Kurlu ella brúna skúla, verða hesi niðurløgd. Bygningurin í Kongagøtu er nýggjur og í góðum standi, og mett verður ikki neyðugt við stórum tillagingum.

Fyrimunur við hesum uppskoti er, at kommunan sleppur undan íløgu í nýggjan dagstovn, ið ikki verður minni enn tær kr. 35 mió, sum nýggi dagstovnurin á Argjum verður mettur at kosta, og mett verður ikki sannlíkt, at kommunan byggir tveir stovnar við uml. 100 plássum í senn, hóast plásstørv.

<u>Fíggjartørvur:</u>
Til tess støðugt at fáa til vega nýggj pláss, tað verið seg við smærri tillagingum í innrætting, útbyggingum og nýbyggingum, er neyðugt at raðfesta fígging til endamálið bæði í rakstri og íløgum. Umsitingin kemur við neyvari greining av tørvi, so hvørt uppskotini verða kostnaðarmett og raðfest. Roknast kann við nýggjum fíggjartørvi í inniverandi ári.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at samtykkja:
- At allur realskúlin verður dagstovnur í minsta lagi fram til árskiftið 2020/21.

- At brúni skúli verður dagstovnur frá august 2018 í minsta lagi fram til ársskiftið 2020/21, og at umsitingin ger neyvari meting um kostnað at gera bygningin kláran til dagstovn at leggja aftur fyri nevndina.
- At skúlin á Hvítanesi framhaldandi verður brúktur sum fyribilsloysn.

Harumframt mæla trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini til at samtykkja:
- At umsitingin leggur fram neyvari raðfesting av tillagingarmøguleikum í innrætting á dagstovnum, har tað verður mett at hava fyrimun at økja plásskapasitetin.
- At heimild verður latin umsitingini at fáa til vega ítøkilig og kostnaðarmett uppskot til útbyggingar av verandi stovnum.
- At prinsipiell støða verður tikin til uppskotið, sum lagt er fram um bygging av nýggjum og størri dagstovni á Argjum, og at fáa fígging til vega í langtíðaríløguætlanini.
- At taka prinsipiella støðu til, at skúlabygningurin í Kongagøtu verður at brúka til varandi dagstovn eftir summarið 2020, og at umsitingin fær heimild at fyrireika ætlanina.

**Mentamálanevndin 23. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við teim fyrstu seks tilmælunum, og at fara undir eina tilgongd at avgera, hvat skúlabygningurin í Kongagøtu skal brúkast til.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Víst verður til tilmæli og samtyktir omanfyri.

Høvuðsavbjóðing júst nú er:
- At tað eru ov nógv børn inni á fleiri stovnum
- At nettotilflytingin av børnum undir skúlaaldur eftir øllum at døma hevur verið serliga stór í 2017
- At rættiliga stórur bíðilisti er eftir plássum longu frá august

Hetta lagt saman gevur ein tørv á plássum svarandi til ein miðal árgang í aldrinum 0-7 ár.

Raðfestast má í fyrsta lagi at útvega nýggj pláss, áðrenn til ber yvir tíð at lækka barnatalið á ávísum stovnum.

Staðfest er, at realskúlin verður ikki allur tikin í nýtslu fyrr enn 1. november 2018, tí arbeiðið verður ikki liðugt fyrr enn tá. Í løtuni eru 25 børn í realskúlanum, men væntast kann ikki, at hini uml. 40 plássini eru tøk fyrr enn í november. Ætlandi er realskúlin fyribils loysn tvey ár fram, tvs. hesi skulu endurútvegast í seinasta lagi um tvey ár. Brúni skúli kann, um arbeiðið fer í gongd nú í summar, væntandi verður klárur at taka í nýtslu í januar 2019. Har eru 64 varandi pláss.

Støðan ger, at arbeiðast mugu við fleiri loysnum í senn og tað beinanvegin.

Gjørd eru nú uppskot og fyribils kostnaðarmetingar uppá tillagingar í Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu, sum samlað geva

44 pláss (24 VG og 20 BG) fyri uml. kr. 2,5 mió handverkaraútreiðslur, tvs uttan mvg, byggiharraútreiðslur, innbúgv v.m.

At tillaga Brúna skúla við neyðugum útbyggingum av vognrúmi, vognskúri, svala (útgongdum frá stovum), innrættingum í stovnunum, liðugt gjørt útiøki v.m. er mett til kr. 6,3 mió – í hesum føri er allar byggiharraútreiðslur íroknaðar.

Hesar fýra verkætlanirnar geva sostatt 108 varandi pláss fyri uml. kr. 10 mió í íløgum, og kunnu allar verða lidnar komandi 6-7 mánaðirnar, verður arbeiðið byrjað nú.

Verður skúlin í Kongagøtu gjørdur um til dagstovn um 2-2,5 ár, so verða 100 pláss aftrat fyri ta upphædd, ið tillagingarnar kosta – í tí førinum mest smærri innrættingar.

Dagstovnurin á Argjum er størri íløguætlan, har tað í fyrsta umfari snýr seg um at framtíðartryggja verandi 70 plássini við at byggja nýggjan og størri stovn, har tað kunnu fáast uml. 33 pláss aftrat. Kostnaðarmetingin fyri uppskotið til bygning, ið lagt er fram í mentamálanevndini, er uml. kr. 35 mió, men hetta skal viðgerast neyvari. Tó eigur upphædd til neyvari verkætlanarfyrireikingar og prosjekting at verða fingin til vega skjótast og helst í inniverandi ári, so at møgulig bygging kann byrja næsta ár.

Øll hesi átøk, har plássini í skúlabygninginum í Kongagøtu og nýggja Dagstovninum á Argjum tó ikki kunnu roknast við fyrr enn í 2020/21, samstundis sum plássini í realskúlanum tá ætlandi detta burtur, geva í alt 176 pláss.

Trygd er ikki fyri, at hetta er nokk, men innanfyri komandi 6-8 mánaðirnar eru tó við uppskotunum omanfyri sannlíkindi fyri, at til ber at hava 148 nýggj pláss tøk (Velbastað 20 BG, Maritugøta 12 VG, Inni á Gøtu 12 VG, Brúni skúli 64, Realskúlin 40).

Kollafjørður:
Plásstrot er eisini á Dagstovninum Kura í Kollafirði. Barnatalið er hækkað nakað síðstu árini, og ábendingar eru um framhaldandi vøkstur í barnatalinum. Møguleikar at byggja Kuru út við eini vøggustovu og eini barnagarðsstovu eiga tí at kannast, umframt at frítíðarskúlin og ungdómstilboðið halda til í lutvíst leigaðum hølum, ið ikki longur eru hóskandi. Kommunan kundi sum fyribils loysn tikið upp samband við samkomuna Zion, ið er beint við, við tí endamáli at leiga og innrætta kjallaran til dagstovn, og annars hava felags garð við Kuru. Hesi pláss kunnu sostatt útvegast yvir rakstur.

Onnur atlit:
Tá so stórt fokus er á bráðfeingis tørvin, so eigur at verða mint á onnur atlit, ið eisini hava við sær øktan plásstørv og harvið fígging. Dagstovnurin í Kaldbak er eisini við at vera ov lítil. Dagstovnurin í Løkjatúni hevur ikki nøktandi umstøður til vognar, kjallarahæddin í Býlingshúsinum í Norðasta horni skal umvælast og kundi hýst nýggjari barnagarðsstovu, Býlingshúsið á Ternuryggi manglar vognrúm, og Stella Maris hevur tørv á tillagingum, tí bygningurin er gamal.

Onnur vaksandi avbjóðing eru børn við “serligum serligum” tørvi. Hetta eru børn, sum ikki kunnu vera í vanligu stovunum á dagstovnaøkinum vegna heilsuvanda eitt nú í mun til smittu, ella hava umfevnandi menningaravbjóðingar. Her kunnu smærri rúm á ávísum stovnum setast av til hetta, men sum kann ávirka vanliga plásskapasitetin.

Til slík atlit eigur ein føst upphædd, t.d. kr. 1 mió, at verða sett av árliga á kontu 3214 broytingar og minni umvælingar.

Fígging:
Arbeiðið við realskúlanum er fíggjað, men tað eru hinar ætlanirnar ikki.

Størsta arbeiðið í mun til loysnirnar her og nú er Brúni skúli. Her er møguligt at flyta kr. 6 mió av íløgujáttanini, sum ætlað er til musikkskúlabyggingina í ár, tí roknað verður har við minninýtslu í ár. Hetta hevur sostatt ikki avleiðing fyri musikkskúlabyggingina, men krevur tó, at upphæddin verður játtað aftur til musikkskúlabyggingina í 2019.

Verkætlanirnar á Velbastað, Maritugøtu og Inni á Gøtu hava onga fígging. Her mugu útvegast ml. kr. 3-3,5 mió til endamálið.

Eingin játtan er sett av til verkætlanarfyrireikingar og prosjektering av nýggjum Dagstovni á Argjum. Mett verður, at neyðugt er við kr. 3,5 mió til endamálið til tess at menna prosjektið fram til útboð (mál 17/03943).

Spurningurin um framtíðina hjá skúlabygninginum í Kongagøtu má takast skjótast.

Verður hann ikki dagstovnur, má annar stovnur í miðbýnum byggjast og arbeiðið at fyrireika prosjekt tí byrja beinanvegin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at játta kr. 6 mió til at út- og umbyggja Brúna skúla til dagstovn, íroknað at gera útiøkið liðugt, og at heimila umsitingini at bjóða arbeiðið út og gera neyðugar sáttmálar. Mælt verður til, at arbeiðið verður fíggjað við at flyta kr. 6 mió av løgukontu 5175 Musikkskúlin løgukarmur L0001 til løgukontu 3175 barnaansing, sum verður at játtað musikkskúlaverkætlanini aftur í fíggjarætlanini 2019.

Harumframt mæla trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini til at taka undir við uppskotunum um tillagingar av Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu, og í hesum sambandi at játta kr. 3,5 mió til endamálið við at umraðfesta í íløguætlanina fyri 2018, og heimila umsitingini at bjóða arbeiðini út og gera neyðugar sáttmálar.

Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla somuleiðis til at játta kr. 3,5 mió til prosjektfyrireikingar v.m. av nýggjum Dagstovni á Argjum við umraðfestingum í íløguætlanini fyri 2018, og í hesum sambandi at seta bygginevnd samsvarandi reglugerð um íløguverkætlanir størri enn kr. 20 mió.

Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla eisini til at geva umsitingini heimild at samráðast við samkomuna Zion í Kollafirði um møguleikan at leiga og innrætta kjallarahæddina í bygningin teirra til dagstovnavirksemi at leggja aftur fyri nevndina.

At enda mæla trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini til endaliga støðutakan um skúlabygningurin í Kongagøtu verður at brúka til dagstovn eftir 2020, og um ikki, so at játta fígging kr. 1 mió til at seta í gongd prosjektfyrireikingar v.m. til bygging av nýggjum dagstovni í miðbýnum, og í hesum sambandi at at seta bygginevnd samsvarandi reglugerð um íløguverkætlanir størri enn kr. 20 mió.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018**: Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Jákup Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum um at gera brúna skúla um til dagstovn og játta kr. 6

mió av løgukontu 5175 Musikkskúlin løgukarmur L00001 til løgukontu 3175 barnaansing, og í hesum sambandi heimila umsitingini at bjóða arbeiðið út og gera neyðugar sáttmálar. Málið beinast í býráðið um fíggjarnevndina.

Harumframt samtykt at geva umsitingini heimild at samráðast við samkomuna Zion í Kollafirði um møguleikan at leiga og innrætta kjallarahæddina í bygningi teirra til dagstovnavirksemi at leggja aftur fyri nevndina.

Vent verður aftur til hini tilmælini á seinni fundi.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, stemma blankt og krevja málið fyri býráðið.

**Ískoyti:**
Víst verður til uppskotini til síðsta mentamálanevndarfund um tillagingar av Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu til tess fáa 44 nýggj dagstovnapláss at nøkta part av bráðfeingis plásstørvinum, og sum mett verður kosta kr. 3,5 mió at fáa til vega. Til henda fund var tó ikki møguligt at ávísa fígging.

Mett verður, at til ber at flyta kr. 3,5 mió av løgukarmi 2775 eldrarøkt L00001 ætlað umlættingar- og rehabiliteringsdepli, tí roknað verður við, at henda verkætlanin hevur ikki tørv á allari játtanini í ár. Hetta hevur sostatt ikki nakra avleiðing fyri verkætlanina í ár, men krevur tó, at umlættingar- og rehabiliteringsdepilin (L27011) hesa játtan aftur sum part av samlaðu íløgujáttanini fyri 2019.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at gera ávísar tillagingar av Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu, og í hesum sambandi at játta kr. 3,5 mió til endamálið og heimila umsitingini at bjóða arbeiðini út og gera neyðugar sáttmálar.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Tikið av skrá vísandi til, at nevndarlimir hava kravt málið fyri býráðið.

**Ískoyti:**
Víst verður til síðsta ískoytið og tilmælið omanfyri um at játta kr. 3,5 mió til at gera tillagingar av Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu. Sambært nýggjum kostnaðarmetingum verður játtanartørvurin helst um kr. 5,5 mió.

Mett verður, at fyri tær kr. 3,5 mió ber í øllum førum til at fremja tvær av ætlanunum, men til ber ikki at staðfesta endaliga kostnaðin fyri allar ætlanirnar fyrr enn tilboðskostnaðurin fyriliggur eftir útboð. Mett verður tí skilabest, at umsitingin við støði í innkomnu tilboðunum raðfestir ætlanirnar, ið kunnu figgjast innanfyri kr. 3,5 mió, og at møgulig fígging til triðju ætlanina verður reist antin sum eykajáttanarmál í 2018 ella sum partur av fíggjarætlanini fyri 2019.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at gera ávísar tillagingar av Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu, og í hesum sambandi at játta kr. 3,5 mió til endamálið og heimila umsitingini at bjóða arbeiðini út og gera neyðugar sáttmálar.

Trivnaðarstjórin, heilsu- og umsorganarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at játta kr. 3,5 mió av løgukarmi 2775 eldrarøkt L00001 til løgukontu 3175 barnaansing til endamálið.

**Mentamálanevndin 18. juni 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, tekur undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen, mælir til ikki at gera realskúlan til dagstovn, men at lata Skúlan á Fløtum bygningin til skúla og ístaðin útvega nýggj dagstovnapláss eftir sama leisti sum Spíranum í Havnardali.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018**: Ein meiriluti Annika Olsen, Turið Horn og Gunvør Balle tekur undir við samtyktini í Mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein mælir til at gera tillagingar av Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu. Umframt verður víst á tað, ið minnilutin í Mentamálanevndini vísir á.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Helenu Dam á Neystabø, Hallu Samuelsen, Tróndur Sigurðsson, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus og Annfinn Brekkstein:

Mælt verður til ikki at gera realskúlan til dagstovn, men at lata Skúlan á Fløtum bygningin til skúla og ístaðin útvega nýggj dagstovnapláss eftir sama leisti sum Spíranum í Havnardali.

Uppskotið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Ruth Vang.

Síðani varð atkvøtt um samtyktina hjá meirilutanum í mentamálanevndini tann 6. juni 2018 og samtyktina hjá meirilutanum í fíggjarnevndini tann 20. juni 2018, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Ruth Vang, Helena Dam á Neystabø , Annfinn Brekkstein og Bjørghild Djurhuus

Blankt atkvøddu: Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson og Halla Samuelsen.

## 149/18 Bygginevndin fyri Hoyvíkar kirkju- kirkjugarður í Hoyvík (2007-2036)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
| --- | --- | --- | --- |
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 54/14 | 14/00772-13 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.01.2015 | 2/15 | 14/00772-13 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2015 | 14/15 | 14/00772-13 |
| 4 Býráðsfundur | 26.02.2015 | 37/15 | 14/00772-13 |
| 5 Tekniska nevnd | 04.03.2015 | 32/15 | 14/00772-13 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.11.2015 | 243/15 | 14/00772-13 |
| 7 Fíggjarnevndin | 02.12.2015 | 312/15 | 14/00772-13 |
| 8 Býráðsfundur | 10.12.2015 | 245/15 | 14/00772-13 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2016 | 74/16 | 14/00772-13 |
| 10 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 105/16 | 14/00772-13 |
| 11 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 75/16 | 14/00772-13 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2016 | 105/16 | 14/00772-13 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.04.2016 | 126/16 | 14/00772-13 |
| 14 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 175/16 | 14/00772-13 |
| 15 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 144/16 | 14/00772-13 |
| 16 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2016 | 171/16 | 14/00772-13 |
| 17 Byggi- og býarskipanarnevndin | 14.06.2016 | 178/16 | 14/00772-13 |
| 18 Fíggjarnevndin | 16.06.2016 | 240/16 | 14/00772-13 |
| 19 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 187/16 | 14/00772-13 |
| 20 Býráðsfundur | 26.07.2016 | 193/16 | 14/00772-13 |
| 21 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.02.2017 | 32/17 | 14/00772-13 |
| 22 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 36/17 | 14/00772-13 |
| 23 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 85/17 | 14/00772-13 |
| 24 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 114/17 | 14/00772-13 |
| 25 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 182/17 | 14/00772-13 |
| 26 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.05.2018 | 119/18 | 14/00772-13 |
| 27 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 147/18 | 14/00772-13 |
| 28 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 119/18 | 14/00772-13 |
| 29 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 149/18 | 14/00772-13 |

**Lýsing av málinum:**

Í sambandi við fyrispurningar um nýggjan kirkjugarð í Hóyvík, hevur umsitingin gjørt uppskot til staðseting fyrr ávíst 5 ymiskar staðsetingarmøguleikar (j. nr. 2007-2037/4). Arbeitt hevur verið víðari við at kannað um eisini aðrir staðsetingarmøguleikar eru, og verður hervið víst á eitt økið afturat. Økið sum talan er um, liggur oman fyri sambindingarvegin millum Inni á Gøtu og framtíðar innkomuvegin til Tórshavn, sum framhald av Dalinum Langa.

**Byggisamtyktin:**

Verandi serstaka byggisamtykt fyri hetta økið varð gjørd í sambandi við býarpartin Stórutjørn. Stórur partur av økinum er D2 og har, sum hetta endar eystureftir, stingur ein kíli av 4. grundumráði, hagi, seg inn millum D2 og A3 bústaðarøkið Inni á Gøtu.

**Økiseyðkenni:**

Norður-suðurgangandi dalskap við norðurendan av Dalinum Langa. Dalurin ella lægdin liggur nakað burtur frá Sambindingarvegnum (Klingran) og eru góðir møguleikar at staðseta bygningar og parkeringsøki skamt frá vegnum. Í lívd av eysturhallandi skráa liggur vesturhallandi slætti við stórbærum útsýni norðureftir móti Sundalagnum og tí vakra Skálafirði.

**Nærøkini:**
Økið liggur vart og er ikki áloypandi í lendinum, millum 5 og 20 metur hægri enn bústaðarøkið Inni á Gøtu, og partvís afturundir lítla heygnum millum bæði økini.

**Víðkanarmøguleikar:**
Samlað økisvídd er 25.000 m², og góður møguleiki er at byrja við 3.500 - 5000 m² í lægdini undir brekkuni, fyri síðan at víðka norðureftir.

**Atkomuviðurskifti:**
Tætt við sambindingarveg, ið kann leiða nógva bilferðslu. Siðvenjan at ganga í gravarfylgi er komin til eitt vegamót, men eru her møguleikar, tí í beinari linju eru 950 m til kirkju og samkomuhús ígjøgnum fríøkið Dalurin Langi. Til sammetingar er beina leiðin millum Dómkirkjuna og kirkjugarðin við Velbastaðvegin 1250 m.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Ongin fígging er avsett til nýggjan kirkjugarð í Hoyvík. Útvegan av kirkjugarði í Hoyvík er ikki átrokandi, við tað at verandi kirkjugarður í Tórshavn hava nøktandi pláss enn.

**Niðurstøða.**
1. Kirkjugarður á hesum stað vil ikki ávirka verandi býarbygging.
2. Tað er av týdningi at kirkjugarðurin kann víðkast.
3. Kirkjugarðurin kann vera partur av frílendisætlan fyri býarbygging í Hoyvíkshaganum.
4. Siðvenja er at leggja kirkjugarðar uttanfyri býir og bygd øki, fyri síðan at býurin nærkast og at enda fevnir um økið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til staðsetingarmøguleikar út frá fyriliggjandi uppskotum, og um arbeiðast skal víðari við málinum, og um so er, at játtað pening til fyrireikingar, herundir kanningar og projektering av skitsuuppskotinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. februar 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við staðsetingini, sambært kortskjali dagfest 03.02.2010.

Formaðurin hevur ynskt málið á skrá til ummælis

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. juni 2012:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Um arbeiðast skal víðari við málinum, kann víðari gongdin í málinum verða:
1. Keyp av lendi
   Keyp av lendi 25.000 m$^2$ av matr. 135ed Hoyvíkshagi 3,5 mill.
2. Gerð av forprojekti
   Gera forprojekt til myndugleikaviðgerð
3. Borgarakunning
   Hava kunningarfund fyri borgarunum í Hoyvík
4. Myndugleikagóðkenning, friðingarnevndir, Føroya Stift

Náttúru- og yvirfriðingarnevndarloyvi og loyvi frá Føroya Stift, kunngerð um kirkjugarðar.

**5.** Projektering/útbjóðingartilfar og útbjóðing
At bjóða út til tvey projekterandi feløg at projektera, gera útbjóðingartilfar, bjóða út og hava lisitatión

6. Tíðarætlan
Tíðarætlan keyp av lendi medio 2015, loyvir ultimo 2015, projektering og útbjóðing medio 2016 arbeiði kann byrja aftaná summarfrítíðina 2016.

Peningur er tøkur á karminum 6575 fyri 2014, men onki er játtað, til víðari arbeiði við málinum. Eingin fíggjarkarmur er avsettur á íløgum 2015.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir nevndini til at taka støðu til, um verkætlanin skal setast í verk eftir leistinum sum skotin er upp, og um neyðugur fíggjarkarmur skal játtast til verkætlanina komandi ár, fyri 2016.
Verður avgjørt at arbeiða víðari við málinum, skal málið til teknisku nevnd til viðgerðar og fíggjarnevndina til samtyktar at leggja fyri býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Kunnað varð um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. januar 2015:** Útsett til komandi fund, tá tað verður lýst og framlagt í sambandi við staðsetingina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2015:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Halla Samuelsen, samtykti at taka undir við staðsetingini, sambært kortskjali dagfest 03.02.2010.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur støðu á seinni fundi.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundir 26. februar 2015:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Jógvan Arge.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

**Tekniska nevnd 04. mars 2015**: Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt kravfestingar til málið um kirkjugarðin í Hoyvík, sí hjálagda skjal. Fyrsta byggistig fevnir um gerð av lendi til 320 gravir, at skipa atkomuveg og parkeringspláss til 72 bilar, at byggja lítið arbeiðshús til amboð og uppihald. Umframt at garðurin skal girðast inni.

Kravfestingarnar siga, hvussu nýggi kirkjugarðurin ynskist skipaður. Kravfestingarnar eru grundskjal undir uppskoti til skipan, projektering, myndugleikagóðkenning/Føroya Stift, friðingarviðgerð, og til løgdeildina at fyriskipa og fremja keyp av lendi frá Búnaðarstovuni. Ætlan er at bjóða projekteringina út í innboðnari lisitasjón. Tilboðini verða løgd fyri nevnd aftur, tá tey eru innkomin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við kravfestingarskjølunum, at bjóða projekteringina út, og at beina málið til løgdeildina at keypa lendi.
Mælt verður eisini til at játta kr. 500.000,- av karminum á konto 6275 Kirkjugarðar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. november 2015: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Fíggjarnevndin 02. december 2015: Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið.**

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 10. desember 2015**: Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kirkjugarðurin í Hoyvík hevur verið úti í kapping, har tvær ráðgevarafyritøkur vórðu bidnar um at koma við einum skipanaruppskotið til nýggjan kirkjugarð í Hoyvík, umframt tilboði upp á ráðgevarakostnað fyri 1. byggistig. Skipanaruppskotið varð vektað við 25% og ráðgevarakostnaðurin varð vektaður við 75%.

Fríggjadagin 26. februar 2016 komu undirhondsboðini frá tveimum ráðgevarafyritøkum inn.

Kostnaðarstøðið fyri ráðgevingina av 1. byggistigi var høgt og var eisini stórur munur millum tey tvey tilboðini, sum vórðu latin inn. Harumframt vóru kostnaðarmetingarnar fyri bygging av byggistigunum eisini høgar, og sostatt metti dómsnevndin, mannað av umsitingini, at vegna høga kostnaðarstøði, er ikki ynski at taka av nøkrum av tilboðunum, men heldur lata Býarskipan arbeiða víðari við verkætlanini, at gera skipanaruppskot, projekt og føra verkætlanina fram til útbjóðingar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at samsýna bjóðarunum kr. 25.000 í part fyri luttøkuna, og at býarskipan arbeiðir víðari, at gera skipanaruppskot, projekt og føra verkætlanina fram til útbjóðingar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Fíggjarnevndin 09. mars 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 200.000 sum eykajáttan av konto 5370 á konto 4118 og at beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 17. mars 2016: Einmælt samtykt.**

**Ískoyti:**
Arbeitt verður við skipan av kirkjugarðinum. Býararkitekturin kemur at greiða frá tilgongdini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2016: Kunnað varð um málið.**

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt uppskot til Kirkjugarðin í Hoyvík, sí viðheftu skjøl (14/00772-38, 1,2,3,4)

Í fyrsta byggistigi er pláss fyri umleið 380 gravum. Afturat tí er pláss fyri barnagravum, urnugravum og felagsøki við plássi til starvsfólk. 1. stig fevnir eisini um arbeiðsveg frá Klingruni inn á arbeiðsøkið, umframt útgrevstur til parkeringspláss. Umsitingin metir, at atkomuvegur og parkeringspláss eiga at vera ein sjálvstøðug teknisk verkætlan.

Skotið verður upp í fyrsta lagi at bjóða 1. byggistig út í undirhondsboð. Í útbjóðingini verða hesi arbeiði gjørd:

*Flytan og niðurtøka av verandi stiki/hegni*
*Arbeiðsvegur inn á kirkjugarðsøkið frá Klingruni*
*Avgrevstur og burturbeining av tilfari av 1. byggistigi*
*Avvatning*
*Møgulig spreinging*

Tá øll neyðug loyvi frá myndugleikum, keyp av lendi og broyting av byggisamtykt er fingin til vega, verður útbjóðingartilfarið sent út til 2 arbeiðstakarar. Arbeiðstakararnir, ið eftir ætlan sleppa at bjóða, vera:
P/F Hansen & Jakobsen
Sp/f Hellisdal
Byrjað verður eftir ætlan 1. juni, og hetta arbeiðið er mett at taka 5 mánaðir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekurin mæla til at bjóða 1. byggistig út í undirhondsboð eftir omanfyri standandi lýsing.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. apríl 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Ískoyti.**
Løgdeildin hevur kannað møguleikarnar fyri at keypa lendið frá Búnaðarstovuni.
Festarin er hoyrdur og eru allir formalitetir í samband við avlýsing av tinglýstum, leigusáttmála og deklaratión á ognini eisini avgreiddir.

Búnaðarstovan hevur sent kommununi eina fyribils tilsøgn, keypsprísur 2.311.500,00.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at keypa lendið fyri 2,4 mill. kr. sum verður fíggjað av íløgukarminum 2016 á 6575 kirkjugarðar.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.**

**Býráðsfundur 19. mai 2016: Einmælt samtykt.**

**Ískoyti:**

Frank Hellisdal og Sp/f ZRJ geva tilboð uppá 1. byggistig tann 6. juni 2016. Umsitingin viðger innkomnu tilboðini og ger tilmæli til fundin. Tilboðini verða løgd í málið og kunnu síggjast á nevndarportalinum frá 7. juni 2016.

**Tilmæli:**
Tilmæli kemur til fundin.

**Ískoyti:**
Sp/f Maskingrevstur v/Frank Hellisdal og Sp/f Z.R.J hava givið tilboð uppá 1. byggistig tann 6. juni 2016. Umsitingin hevur viðgjørt innkomnu tilboðini. Tilboðini eru løgd í málið og kunnu síggjast á nevndarportalinum frá 7. juni 2016.

2 tilboð eru innkomin. Tey eru áljóðandi:

| | |
|---|---|
| Sp/f Maskingrevstur v/Frank Hellisdal | 5.159.000,00 kr. uttan mvg |
| Sp/f Z.R.J | 2.683.043,00 kr. uttan mvg |

Sp/f Z.R.J. hevur gjørt vart við eina roknivillu í tilboði teirra. Endaliga tilboðið er 4.340.543 kr. uttan mvg., og hetta stendur Sp/f Z.R.J. við. Umsitingin hevur síðani gjørt eina samlaða kostnaðarmeting at gera 1. byggistig. Samlaði kostnaðurin er 5,4 milliónir.

Játtaðar eru kr. 500.000 til projektering. Av hesum eru kr. 405.000 eftir.
Á karminum til kirkjugarðar eru kr. 1.795.000. Neyðugt er sostatt við fígging 3,2 mió. afturat

Støða skal takast til, um takast skal av tí lægsta tilboðnum frá Sp/f Z.R.J. og hvussu restupphæddin á 3,2 mió. skal fíggjast.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2016: Útsett.**

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur kannað málið. Umsitingin hevur sett seg í samband við sp/f Maskingrevstur v/Frank Hellisdal, har kunnað hevur verið um málið, at lægri tilboðsveitari, Sp/f Z.R.J., hevur gjørt eina roknivillu og at endaligi tilboðsprísurin hjá Z.R.J. er 4.340.543 kr. uttan mvg. Umsitingin hevur heitt á sp/f Maskingrevstur v/Frank Hellisdal at koma við einum nýggjum tilboði, grundað á sama útbjóðingartilfar.
Sp/f Maskingrevstur v/Frank Hellisdal boða frá, at teir standa við sítt tilboð, áljóðandi 5.159.000,00 kr. uttan mvg, og at um tilboðið skal broytast ella regulerast, er neyðugt at útbjóðingargrundarlagið eisini verður broytt.

Endaliga tilboðið hjá sp/f Z.R.J. er 4.340.543 kr. uttan mvg. Hetta stendur sp/f Z.R.J. við.

Umsitingin hevur síðani gjørt eina samlaða kostnaðarmeting at gera 1. byggistig. Samlaði kostnaðurin er 5,4 milliónir.

Játtaðar eru kr. 500.000 til projektering. Av hesum eru kr. 405.000 eftir.
Á karminum til kirkjugarðar eru kr. 1.795.000. Neyðugt er sostatt við fígging á 3,2 mió. afturat.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekurin mæla til at taka av lægsta tilboðnum hjá sp/f Z.R.J. áljóðandi 4.340.543 kr. uttan mvg.

Eisini verður mælt til at fíggja restupphæddina á 3,2 mió. av íløgukarminum á 6275, Fríðkan av kommununi, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum. Samstundis verður heitt á umsitingina um at hava greiðar reglur, tá roknifeilir, sum ávirka prísin, verða staðfestir í tilboðum.**

**Fíggjarnevndin 16. juni 2016: Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.**

Annnfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 16. juni 2016: Einmælt samtykt.**

**Býráðsfundur 26. juli 2016: Einmælt samtykt**

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting fyri at gera kirkjugarðin í Hoyvík lidnan. Samlaði kostnaður er: kr. 13.659.359,00. Fyrsta byggistig á Kirkjugarðin í Hoyvík verður liðugt síðst í mars 2017. Skipan av økinum, avgrevstur og burturbeiningin av tilfari hevur gingið sera væl. Sprongt og brekkað er á økinum til tess at avvatna alt kirkjugarðsøkið. Atkomuvegur frá Klingruni gjøgnum kirkjugarðin er skipaður og grovplaneraður. Somuleiðis er parkeringsøkið grovplanerað.

Næsta byggistig er liður í eini størri ætlan at fáa gjørt kirkjugarðin lidnan. Her er talan um í fyrsta lagi at drena kirkjugarðin, og at breiða mold út í turru árstíðini. Turra árstíðin er frá mai - august 2017. Hetta arbeiðið má byrja skjótast gjørligt, um tað skal gerast í 2017. Samstarvið við verandi arbeiðstakara á Kirkjugarðin í Hoyvík, Z.R.J., hevur gingið sera væl. Møguleiki er at gera ein ískoytisavtalu við Z.R.J, av tí at teir longu eru á staðnum. Hetta verður mett at vera bíligari og skjótari enn at bjóða út av nýggjum. Somuleiðis skal havast í huga, at moldin skal liggja í umleið 1 ár at seta seg. Umsitingin hevur biðið um tilboð frá Z.R.J. at gera næsta byggistig.

Tilboðið frá Z.R.J á hetta arbeiðið er: kr. 4.252.485,00 uttan mvg.

Samlaði kostnaður á hetta arbeiðið er, sí Kostnaðarætlan C: kr. 4.786.703,00.

2 mió. kr. eru settar av íløgu karminum 2017 til Kirkjugarðar. Írestandi upphædd, sum neyðug er at játta í 2017: 2.8 mió. kr.

Av tí at arbeiðið við kirkjugarðinum ikki má steðga upp, so verður neyðugt í fyrstu atløgu at fíggja arbeiðið av øðrum verkætlanum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekurin mæla til at taka av tilboðnum frá Z.R.J. og játta írestandi upphædd á 2.8 mió. kr. av kontantútgjaldinum í sambandi við eldsbrunan í AA-húsinum áljóðandi 1.63 mió. kr., umframt flyta 1.17 mió. kr. av játtanini til vegagerðina á Traðabrekku/Hoyvíksvegur, sí j.nr. 15/04352, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. februar 2017: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt at játtað tilsaman 4,8 mió. kr. til kirkjugarðin í Hoyvík soleiðis: 2 mió. kr. av íløgukarminum 6575. Írestandi upphædd játtað av Traðarbrekka/Hoyvíksvegur 1,44 mió. kr. og av AA-húsið 1,36 mió. kr. og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. mars 2017: Einmælt samtykt.**

**Ískoyti:**
Arbeiðið á byggistig II í Kirkjugarðinum í Hoyvík er liðugt. Nú vantar liðuggerð av Kirkjugarðinum í Hoyvík: Her er talan um parkeringsøki og atkomuveg, kantsteinar, asfaltering, uppstriking, gøtur, gøtuljós, garður, portur, rørføringar, skúr til gravara, vollar, o.a. Mett er, at hetta arbeiðið tekur 1 ár at gera.
Mold er løgd út nú í Kirkjugarðinum í Hoyvík, og moldin tekur 1 ár at seta seg, áðrenn møguleiki er at jarða lík í kirkjugarðinum í Hoyvík.

Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting á hetta arbeiðið áljóðandi 6,7 mió. við mvg. Meiri peningur er ikki settur av íløgu karminum 2017 til 6575 Kirkjugarðar. Møguleiki er at játta samlaða kostnaðin á kr. 6.7 mió. av íløgukarminum 2018 fyri 6575 Kirkjugarðar.

Støða má takast til, hvussu útbjóðingarleisturin verður: Samstarvið við KONSAX hevur gingið sera væl. Skúrbýur og byggipláss er tilriggað, og teir kenna verkætlanina. Møguleiki er at gera ískoytisavtalu við KONSAX, av tí at teir longu eru á staðnum. Hetta verður mett at vera bíligari og skjótari enn at bjóða út av nýggjum. Hin møguleikin er at bjóða arbeiðið út til 2-3 arbeiðstakarar. Hetta krevur, at 150.000 kr. skulu setast av afturat til ráðgevakostnað at standa fyri at prosjektera verkætlanina liðugt og gera útbjóðingartilfar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekurin mæla til, at nevndin tekur støðu um útbjóðingarleist, hvørt liðuggerð av kirkjugarðinum í Hoyvík skal bjóðast út, ella biðið verður um tilboð frá verandi arbeiðstakara, KONSAX, at gera arbeiðið liðugt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017: Málið umrøtt.**

**Ískoyti:**
Arbeiðið á byggistig II í Kirkjugarðinum í Hoyvík er liðugt. Nú vantar liðuggerð av Kirkjugarðinum í Hoyvík. Her er talan um parkeringsøki og atkomuveg, kantsteinar, asfaltering, uppstriking, gøtur, gøtuljós, garður, portur, kloakk og rørføringar, skúr til gravara, vollar o.a. Mett er, at hetta arbeiðið tekur 8-12 mánaðir at gera.

Moldin tekur 1 ár at seta seg, og moldin **hevur sett seg dd. í kirkjugarðinum í Hoyvík.** Talan verður um á leið 350 gravir í sum standa klárar at jarða lík í í dag.
Um vit samanlíkna við Kirkjugarðin við Velbastaðvegin, verða uml. 230 gravir í fyrsta lagi at klárar at jarða lík í komandi ár, av tí at moldin ikki hevur sett seg.

Møguleiki er at gera ískoytisavtalu við verandi arbeiðstakara, KONSAX. Samstarvið við KONSAX hevur gingið sera væl. Skúrbýur og byggipláss er tilriggað, og teir kenna verkætlanina. Arbeiðstakari kann byrja arbeiðið innan stutta freist. Í summar, um tað skal verða.
Loysnin verður mett at verða bíligari og skjótari enn at bjóða út av nýggjum. Vit spara eisini tíð og pengar í prosjektering. Konsax játtar at gera arbeiðið við somu kendu eindarprísum,

sum við fyrru útbjóðing Í Hoyvík og við Velbastaðvegin. Verkætlanin er ment eftir kravfestingum og skitsuuppskoti frá Býarskipanardeildini, og býargartnarin stendur inni fyri loysnum og linjunum í verkætlanini sum heild.

Umsitingin hevur biðið verandi arbeiðstakara, KONSAX, um tilboð at gera kirkjugarðin lidnan. Tilboðið er áljóðandi 6.885.296,00 mió. uttan mvg. Hesin peningur er enn ikki settur av á íløgukarminum 2018 til 6575 Kirkjugarðar.

Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting til liðuggerð av Kirkjugarðinum í Hoyvík. Samlaði kostnaðurin fyri at gera kirkjugarðin lidnan er: 8,5 mió. við øllum.

Møguleiki er at fíggja 8,5 mió. til verkætlanina Kirkjugarðurin í Hoyvík av konto 4176 hjá verkætlanini, Skúlin á Fløtum L41012, sum hevur pening tøkan í 2018, og síðani játta og flyta somu upphædd á 8,5 mió. aftur til skúlan á Fløtum av íløgukarminum 2019.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekurin mæla til at taka av tilboðnum frá KONSAX, gera eina ískoytissáttmála við KONSAX og játta upphædd á 8,5 mió. av konto 4176, íløgukarminum hjá verkætlanini, Skúlin á Fløtum L41012, og síðani játta og flyta somu upphædd á 8,5 mió. aftur á konto 4176 til skúlan á Fløtum av íløgukarminum 2019, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mai 2018: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018: Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipaninarnevndini og beina málið í býráðið.**

**Býráðsfundur 24. mai 2018: Einmælt samtykt.**

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

## 150/18 Ferðslukanningar kring økið við skúladepilin í Marknagili

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.06.2014 | 200/14 | 14/03118-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.06.2014 | 191/14 | 14/03118-2 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 143/14 | 14/03118-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 08.10.2014 | 255/14 | 14/03118-2 |
| 5 Ferðslunevndin | 18.12.2014 | 87/14 | 14/03118-2 |
| 6 Ferðslunevndin | 26.02.2015 | 27/15 | 14/03118-2 |
| 7 Ferðslunevndin | 10.03.2015 | 36/15 | 14/03118-2 |
| 8 Tekniska nevnd | 08.04.2015 | 44/15 | 14/03118-2 |
| 9 Fíggjarnevndin | 22.04.2015 | 103/15 | 14/03118-2 |
| 10 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 79/15 | 14/03118-2 |
| 11 Tekniska nevnd | 07.10.2015 | 89/15 | 14/03118-2 |
| 12 Tekniska nevnd | 04.11.2015 | 138/15 | 14/03118-2 |
| 13 Fíggjarnevndin | 11.11.2015 | 278/15 | 14/03118-2 |
| 14 Býráðsfundur | 19.11.2015 | 218/15 | 14/03118-2 |
| 15 Tekniska nevnd | 06.04.2016 | 44/16 | 14/03118-2 |
| 16 Tekniska nevnd | 01.06.2016 | 63/16 | 14/03118-2 |
| 17 Tekniska nevnd | 18.04.2017 | 29/17 | 14/03118-2 |
| 18 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 87/17 | 14/03118-2 |
| 19 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 125/17 | 14/03118-2 |
| 20 Tekniska nevnd | 09.05.2017 | 31/17 | 14/03118-2 |
| 21 Fíggjarnevndin | 20.06.2017 | 163/17 | 14/03118-2 |
| 22 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 186/17 | 14/03118-2 |
| 23 Tekniska nevnd | 07.11.2017 | 66/17 | 14/03118-2 |
| 24 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 266/17 | 14/03118-2 |
| 25 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 276/17 | 14/03118-2 |
| 26 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 300/17 | 14/03118-2 |
| 27 Tekniska nevnd | 06.03.2018 | 17/18 | 14/03118-2 |
| 28 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 112/18 | 14/03118-2 |
| 29 Tekniska nevnd | 08.05.2018 | 34/18 | 14/03118-2 |
| 30 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 187/18 | 14/03118-2 |
| 31 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 150/18 | 14/03118-2 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við ætlaðu byggingina kring skúladepilin í Marknagili verður roknað við nógvari øktari ferðslu. Væntast kann eisini, at útstykkingarbyggingar oman fyri Marknagilsvegin fara at gera sítt til øktu ferðsluna. Harnæst kann væntast økt ferðsla til Argir, tá brúgvin um Sandá verður tøk seinni í 2016.

Sambært frágreiðingum frá 2006, ið umsitingin hevur latið gera saman við ráðgeva frá Rambøll ísv. heildarætlan fyri Tórshavnar kommunu, verður m.a víst á ein framtíðar tørv fyri ‘trafikafvikling’ grundað á framskrivingum av ferðslutrýstinum. Í hesum sambandi verður brúk fyri at gera eina ítøkiliga ferðsluanalysu av ferðsluviðurskiftunum, sum m.a. skal lýsa støðuna í dag og hvussu verður, tá alt skúlaøkið verður fult útbygt.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Umsitingin hevur fingið eina kostnaðarmeting áljóðandi kr. 70.000,- u/mvg fyri arbeiðið. Afturat hesum koma útreiðslur fyri ferðaútreiðslur og fundarvirksemi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av tilboðnum og at játta kr. 125.000 til kanningararbeiðið av konto 8175 Aðrar vegaverkætlanir.

**Tekniska nevnd 17. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin kemur, saman við ráðgeva, at kunna um málið.

**Tekniska nevnd 8. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur móttikið frágreiðing (j. nr. 14/03118-12): notat vedr. trafikafvikling i univeritetsområdet, november 2014) umframt eina framløgu/film um ferðslusimulering (j.nr.14/03118-15) av framtíðar ferðslu á økinum kring allan skúladepilin. Í frágreiðingini eru ymisk uppskot um vega-íbindingar gjøgnumgingin og verður m.a ført fram, at besta loysn er uppskot nr. 7, sum tekur støði í at verandi innkoyring frá Marknagilsvegnum verður uppstigað til eitt stórt signalanlegg. Harumframt verður lagt upp til at býlingarnir undir Gráasteini eisini verða knýttir í hetta vegamótið.

**Ferðslunevndin 18. desember 2014:** Kunnað var um málið. Arbeitt verður víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Í framhaldandi viðgerð av uppskoti nr. 7, eru staðfestir smærri ferðslutrupulleikar í simuleringini í sambandi við avgreiðslu av ferðslu inni á universitetsøkinum í Marknagili. Umsitingin hevur tí í samráð við ráðgeva og umboð fra Landsverki latið gera eitt dagført uppskot 14/03118-23 uppskot nr. 8, sum tekur støði í tveimum signalanleggum fram við Marknagilsvegnum í staðin fyri einum, sum uppskot nr. 7 legði upp til. Tann eina íbindingin verður staðsett 230 sunnan fyri verandi íbinding og hin einar 140 m norðanfyri. Harumframt verður í uppskotinum lagt upp til at vegastrekkið millum komandi Vesturskúlan og Musikkskúlan og Skúladepilin í Marknagili, sum skal gerast sum sivugøta, kemur at bera ferðslu til og frá í ferðslutrýstinum í morgunmeldrinum, meðan tað í hinum dagtímunum burturav verður ætlað til bleyta ferðslu.

**Ferðslunevndin 26. februar 2015:** Málið umrøtt.

**Ferðslunevndin 10. mars 2015:** Nevndin mælir til at taka undir við uppskoti 8 samsvarandi notati 02 frá 19. februar 2015 frá Rambøll. Málið beint í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Saman við fyrilggjandi uppskoti nr. 8, sum tekur støði í trimum vegamótum við ljósreguleringum og vegaloysn inni á sjálvum skúlaøkinum – frá Landavegnum umvegis Musikkskúlan og Vesturskúlan, skal tekniska nevnd taka støðu til fígging av hesum framtíðar íløgum.

Eftir sum ferðslutrýstið endurspeglar nýtsluna av økinum, vildi tað verið hóskandi at býtt arbeiðið upp í 3 stig, vísandi til at Skúladepilin og Musikkskúlin byrja á heysti í 2016 og Vesturskúlin í 2019.

1. Marknagil ferðsla 1. stig
   Talan er um gerð av nýggjum vegamóti við ljósregulering. Staðsetingin er við sunnara markið á matr. nr. 1104d. Tórshavn, eigari: Tórshavnar kommuna.
   Fyribils mettur kostnaður – uml. 3 mió. kr.
   Arbeiðið má gerast liðugt innan august 2016
2. Marknagil ferðsla 2. stig
   Talan er um vegagerð inni á matr. nr. 1104d, 1102c, 1099 og 917, har Tórshavnar kommuna er eigari av øllum matriklum. Vegagerðin fevnir um ein uml. 10-12 m breiðan veg við eini samlaðari longd upp á uml. 500 m.
   Fyribils mettur kostnaður – uml. 10 mió. kr.
   Arbeiðið má gerast liðugt innan august 2019
3. Marknagil ferðsla 3. stig
   Talan er um regulering av vegamótunum við Landavegin og Kirkjubøarvegin og tillaging av vegastrekkinum ímillum.
   Fyribils mettur kostnaður – uml. 6 mió. kr.
   Arbeiðið má gerast liðugt innan august 2019

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Samlaði kostnaðurin fyri omanfyri nevndu arbeiði gerst sostatt uml. 19 mió. kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 500.000,- til projektering.

**Tekniska nevnd 08. apríl 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina at ávísa fígging.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 500.000,- av konto 8175, aðrar vegaverkætlanir og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram uppskot um vegaætlan. Nevndin skal taka støðu til vegaætlan og útbjóðingarhátt.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2015:** Umsitingin greiddi frá málinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, saman við ráðgeva, gjørt eina kostnaðarmeting grundað á skitsuuppskot av byggistigunum 1 og 2, áljóðandi kr. 16,9 mió. Kostnaðarmetingin fyri byggistig 1 er kr. 6,3 mió. og fyri byggistig 2 kr. 10,6 mió. Víst verður til j. nr. 15/03118-47.

Mett verður at tað er skilagott at fremja bæði byggistigini í einum, vísandi til at arbeiði býtt í tvær arbeiðstøkur førur við sær eyðkaútreiðslur ísv. tilrigging og avrigging av arbeiðsplássi v.m.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 16,9 mió. til gerð av útbjóðingartilfari fíggjað av íløgum fyri vegir. Mælt verður til at játtanin verður framd soleiðis, at kr. 4,3 mió. verða játtaðar í 2016 og kr. 12,6 mió. í 2017. Mælt verður harumframt til at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið

**Tekniska nevnd 04. november 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 11. november 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 4,3 mió. í 2016 og kr. 12,6 mió. kr. í 2017 fíggjað av til íløgum til vegir til gerð av útbjóðingartilfari og vegi.

**Býráðsfundur 19. november 2015:** Einmælt samtykt at játtað kr. 4,3 mió í 2016 og at seta kr. 12,6 mió á íløgujáttanina fyri 2017.

Borgarstjórin ynskir at viðgera málið í teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 06. apríl 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt tvey uppskot til vegaføring inni á skúlaøkinum við íbinding í Landsvegin og Marknagilsvegin og vegin, ið gongur eystur til Glasir.

**Prosjektuppskot nr. 1**
Uppskotið tekur støði i einum sokallaðum sivivegi, har vegbanabreiddin er 2*3 m við gongubreytum í báðum síðum á 2 m. Vegurin er ikki egnaður til bussferðslu. Um bussurin koyrir á hesum vegi, so noyðist hann at nýta koyrimáta B, og tá verður ikki hildið at trygdin er í lagi. Tá nýtir bussurin vegaareal á økinum hjá mótkoyrandi ferðslu.

**Prosjektuppskot nr. 2**
Uppskotið tekur støði í sama vegaprofili sum í uppskoti nr. 1, men vegaføringin er broytt til at kunna taka bussferðslu við teimum býbussunum, sum Tórshavnar kommuna nýtir í løtuni. Teir eru 9 m langir. Tað vil siga, at bussurin nýtir koyrimáta A, sum er meiri plásskrevjandi og bleytari kurvar.
Hetta vil hava við sær, at neyðugt verður at fáa til vega nakað av lendinum hjá Dagstovninum við Landavegin, matr. nr. 918b, Tórshavn umleið 480 $m^2$ av lendinum.
Neyðugt verður eisini at samráðast um at fáa til vega umleið 100 $m^2$ av lendinum, matr. nr. 917, Tórshavn, sum eg ogn hjá nýggja musikkskúlanum.

**Av og áseting við nýggja skúla á Fløtum**
Ætlanin er at gera ein geira til av- og áseting av skúlabørnum í høgra borði av vegnum, tá koyrt verður frá Landavegnum og niðan til skúlaøkið.
Tá koyrt verður frá Marknagilsvegnum og oman ímóti skúlaøkinum, so hevur umsitingin heitt á ráðgevan um at gera eitt uppskot til av- og áseting í høgra borði, har børnini ganga ígjøgnum ein tunnil undir vegnum og inn á skúlaøkið. Tann parturin er við lágdeildina, har lendið liggur lágt.
Um uppskotið skal bera til, so er neyðugt við samráðingum við sjálvsognarstovnin, sum varðar av Dagstovninum við Landavegin og harvið matr. nr. 918b, Tórshavn.

Uppskotið leggur eisini upp til, at ein gøta verður gjørd frá barnagarðsøkinum og niðan til tunnilin, soleiðis at barnagarðsbørn eisini kunnu gagnnýta spæliøkið við nýggja skúlan á Fløtum.

**Íbindingin í Marknagilsvegin**
Umsitingin hevur kannað, um tað er møguleiki fyri at flyta íbindingina einar 20 – 25 m vestureftir, soleiðis at parkeringsarealið til skúlan kemur at liggja á somu síðu eystaru megin atkomuvegin til skúlaøkið, men tá verður neyðugt at taka einar 500 fermetrar av ognini hjá Kristniboðssambandið, matr. nr. 919b.

**Skjøl í málinum**
TK j. nr. 16/02144-1: Uppskot nr. 1 Plantekning og yvirlitstekning
TK j. nr. 16/02144-2: Uppskot nr. 2 Plantekning og yvirlitstekning

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at arbeitt verður víðari við prosjektuppskoti nr. 2, og at gera høvuðsprosjekt og bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión til fimm arbeiðstakarar at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 01. juni 2016:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrun Mohr og Bogi Andreasen, samtykti at loyva innkoyring eftir verandi vegi, Janusargøta, frá báðum síðum á Marknagilsvegnum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við fyrireikingarnar at byggja nýggja Skúlan á Fløtum, eru ynskir frammi um at gera ein arbeiðsveg frá Marknagilsvegnum og oman til arbeiðsøkið, har tann nýggi skúlin skal byggjast. Ætlanin er at nýta arbeiðsvegin sum vegatkomu í sambandi við bygginginа av nýggja skúlanum. Tá er brúk fyri at hava neyðugt pláss til at koma við stórum bygningslutum í sambandi við bygginginа.

Arbeiðsvegurin er partur av lidna vegaprosjektinum, sum verður sambindingarvegurin til skúlaøkið í Marknagili frá Landavegnum og niðan í Marknagilsvegin. Umsitingin er í gongd við fyrireikingarnar at gera høvuðsprosjekt og at bjóða arbeiðið út.

Arbeiðstakarin Articon P/f hava latið Tórshavnar kommunu tilboð uppá gerð av fyribilsvegnum.

**Fíggjarlig viðurskifti**
Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting grundað á tilboðið frá Artion áljóðandi kr. 2.500.000.

**Viðkomandi skjøl í málinum**

| | |
|---|---|
| TK j. nr. 17/01243-3 | Tilboð frá Articon P/f |
| TK j. nr. 17/01245-1 | Samlað kostnaðarmeting |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla býráðnum til, umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndini, at taka av tilboðnum frá Articon áljóðandi kr. 2.500.000. Játtan til arbeiðið er tøk á verkætlan L81018 Miðstaðarøki í Marknagili.

**Tekniska nevnd 18. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Annfinn Brekkstein, um at beina málið aftur í teknisku nevnd og at vegastubbin verður boðin alment út, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 7 atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle
Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle

Atkvøddi blankt: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt við at planleggja vegaføringina inni á skúlaøkinum í Marknagili og umleggingina av høvuðsveganetinum rundan um skúlaøkið, sum er Marknagilsvegurin, Landavegurin og Kirkjubøarvegurin.

**Rundkoyring á vegamótinum Landavegur - Samdingarvegur millum Landavegin og Marknagilsvegin**
Arbeitt hevur verið við at kanna møguleikarnar fyri at gera eina rundkoyring á vegamótinum, sum líkist rundkoyringini á vegamótinum Fræsið/Landavegur.

**Sambindingarvegur millum Landavegin og Marknagilsvegin**
Vegaføringin er ein tvísporaður vegur á 2*3,25 við 2 m gongubreyt og 2 m súkklubreyt í báðum borðum.
Ein íbinding verður vestur til Dagstovnin við Landavegin, av tí at ætlanir eru um, at verandi íbinding frá Landavegnum verður niðurløgd.
Ein íbinding verður gjørd inn til nýggja musikkskúlan.

Fyri at gera av- og ásetingarætlanina so trygga sum møguligt til nýggja Skúlan á Fløtum, verður vegurin eftir íbindingina eystur til musikkskúlan og niðan til Janusargøtu ein einsrættaður vegur.

**Vit byrja í niðara borði**

| | | |
|---|---|---|
| Gongubreyt | 2,0 | m |
| Súkklubreyt | 2,0 | m |
| Einsrættað vegbreyt | 3,25 | m |
| Ferðsluherða | 1,5 | m |
| Vegbreyt til av- og áseting | 2,5 | m |
| Av- og ásetingarherða | 1,0 | m |
| Súkklubreyt | 2,0 | m |
| Gongubreyt | 2,0 | m |

**Íbinding frá Janusargøtu og vestur í sambindingarvegnin**
Janusargøta verður bundin í sambindingarvegin.
Her er neyðugt við umleggingum av verandi tekniskum installatiónum í Janusargøtu.
Arbeiðstøkumarkið verður millum ognina hjá Tórshavnar kommunu og økið, sum hoyrir til Glasir.
Ætlanin er at 12 m bussar skulu kunna koyra inn á Janusargøtu frá sambnindingarvegnum.
Samstarvsfundir hava verið millum Tórshavnar kommunu og umboð fyri Glasir, har veganetið inni á kommunalum vegaøki og vegaøkinum hjá Glasir ver planlagt soleiðis, at sleppast kann inn á skúlaøkini við bussum. Eisini verða busslummar planlagdir.

**Íbindingin av Sambindingarvegnum í Marknagilsvegin sunnanfyri íbúðarblokkin við Janusargøtu**
Her verður talan um ein t-kross, sum verður stýrdur av intelligentum ferðsluljósum. Verandi íbinding frá vegnum undir Gráasteini er ikki haldbar, at tí at torført verður at sleppa inn og út á Marknagilsvegin.

**Vegamótið Marknagilsvegur/Kirkjubøarvegur**
Ætalin er at umbyggja verandi t-kross, har ferðslan verður stýrd av intelligentum ferðsluljósum.

**Vegamótið Marknagilsvegur/Landavegur**
Ætalin er at umbyggja verandi t-kross, har ferðslan verður stýrd av intelligentum ferðsluljósum.

**Vegamótið Marknagilsvegur/Íbindingarvegur frá Glasir**
Hetta vegamótið verður ein t-krossur, har ferðslan verður stýrd av intelligentum ferðsluljósum.

**Vegamótið Marknagilsvegur/Atkomuvegur til Dánjalstrøð**
Verandi vegamót verður í fyrstu syftu órørt. Tvs verandi T-krossur verur sum hann er í dag. (Umsitingin arbeiðir í planleggingarfasuni við einum sambingarvegi millum Marknagilsvegin og Oyggjarvegin)**.**

**Marknagilsvegurin frá t-krossinum við Dánjalstrøð og suður til t-krossin við endan á Kirkjubøarvegnum**
Neyðugt er at dagføra og tillaga nevnda vegastrekki, soleiðis at tað passar inn í planløgdu vegamótini, sum verða strýrd við ferðsluljósum. Tað snýr seg í stuttum um øking av vegabreiddini, soleiðis at tað verður pláss fyri høgra- og vinstrasvingsbanum, og vegabanum, sum ganga beint fram.

**Ljósreguleringar**
Umsitingin hevur havt fundir við umboð fyri ráðgevingarfyritøku, sum er serráðgevi og framleiðari av ferðslustýringum í sambandi við umlegging ferðsluni á Marknagilsvegum, vegamótinum Hvítanesvegur/Eystari Ringvegur og verandi ferðsluljósum í býnum. Hendan ráðgevandi fyritøkan er veitari av teimum trimum verandi ferðslustýrdu vegmótunum, sum eru í Tórshavnar kommunu.
Fundir millum umboð fyri ráðgevan og Tórshavnar kommunu hava verið í Tórshavn 2.- 3. og 4. mai.
Ferðslustýrdu vegamótini koma at tosa saman gjøgnum eina radarskipan, sum verður partur av teknisku loysnini, soleiðis at ferðslan kann ganga so ótarnað sum gjørligt. Til ber eisini at gera broytingar í sjálvari stýringini av ferðslustýringini gjøgnum fartelefon ella gjøgnum teldu, um hetta gerst neyðugt. Eisini verður møguligt hjá teknisku umsiting at fylgja við

vegamótunum digitalt og visuelt. Møguleiki er eisini at fáa feilmeldingar gjøgnum sms og teldupost, soleiðis at feilir kunnu rættast uttan at fara á staðið.

**Ferðslusimuleringar**
Ferðslusimuleringar eru gjørdar og verða dagførdar eftir tørvi.

Mælt verður til, at veitingin og ráðgevingin í sambandi við ferðslustýrdu ljósini verður sum byggiharraveiting.
Arbeitt verður við at bjóða ráðgevingina í sambandi við entreprenørarbeiðið út 9. mai. 2017.

**Tíðarætlan fyri skúlabyggingarnar**

| | | |
|---|---|---|
| Glasir | Heystið | 2018 |
| Nýggi musikkskúlin | Várið | 2019 |
| Skúlin á Fløtum | Heystið | 2020 |

Umbyggingin av Marknagilsvegnum saman við ferðslustýrdu vegamótunum nr. 3 og 4 og vegurin frá Marknagilsvegnum og oman í Janusargøtu verður liðugt gjørt til komandi summar. Víst verður til plantekning.

**Fíggjarlig viðurskifti**

**Fyribils kostnaðarmeting og gjaldsætlan**
Umsitingin hevur, saman við byggiharraráðgevanum, gjørt eina fyribils kostnaðarmeting og eina gjaldsætlan, hvussu arbeiðið kann verða raðfest yvir ár, soleiðis at tey planløgdu arbeiðini verða liðug til tíðina. Víst verður til omanfyri standandi tíðarætlan fyri skúlabyggingarnar.
Verandi ráðgevi hevur gjørt eina kostnaðarmeting av planløgdu arbeiðunum, sum eru fyri framman. Eisini er eitt kortskjal gjørt, har ein kostnaðarmeting er sett í rammu fyri hvørt arbeiðið sær.

**Viðkomandi skjøl í málinum**

| | |
|---|---|
| TK j. nr. 17/01246-3 | HMP-Consult_Kostnaðarmeting saman við einum kortskjali |
| TK j. nr. 16/02144-7 | Yvirlitskort av vegaføringum og vegamótum saman við Orthofoto |
| TK j. nr. 17/01245-2 | Kostnaðarmeting C og gjaldsætlan fyri nevndu arbeiðir |
| TK j. nr. 14/03118-68 | Notat frá Rambøll – Trafikafvikling Marknagil |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at góðkenna fyriliggjandi prosjektuppskot, bjóða út ráðgevingararbeiðið at gera høvuðsprosjekt og útbjóðingartilfar og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 09. mai 2017:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn, tekur undir við teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, tekur støðu á einum seinni fundi.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Súsanna Olsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus og Gunvør Balle.

Atkvøddu blankt:
Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

**Ískoyti:**
Projektleiðslan fyri Skúlan á Fløtum mælir staðiliga til, at vegurin frá Marknagilsvegunum til Landavegin verður gjørdur beinanvegin.

Grundgevingin er at spreingjast skal fyri vegnum, kloakk og fjarhita, sum kann skaða bygningin, um hettar verður gjørt seinni. Enn eru bert fundament og veggir stoypt.

Vegaføringin er bert 20 m frá Skúlanum á Fløtum og nærri Musikkskúlanum, sum eisini er í gerð.

Tekniska umsitingin hevur, saman við ráðgevanum, mett um kostnaðin av at gera vegakassan heilt oman til Landavegin, soleiðis at hann kann brúkast til arbeiðsveg, at leggja kloakkleiðingar, og gera tað møguligt at føra fjarhitaleiðingarnar farm til til skúlan á Fløtum og Musikkskúlan. Metti kostnaðurin fyri hetta er 5,2 mió. kr. uttan MVG.

Yvirlit yvir ætlaða játtan verður tøkt til fundin í Fíggjarnevndini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin taka undir við projektleiðsluni og mæla til at fáa eina eykajáttan á 6 mió. kr., fíggjað av tøkum peningi á tekniska økinum, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið. Eisini verður mælt til at arbeiðið verður boðið út beinan vegin, við tí treyt at fígging fæst.

**Tekniska nevnd 07. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og játta 6 mió kr., ið verður fíggjað av lokaðum verkætlanum.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við atkomuviðurskifti við Glasir, er avrátt at av- og á skipan til Glasir skal skipast á teirra egna øki. Hendan ætlan ber í sær, at tal av parkeringsplássum minkar við umleið 30 plássum. Skotið verður upp at etablera tey mistu p-plássini á økinum omanfyri skúlan, (sí skitsu 01). Hettar økið er ogn hjá Tórshavnar kommunu og Føroya Handilsskúla.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin taka undir við at arbeitt verður víðari við uppskotinum og mæla til, at kommunan útvegar neyðugan part av lendinum burtur av matr. nr. 1101a.

**Tekniska nevnd 06. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at umsitingin arbeiðir við eini endaligari parkeringsloysn sum umfatar alt økið.

**Ískoyti:**
Vísandi til samtyktina hjá teknisku nevnd, skal umsitingin arbeiða við einari endaligari parkeringsloysn, sum umfatar alt økið burturav matr. nr. 1101a, Tórshavn, sum liggur millum bygningin hjá Handilsskúlalanum og matr. nr. 1101b, Tórshavn. Neyðugt er tískil, at hesin parturin av matr. nr. 1101a, Tórshavn, verður lagdur av til parkeringsøki allur sum hann er.

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri, kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at taka undir við teknisku nevnd og leggja tann í ískoytinum nevnda part av matr. nr. 1101a, Tórshavn, av til parkeringsøki sum liður í einari endaligari parkeringsloysn fyri økið kring Glasir.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Komið er nú somikið áleiðis, at vegamótini sunnan- og norðanfyri Handilsskúlan skulu fremjast. Glasir tekur eftir ætlan nýggja skúlan í brúk komandi skúlaár og miðað verður ímóti at vegamótini tá eru liðug. Í tí sambandi er neyðugt at fáa arbeiðið boðið út og at keypa inn ferðsluljósini til bæði vegamótini.

Projekteringin er liðug og klárt er at bjóða arbeiðið út. Sí viðhefta skjal, Planur Marknagilsvegur, j.nr. 14/03118-85.

Ein fyribils kostnaðarmeting er gjørd av omanfyri nevnda arbeiði, áljóðandi kr. 4.300.000,- Ætlanin er, at kommunan sjálv keypir inn ferðsluljósini og at sjálvt vegarbeiðið verður boðið út í innbodnari licitatión.

Avsettar eru kr. 2.000.000,- til vegagerð í Marknagili í inniverandi ári. Framfluttar eru kr. 6.426.000,- frá 2017. Samlaða játtanin er sostatt kr. 8.426.000,- Av hesum skulu kr. 4.030.000,- til vegagerð fram við skúlanum á Fløtum.

Mett verður at alt arbeiðið kann fremjast fyri játtanina í ár.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at arbeiðið verður boðið út, og at kommunan keypir og fær til vega ferðsluljós til vegamótini.

**Tekniska nevnd 08. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Eftir samtyktina í Teknisku nevnd 08.mai 2018, skuldi málið verið beint í Býráðið umvegis Fígggjarnevndina. Tað koma tað av misgávum ikki, hetta verður við hesum gjørt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtanin á kr. 2 mió. til endamalið verður flutt av L00001 yvir á verkætlanina L81018 og málið verður beint í Býráðið.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri, einari ímóti og fýra blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Jákup Dam, Bogi Andreasen, Ruth Vang og Bjørghild Djurhuus.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein og Bjørg Dam.

## 151/18 Miðbýarætlan - Steinatún

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 61/14 | 14/05065-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 03.12.2014 | 331/14 | 14/05065-1 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2014 | 258/14 | 14/05065-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.11.2015 | 240/15 | 14/05065-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2016 | 49/16 | 14/05065-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 58/16 | 14/05065-1 |
| 7 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 45/16 | 14/05065-1 |
| 8 Ferðslunevndin | 23.03.2016 | 26/16 | 14/05065-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.04.2016 | 133/16 | 14/05065-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.05.2016 | 135/16 | 14/05065-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 18.05.2016 | 60/16 | 14/05065-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 19.05.2016 | 189/16 | 14/05065-1 |
| 13 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 134/16 | 14/05065-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.10.2016 | 269/16 | 14/05065-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 378/16 | 14/05065-1 |
| 16 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 304/16 | 14/05065-1 |
| 17 Tekniska nevnd | 07.11.2017 | 58/17 | 14/05065-1 |
| 18 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2017 | 214/17 | 14/05065-1 |
| 19 Tekniska nevnd | 28.11.2017 | 79/17 | 14/05065-1 |
| 20 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.11.2017 | 225/17 | 14/05065-1 |
| 21 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.12.2017 | 241/17 | 14/05065-1 |
| 22 Tekniska nevnd | 12.12.2017 | 81/17 | 14/05065-1 |
| 23 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 88/18 | 14/05065-1 |
| 24 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.05.2018 | 124/18 | 14/05065-1 |
| 25 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 146/18 | 14/05065-1 |
| 26 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 123/18 | 14/05065-1 |
| 27 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 151/18 | 14/05065-1 |

### Málslýsing:

Í sambandi við hugskots- og prosjektkappingina, sum var liðug 16. mai 2014 (journal nr. 14/01637), var ætlanin at koma í gongd við at gera fyribils kostnaðarmetingar og raðfesta tey ymisku átøkini í miðbýnum til langtíðar íløguætlanina hjá býráðnum (journal nr. 14/01463).

Kappingin var býtt sundur í tvær uppgávur, eina heildarætlan fyri allan miðbýin og eina prosjektkapping fyri økið kring Steinatún.

Zeta arkitektar, sum fingu fyrstu virðisløn í kappingini hava gjørt eina fyribils kostnaðarmeting fyri 1. byggistig av prosjektinum við Steinatún. 1. byggistig fevnir um betraði ferðsluviðurskifti, nýggjan flísa- og steinbelegning, uppfylling av steinagøtu oman ímóti Bank Nordik bygninginum, nýggja uppihaldstrappu við Tilhaldið, ljós og planting.

Kostnaðarmetingin er gjørd út frá einum skitsuuppskoti, sum ikki er gjøgnumarbeitt, og er tí rættiliga óviss. Hædd er heldur ikki tikin fyri møguligum trupulleikum við undirlendinum, og at arbeiðið skal ganga fyri seg á einum vegastrekki við nógvari ferðslu.

Kostnaðarmetingin ljóðar uppá kr. 14,4 mió. Og við eini óvissu uppá 20% gevur tað kr. 17,4 mió.

Í sambandi við ætlanina, hevur umsitingin biði Rambøll um tilboð uppá eina ferðslukanning við simulering av broyttu umstøðunum við Steinatún. Rambøll kann gerða hetta fyri kr. 60.000,-.

Býarskipanardeildin mælir nevndini til at taka støðu til, um peningur skal játtast til prosjektering av verkætlanini, soleiðis at ein meira nágreinilig kostnaðarmeting kann gerast fyri verkætlanina.

Í upprunaligu íløguætlanini fyri 2014 stóðu kr. 9 mió. til miðbýarætlan og kr. 2 mió. til spælipláss í miðbýnum. Eftir endurskoðan av íløguætlanini og flytingar til onnur endamál eru í dag kr. 3,109 mió. til miðbýarætlan og kr. 850.000 til spælipláss í miðbýnum. Í uppskotinum til íløguætlan fyri 2015 eru kr. 5 mió. settar av til miðbýarætlan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin tekur støðu til um arbeiðast skal víðari við ætlanini, sum er mett at kosta íalt 15-20 mió.

Um arbeiðast skal víðari við ætlanini, eigur projekteringin at verða sett í gongd, umframt kanningar av leiðingum, ferðslukanning v.m.

Projekteringin er mett til kr. 1.300.000
Ferðslukanning er mett til kr. 60.000

Verður peningur játtaður, eigur tað at fara av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at gera eina ferðslukanning og at heita á fíggjarnevndina um at játta kr. 60.000 av íløgum til miðbýarætlanina. Eisini samtykti nevndin, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti**:
Í sambandi við arbeiði við miðbýarætlanini, eru ymiskar kanningar gjørdar, umframt at ein meirnýtsla hevur verið í sambandi við arkitektakappingina, hetta er gjørt upp til íalt kr. 510.022,- harav kr. 181.418,75 er meirnýtsla og kr. 328.603,25 til ymiskar kanningar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at játtaðar verða kr. 60.000,- til ferðslukanning við Steinatún, umframt kr. 510.022,00 til at gjalda omanfyri nevndu rokningar, soleiðis at tað íalt verða játtaðar kr. 570.022,00 av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at játta kr. 60.000 til ferðslukanning við Steinatún, ið verður at játta av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:

Ferðslukanningin av Steinatúni, sum bleiv samtykt at gera á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini 28. november 2014, er nú liðug.

Ferðslukanningin tekur støði í verandi viðurskiftum, grundað á teljingar av bilum, gangandi fólki og bussleiðini í Steinatúni í meldurtíðini frá kl. 15.30 til 16.30 ein vanligan dag.

Miðað var eftir loysnum at tøma Steinatún fyri bilar i tíðarbilum við ferðsluljósum við Niels Finsens gøtu og Tórsgøtu samsvarandi vinnandi projektuppskotinum frá arkitektakappingini fyri miðbýin frá ZETA arkitektar.

Niðurstøðan í kanningini vísir, at miðal bilrøðirnar við Steinatún í meldurtíðini vilja verða nakað longri enn í dag, meðan longstu bilrøðirnar verða somu longd sum í dag.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til um peningur skal játtast til projektering av 1. byggistigi av projektinum við Steinatún.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. november 2015:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt skipanaruppskot fyri Steinatún. Sí Hjáløgdu skitsu j.nr. 14/05065-8. Býarskipanardeildin mælir til, at játtaðar verða kr. 500.000 av íløgukarminum á 6275 Fríðkan av kommununi, til projektering av Steinatúni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta 500.000 kr. av konto 6275 Fríðkan av kommununi til projektering av Steinatúni.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ferðslunevndin skal taka støðu til fyriliggjandi uppskot um ferðsluviðurskiftini á Steinatúni.

**Ferðslunevndin 23. mars 2016:** Málið umrøtt. Arbeitt verður víðari við málinum.

**Ískoyti:**
BYARSKIPAN hevur fingið gjørt projekt klárt at bjóða út í undirhondsboð millum tveir arbeiðstakarar at bjóða uppá. Ráðgevararnir hava mett um tíðarætlanina fyri verkætlanina og meta at tað ber til at gera nevndan part av Steinatúnsverkætlanini lidna til 15. juli í ár.

Sostatt er klárt at bjóða hetta arbeiðið út í undirhondsboð millum tveir arbeiðstakarar at innheinta tilboð, at leggja aftur fyri nevnd og býráð til støðutakan á komandi fundi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at bjóða arbeiðið út í undirhondstilboð at leggja fyri nevndina aftur á komandi fundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er boðið út framíhjá og vóru tilboðini hesi uttan MVG:

- P/F Articon: kr. 4.479.578,-
- Sp/f TG Verk: kr. 3.926.120,-

Umsiting kommununnar er í samráðingum við Sp/f TG Verk um sáttmála um arbeiðið og hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting (sí j. nr. 14/05065-25) fyri arbeiðið við støði í tilboðnum frá TG-Verk, har prosjektering, byggileiðsla, fakeftirlit, byggiharraveitingar, óvæntað, MVG v.m. er íroknað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at gera sáttmála við TG-Verk um arbeiðið og at játtaðar verða kr. 5.596.000,- av íløgukarminum á 6275 Fríðkan av kommununi, afturat teimum kr. 500.000,- sum áður eru játtaðar til prosjektering. Málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at útvega fleiri parkeringspláss í Tórsgøtu beinanvegin.

**Tekniska nevnd 18. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. maj 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sum liður í framhaldandi menningini av Steinatúni, so hevur umsitingin fingið ráðgeva at gjørt uppskot til tak/skýli at staðseta í Steinatúni.

Skýlið kemur at virka sum bæði eitt bussskýli, umframt eitt tak til uppihald. Talan er um at gera eitt eyðkent bussskýli í høgari góðsku, umframt at ætlanin er at gera eitthvørt, sum víkir frá verandi bussskýlum, so sum eina til tvær reiggjur, har fólk kunnu stytta sær um tíðina, meðan bíðað verður eftir bussinum. Sí skjal nr. 14/05065-41, sum vísir hvussu skýlið kemur at taka seg út á økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at íverkseta projektering, útbjóðing í heildarveiting og uppseting av bussskýlinum, umframt at játta umsitingini at fara undir at planleggja næsta byggistig av Steinatúni, sum er at umbyggja norðaru síðuna av Steinatúni og at játtaðar verða kr. 2 mió. av konto 6275 til hesi arbeiðir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 07. november 2017:** Kunnað varð um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2017:** Kunnað varð um málið.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Verandi uppskot leggur ikki upp til lívd í mun til regn og vind, tí hevur verið tosað við ráðgevan frá Zeta Arkitektar um at gera nýtt uppskot til sjálvt skýlið undir hálvtekjuni.

Kunnað verður um nýggja uppskotið á fundinum, har ráðgevin kemur at greiða frá broytingini, ið skal tryggja lívd til tey, ið bíða eftir bussinum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at góðkenna nýggja uppskotið.

**Tekniska nevnd 28. november 2017:** Kunnað varð um málið og arbeitt verður víðari við málinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2017:** Kunnað varð um málið og arbeitt verður víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um annað alternativt uppskot - *Steinatún, bussskýlið 11.12.2017*.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið *Steinatún, bussskýlið 11.12.2017*.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. desember 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 12. desember 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti og tilmæli kemur mánadagin**.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur fingið til høldar ráðgevarasáttmála við Zeta Arkitektar áljóðandi 324.600,00 kr. uttan mvg. at standa fyri høvuðsprosjekti, útbjóðing og eftirliti av býartorginum í Steinatúni. Zeta Arkitektar hava bjóðað arbeiðið út í undirhondsboð til arbeiðstakararnar P/F Articon og Sp/f TG-Verk.

Tilboðini eru soljóðandi:

Articon: 3.645.953,00 kr. uttan mvg.
TG-Verk: 2.798.258,00 kr. uttan mvg.

Zeta Arkitektar og umsitingin eru farin í samráðingar við TG-Verk, sum høvdu lægsta tilboðið, til tess at finna sparingar. Í tilboðnum varð biðið um tvær loysnir á antin holaðar (perforera) koparveggir ella herdaðar glasveggir, soleiðis at byggiharrin sjálvur hevur møguleika at velja. Stødd og snið tað sama, sum lýst í útbjóðingartilfarinum. Niðurstøðan er, at glasið er munandi bíligari frá báðum tilboðsveitarum. Herdað glas er somuleiðis ein tilfarsloysn, ið skapar ljósari sjónligari umhvørvi í býartorginum, í mun til holaðar (perforeraðar) koparplátur. Um tikið verður við hesari loysn og sparingum er tilboðið hjá TG-Verk áljóðandi:

TG-Verk: 1.722.115,20 kr. uttan mvg.

Umsitingin hevur síðani gjørt eina samlaða kostnaðarmeting at gera býartorgið í Steinatúni liðugt. Samlaði kostnaðurin er kr. 2.399.664,00 kr. við mvg., um tikið verður av lægsta tilboðnum við sparingum. Her er veiting og montering av býartorgi, beinkir, ráðgevarakostnaður, prosjektumsiting, trygging v.m. íroknað.

2 mió. eru longu játtaðar av konto 6275 og 400.000,00 kr. við mvg. resta í, um tikið verður av samlaða kostnaðinum. Møguleiki er at fíggja 400.000,00 av konto 7510, bussleiðin.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at taka av lægsta tilboðnum við sparingum hjá TG-Verk, at játta írestandi 400.000,00 kr. av konto 7510, bussleiðin, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

# 152/18 Veiðifelagið Byrsumúli : Áheitan um at fáa samstarv í lag við kommununa fyri at betra um viðurskiftini hjá skjótingini í høvuðsstaðnum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 108/17 | 15/03761-9 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 162/17 | 15/03761-9 |
| 3 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 234/17 | 15/03761-9 |
| 4 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 310/17 | 15/03761-9 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 85/18 | 15/03761-9 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2018 | 104/18 | 15/03761-9 |
| 7 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 159/18 | 15/03761-9 |
| 8 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 203/18 | 15/03761-9 |
| 9 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 178/18 | 15/03761-9 |
| 10 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 152/18 | 15/03761-9 |

**Málslýsing:**
Veiðifelagið Byrsumúli sendi í 2015 áheitan um at fáa samstarv í lag við kommununa um at betra um viðurskiftini hjá skjótingini í høvuðsstaðnum (sí hjáløgd skjøl). Síðani hevur verið nakað av samskifti millum kommununa og felagið.

4. apríl 2017 sendir felagið umsókn um stuðul til projektering av eini verkætlan at dagføra skjótibreytirnar.

Talan er um tilboð frá Sp/f HMP Consult

"Prísurin fyri at gera eitt projekt er 450.000,- umframt MVG.
Við í hesum er:

- Myndugleikaprojekt og projekt klárt til útbjóðing.
-

Í hesum er íroknað:

- Lendisprojekt við vegum og gøtum.
- Dekkgrót fram við fjørðuni.

Skal viðmerkja, at vanliga er neyðugt at gera simuleringar á Hydraulisk institut í DK, fyri at áseta stødd á dekkgroti og hvussu stórur verjugarðurin skal gerast.
Hettar er so ikki íroknað prísin og kostar hettar neyvan undir 100.000,- at fáa gjørt. Tað kunnu vit so venda aftur til, kanska "overkill" frá mínari síðu.

- Innbyggja skýli, smærri bygningar o.t. í samb. við skjótivøllin.
- Ljós fram við vegum og gøtum.
- Uppmáting av lendinum.
- Visualisering av verkætlanini.

Tit senda okkum mát og plasering av skýlum, lutum o.t.
Er nakað eg havi gloymt, so hoyri eg frá tykkum. Eg hugsaði at tit skuldu hava eina samlaða loysn frá okkum."

Í sambandi við at skjótibreytin bleiv gjørd í farnu øld og síðani hevur verið drúgt samskifti við ymiskar myndugleikar v.m. um viðurskiftini har.

Møgulig útbygging vil kunna viðføra at ymisk viðurskifti skulu takast uppaftur, herundir:

- atlit til friðing sbrt. lógini um náttúrufriðing: http://www.logir.fo/Logtingslog/48-fra-09-07-1970-um-natturufriding-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-110-fra-29
- atlit til landsvegalógina sbrt. lógini um landsvegir: http://www.logir.fo/Logtingslog/51-fra-25-07-1972-um-landsvegir-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-18-fra-8
- atlit til lógina um umhvørvisvernd: http://www.logir.fo/Logtingslog/134-fra-29-10-1988-um-umhvorvisvernd-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-128-fra-22

Í fall farið verður undir hesa tilgongd og herundir projektering er hóskandi at gera eina nærri avtalu við felagið um innihald og treytir í verkætlanini.
Samstundis er ivasamt um tað er skilagott at gera eina projektering áðrenn neyvari loyvi fyriliggja. Í sofall má eini meiri principiell tilgongd vera fyrst. Spurningurin er so eisini um tað er felagið ella kommunan sum skal standa fyri tí?

Ongin peningur avsettur til endamálið Konta 5365 - Stuðul til ítrótt rúmar ikki slíka játtan í verandi støðu.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a). at taka principiella støðu til um farast skal víðari við umsóknini
b). at taka støðu til møguliga raðfesting á fíggjarætlan 2018 ella seinni ella á eykajáttan.

**Mentamálanevndin 03. mai 2017:** Ein minniluti, Gunvør Balle og Marin Katrina Frýdal, tekur ikki støðu til tilmælini, men vil taka málið upp aftur á seinni fundi.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen, tekur undir við tilmælunum.

**Tilmæli:**
Til tess at taka málið upp aftur mæla trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin til, at umsitingin saman við felagnum nágreinar verkætlanina við Sandvíkir, bæði í mun til neyðug myndugleikakrøv og verkseting sum grundarlag fyri seinni støðutakan til projektering, útboð og fígging.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Í summar hevur umsitingin havt samskifti við Býrsumúla um málið. Mett verður at mest hóskandi er at fyrireikingarnar av verkætlanini verða í tveimum stigum. Í fyrstu atløgu at fáa ment verkætlanina fram til sonevnt skipanaruppskotsstig og við støði í tí fáa til vega dagførdar góðkenningar, áðrenn farið verður undir detailprojektering og myndugleikaverkætlan. Leysliga mett kann eitt slíkt fáast til vega fyri 150 tkr.

Í samskiftinum hevur kommunan eisini fingið avrit av góðkenningum fyri verandi skjótianlegg t.e.:

- góðkenning frá yvirfriðingarnevndini
- skjótiloyvi frá politinum
- umhvørvisgóðkenning

Viðv. viðurskifti í mun til lógina um landsvegir, so er tað samskifti ikki endaliga avklárað.

Ítøkiliga er hugsanin at gera eina samstarvsavtalu við Byrsumúla og ráðgevarafelag um menning av verkætlanini. Uppskot til avtalu kann ætlandi verða klárt til nevndarfundin í oktober. Tá tann tilgongdin er komin á mál ber til at projektera verkætlanina lidna og bjóða hana út.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at fáa heimild at gera samstarvsavtalu við Byrsumúla og ráðgevarafelag um menning av skipanaruppskoti fíggjað av rakstri kontu xxx.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Samtykt at umsitingin fer undir samskifti við Byrsumúla og aðrar áhugapartar innan skjóting fyri at kanna aðra møguliga staðseting og felags loysn við skjótibreyt. Málið verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Við støði í samtyktini í mentamálanevndini frá 29. november 2017, varð fundur fyriskipaður við Byrsumúla, Veiði- og skjótifelagið, Ark. Kommando og løgregluna, har feløgini/eindirnar vóru biðin um at greiða frá sínum virksemi og staðsetingum. Umrøtt varð, um til ber at samantvinna fleiri áhugapartar innan skjóting á einum stað.

Tørvurin hjá ymsu áhugapørtunum innan skjóting er ymiskur. Byrsumúli hevur aðrar fortreytir enn hinir partarnir, sum heilt avgjørt kundu verið saman um eina felags loysn við skjótibreyt. Millum annað hevur rætningurin og sólargangurin stóran týdning fyri Byrsumúla, meðan hesi ongan týdning hava fyri hinar partarnar. Í verandi støðu er ikki nøkur eyðsæð staðseting eyðmerkt ella uppskot komin um framtíðar staðsetingar, har hesi feløgini/eindirnar kunnu savnast á einum stað.

Um hugt verður eftir økinum, matr. 139e, har Byrsumúli heldur til í dag, so hóskar staðsetingin avbera væl til teirra virksemi, og stuðlar økið undir fortreytunum, sum skulu til fyri at skapa góðar karmar til skjótingina hjá Byrsumúla. Tó skal hædd takast fyri, at breytirnar verða góðkendar av altjóða serfrøðingum fyri at skipa altjóða kappingar. Umframt at øll trygdarkrøv, fráleika- og fráboðanarkrøv verða lokin í mun til almenna ferðslu á landi og sigling fram við landi. Í Danmark er tað ”Politiets og Justitsministeriets skydebane inspektør”, sum tekur sær av slíkum málum.

Óljóð- og dálkingarstøðan eigur eisini verða endurskoðað aftaná seinastu umhvørvisgóðkenning, ið var í 2006. Skjótibreytir eru kap. 5 virkir, ið Umhvørvisstovan hjá landinum varðar av. Virksemið er broytt, har skotið verður sunnu- og halgidagar. Virksemið í økinum hevur aftaná 30 ár sett síni neiligu merki á annars serstaka vakra lendið í Sandvíkum.

Í dag liggur økið á markinum til útjaðaran av Havnini, og er økið náttúruvakurt við fjøru og fríum útsýni út á sjógv. Ídnaðarøkið á Hjalla er nærmasti granni og ber økið brá av nógvari

ferðslu. Í nærmastu framtíð, tá tunnilin verður liðugur, fer økið at liggja mitt í einum knútapunkti, ið verður bindilið millum oyggjarnar við øktari ferðslu. Tá hugsað verður um rekreativ øki, so leita fólk vanliga burtur frá ferðslu og óljóði, tískil er í mun til býarskipanarlig viðurskifti einki til hindurs fyri, at Byrsumúli heldur fram á verandi øki. Umsitingin mælir tó til at fáa altjóða grundreglur og serkønan at meta um staðsetingina.

Byrsumúli hevur fleiri vitjandi, ið øll fáa ágóðan av hesum náttúruvakra øki, men samanborið við almenningin er talið á borgarum lítið í mun til um hetta lendið lá sum fríøki til almenningin.

Harafturat er ynski frá umsitingini, at Byrsumúli ikki ger seg inn á rættina, ið liggur tætt upp at ynskta matrikli. Rættin er áleið túsund ára gomul, men verður ikki brúkt longur orsakað av skjótivirkseminum og øðrum, hegning o.s.fr. Men rættin er tó eitt mentanar- og siðsøguligt minni, ið er vert at varðveita.

Ynski er um at atlit verða tikin til fjøru, og at farið verður væl um náttúruna sum heild, bæði í sambandi við dálking og ovurnýtslu, men náttúruvakurleikin er ikki tann sami aftaná 30 ára virksemi, økið treingir til at ruddast og hampast sum heild. Stranga eftirlitið, sum sigst vera, er ikki sjónligt.

Onnur staðseting er á Glyvursnesi, at gera skjótibreyt í grótbrotinum á Glyvursnesi ella í økinum sunnanfyri, har er vítt lendi burturfrá fjølbygdum øki. Men henda staðseting er partur av heildaruppskotinum í sambandi við gerð av golfvølli á Glyvursnesi.

Treytirnar, sambært umhvørvisgóðkenning í máli nr. 61010-200300445-36 (skjal 1), *Góðkenningartreytir frá 4. juli 2006, frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni*, eiga at dagførast, og eftirkannast, um treytirnar eru hildnar seinastu 22 árini. Virksemið er munandi broytt hesi árini, t.d. er nógv tons av stálhøglum skotin út á økið.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til, at Byrsumúli heldur fram á økinum, har teir eru í dag, at øll loyvi verða dagførd, umhvørvisgóðkenning verður framd og altjóða ásetingar til kappingar verða hildnar og at beina málið aftur í mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2018:** Nevndin mælir til at Byrsumúli heldur fram á økinum, har teir eru í dag**.**

**Ískoyti**:
Síðani fundin í Byggi- og býarskipanarnevndini er komið uppskot frá Politinum og Arktiskt kommando um staðsetingar av skjótibreyt til teirra tørv. Sí hjálagt skriv.

Á løgukonto 5775 er játtan á 1.500 tkr, ið er ætlað til fyrireikingar v.m. í sambandi við ymiskar verkætlanir innan ítróttaanlegg, herundir skjóting. Kontan er ikki fult disponerað enn.

Mál um endurnýggjan av leigusáttmála við Byrsumúla um økið verður lagt fyri fíggjarnevndina í næstum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at geva umsitingini heimild til at gera uppskot til samstarvsavtalu við Byrsumúla og ráðgevarafelag um menning av skipanaruppskoti og koma aftur í nevnd við einum uppskoti.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Sambært umbøn frá nevndini, kemur umboð fyri nevndina í Byrsumúla á fundin at greiða frá um virksemi og um útbyggingarætlanir felagsins.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Umboð fyri nevndina í Byrsumúla greiddi frá virkseminum og um útbyggingarætlanir felagsins.

**Ískoyti:**

Nýggjur 25 ára leigusáttmálið verður ætlandi undirskrivaður. Sí skjal 15/03761-32.

Avtalað er, at kommunan letur gera seyðasmogu, og annars letur tilfarð til hegn og pelar v.m. leystliga mettur kostnaður í alt kr. 87.000,00 Upphæddin verður at rindað av konto 6275 ( vetrarfriðing ) Sí útrokning skjal 15/03761-42

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni mæla til at gera nýggjan 25 ára leigusáttmála við leigaran, sí skjal 15/03761-32, og at rinda gerð av seyðasmogu umframt tilfarð til hegn,pelar v.m. áleið kr. 87.000,00 av konto 6275 ( Vetrarfriðing )

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

# 153/18 Heildarloysn fyri kommunulæknaviðtalur í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 20.06.2018 | 29/18 | 18/02331-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 208/18 | 18/02331-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 153/18 | 18/02331-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tórshavnar kommuna hevur hølir til 13 kommunulæknaviðtalur. Seinnu árini hevur verið vaksandi tørvur á fleiri kommunulæknum í kommununi við tað, at fólkatalið er nógv vaksið. Landsstýriskvinnan í heilsumálum hevur játtað at seta 2 kommunulæknastørv í TK, tá hølir eru tøk til hetta.

Sambært Heilsutrygd so verða teir 4 kommunulæknarnir í Miðlon, sum allir starvast niðursetta tíð, settir fulla tíð og dekka harvið eitt av nýggju kommunulæknastørvunum, sum er játtað til TK.

Hitt starvið bíðar til Tórshavnar kommuna hevur tíðarhóskandi viðtaluhølir at vísa á.

Ábyrgdarbýtið millum land og kommunur á kommunulæknaøkinum er ásett í l*óg um kommunulæknaskipan*, har tað er ásett, at Heilsutrygd setir kommunulæknar og avloysarar í starv, og at kommunurnar útvega og rinda viðtaluhølir við neyðugum innbúgvi, tólum og amboðum til kommunulæknan. Krøvini til kommunurnar hesum viðvíkjandi eru so aftur útgreinað í *kunngerð um støðið, viðlíkahald, rakstur o.a. av viðtaluhølum hjá kommunulæknum.*

Umsitingin hevur í eina tíð arbeitt miðvíst við at finna hóskandi loysnir á bráðfeingis trupulleikanum, sum er at finna høli til nýggjan kommunulækna og at endurnýggja viðtalurnar á Frúutrøð og í Berjabrekku, sum ikki longur eru mettar tíðarhóskandi.

Fleiri atlit eru at taka í tílíkum máli. Hølini skulu lúka í minsta lagi tey krøv, sum kommunan sambært omanfyristandandi lóg um kommunulæknaskipan, hevur skyldu til.

Við støði í samskiftinum við kommunulæknarnar er greitt, at formliga grundalagið, her serliga viðvíkjandi kunngerðarkrøvum um høli, als ikki er í samsvari við faktiska virksemið í fleiri av viðtalunum. Fleiri kommunulæknar hava eitt nú útbúgvingarlækna starvandi í viðtaluni, men lóg og kunngerð fyrihalda seg ikki til økta hølis- og rakstartørvin, ið hesin hevur við sær. Samstundis er hetta tó við at betra um tænastuna til borgaran og av størsta týdningi til tess at fáa til vega nýggjar kommunuæknar. TK hevur tí lagt upp fyri, at minstukrøvini til hølir í ávísan mun víkja frá kunngerðini.

At finna eina skjóta og góða loysn á málinum, hevur eisini verið eitt atlit. Umsitingin hevur somuleiðis lagt seg eftir at finna fíggjarliga skynsama loysn.

Av teimum møguleikum sum umsitingin hevur kannað, metir umsitingin at besta loysnin er at leiga bygning í Hoyvík sum verður innrættaður til 5 kommunulæknaviðtalur (3+2).

Talan er um bygning á Kirkjustræti 2. Bygningurin stendur í løtuni í gerð, og kommunan fær tí høvi at innrætta bygningin eftir egnum ynski. Sostatt kann bygningurin verður innrættaður soleiðis, at hann beinanvegin verður gjørdur til kommunulæknaviðtalur og ikki skal byggjast um.

Bygningurin er umleið 1250 fermetrar til støddar í tveimum hæddum og góð parkeringsviðurskifti eru runt um bygningin (39 pláss). Tað er góð atkomuviðurskifti til báðar hæddir í bygninginum.

Byggideildin metir, at bygningurin er væl egnaður til endamálið. Av tí at bygningurin longu stendur uppi og arbeiðið við at gera bygningin lidnan er í gongd, fer hetta at minka um bíðitíðina eftir at sleppa inn í bygningin, í mun til um talan var at byggja nýggjan bygning ella at leiga bygning, har kostnaðarmiklar umbyggingar og umvælingar skulu gerast.

Tórshavnar kommuna fær til vega tekning til innrættingina og ráðgeving um krøv til innrætting, so sum ljós og ljóð viðurskifti, luftskifti o. s. fr. Í leigusáttmálanum verður viðmerkt, at útleigarin skal tryggja at tey krøv, sum verða sett til bygningin og innrættingina verða lokin, og at útleigarin hevur ábyrgdina, um hetta ikki verður lokið.

Útleigarin ger bygningin kláran til innflyting eftir tekningum, sum TK fær tilvega. Væntandi verður bygningurin klárur til innflyting um eitt ár. Leigusáttmálin tekur við, tá bygningurin er klárur at flyta inn í.

Leigugjaldi verður 1280 kr. pr. fermetur umframt árliga prístalsregulering, tó í minsta lagi 1% og leigusáttmálin verður fyri 15 ár. Sí fylgiskjal við leigukostnaðinum fyri 15 ár.

Ein ávís upphædd verður at seta av til innbúgv, útgerð til viðtalurnar og til ráðgeving og tekningar. Enn er ikki klárt at siga neyvt, hvør upphædd talan verður um, men væntast kann at hetta verður áleið 5 milliónir og verður henda uppphædd at taka við í fíggjarætlanina fyri 2019, tá umsitingin hevur fingið gjørt neyvari útrokningar.

Viðvíkjandi rakstrinum av kommunulæknaviðalum hækkar hesin sjálvsagt, tí talið av viðtalum økist, tá eitt nýtt starv verður sett og talið av viðtalum fer úr 13 upp í 14.

Annars verður mett, at raksturin av bygninginum, hiti, ljós og reingerð o.s. fr. helst ikki hækkar munandi við tað, at raksturin av verandi viðtalum verður fluttur til nýggju viðtaluna, tá gomlu viðtalurnar vera niðurlagdar.

Heilsutrygd er kunnað um ætlanina og metir Heilsutrygd, at hetta er ein góð loysn. Í sjálva innrættingina verða umboð fyri kommunulæknarnar tikin við.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, virkandi tekniski stjórin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla Trivnaðarnevndini til at heimila umsitingini at gera leigusáttmála við útleigaran av Kirkjustræti 2, har leiguprísurin er 1280 kr uttan mvg. fermeturin og at sáttmálin tryggjar at krøvini til kommunulæknaviðtalur eru lokin. Harafturat at seta fígging av til innbúgv, tól o.a. á fíggjarætlanini 2019 og at leggja málið fyri Býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Jákup Dam og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt, vísandi til at minnilutin hevur lagt uppskot fram at byggja nýggj læknahøli.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn samtykti at taka undir við Trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum og vísir á uppskotið hjá minnilutanum um at byggja nýggj læknahøli.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Tróndi Sigurðsson, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus, Helenu Dam á Neystabø, Hallu Samuelsen og Annfinn Brekkstein:

Mælt verður til, at somu tekningar, sum nýttar vórðu í samband við læknaviðtaluhølini í Gundadali verða nýttar í sambandi við útboð í umvendari lisitatión við tí endamáli at byggja nýggj læknaviðtaluhøli á grundøki hjá Tórshavnar kommunu á Oknarvegi.

Broytingaruppskotið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Ruth Vang.

Síðani varð atkvøtt um samtyktina hjá meirilutanum í fíggjarnevndini 20. juni 2018, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri og seks ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

# 154/18 Bústaðarpolitikkur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.03.2017 | 63/17 | 17/00899-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.03.2017 | 63/17 | 17/00899-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 110/17 | 17/00899-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2017 | 141/17 | 17/00899-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 180/17 | 17/00899-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2017 | 203/17 | 17/00899-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.11.2017 | 233/17 | 17/00899-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.12.2017 | 240/17 | 17/00899-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 12.12.2017 | 315/17 | 17/00899-1 |
| 10 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 307/17 | 17/00899-1 |
| 11 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.01.2018 | 6/18 | 17/00899-1 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.05.2018 | 138/18 | 17/00899-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 182/18 | 17/00899-1 |
| 14 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 154/18 | 17/00899-1 |

**Lýsing av málinum:**
Fólkavøkstur og flytimynstur skapa bústaðaravbjóðingar í Tórshavnar kommunu. Seinastu mongu árini hevur fólkavøkstur verið í Tórshavnar kommunu, og sær tað út til, at hendan gongdin vil halda á fram komandi árini. Flytimynstrið broytist somuleiðis støðugt, har tað vísir seg, at fólkið flytur alsamt meiri millum ymisku bútilboðini, í mun til fyrr, tá fólkið einamest ynskti at búgva í sethúsum.

Hvør er leikluturin hjá kommununi? Hvussu tryggjar kommunan nøktandi bústaðarmøguleikar í kommununi?

Ásannandi at Tórshavnar kommuna hevur tørv á einum bústaðarpolitikki, sum tekur støðu til leiklutin hjá kommununi, umframt tekur støðu til hvussu kommunan kann verða við til at tryggja nøktandi bústaðarmøguleikar í kommununi, verður málið reist í byggi- og býarskipanarnevndini til umrøðu og støðutakan um framhaldandi tilgongd.

Fyri at fara undir at gera ein bústaðarpolitikk fyri Tórshavnar kommunu verður mælt til at seta verkætlanarbólk umboðandi fyrisitingarnar. Bústaðarpolitikkurin liggur tætt upp at gerð av kommunuætlanini, og sostatt verður mett, at verkætlanarbólkurin verður umboðandi limir í verkætlanarbólkinum fyri kommunuætlanina. Alt arbeiðið í sambandi við gerð av bústaðarpolitikkinum fer til ummælis og støðutakan í byggi- og býarskipanarnevndini, fíggjarnevndini og endaliga í býráðnum.

Fyrsta stig fyri at gera ein bústaðarpolitikk verður at savna dátur um:
1. Býarvakstrarøkir í kommununi
2. Verandi bústaðarviftu í Tórshavnar kommunu
3. Gjørdar bústaðir í kommununi seinastu árini, býtt á bústaðarslag
4. Væntaður bústaðartørvur
5. Væntaður fólkavøkstur, býtt á aldur og stødd á húskjum
6. Til- og fráflyting og innanhýsis flytingar

Síðani verður farið undir at koma við uppskotum til átøk at nøkta bústaðartørvin. Ávegis bústaðarpolitikkurin verður lagdur fyri byggi- og býarskipanarnevndina til umrøðu áðrenn summarferiuna.

Útreiðslur í samb. við gerð av bústaðarpolitikkinum verða mettar til kr. 150.000 og fíggjaðar av kt. 7315, Kommunuætlan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at gjørdur verður ein bústaðarpolitikkur fyri Tórshavnar kommunu samsvarandi omanfyri standandi, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. mars 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.
Gunvør Balle luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 22. mars 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. mars 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sum liður í tilgongdini at gera bústaðarpolitikkin hevur umsitingin savnað dátur inn, soleiðis at grundarlagið fyri at evna sjálvan bústaðarpolitikkin er nøktandi.

Endaliga dátugrundarlagið er enn ikki liðugt, men er evnað við ymsum hagtølum og framrokningum og verður lagt fyri nevndina at kjakast útfrá, soleiðis at umsitingin til næsta fund kann leggja ein endaligan bústaðarpolitikk fyri nevndina. Víst verður til viðhefta skjal '**Dátugrundarlag –Bústaðarpolitikkur fyri Tórshavnar kommunu**', j.nr. 17/00899-5.

Dátugrundarlagið lýsir:
- Býarmenning seinastu árini
- Bústaðarbygging higartil
- Væntandi fólkavøkstur
- Tey ungu
- Tey eldru
- Til- og fráflyting
- Væntandi framtíðar bústaðartørvur (her mangla framrokningar)
- Fjølbroytt fólkasamanseting
- Leiklutin hjá Tórshavnar kommunu

Uppskot um visjón handan bústaðarpolitikking er at:
*«Allir borgarar í Tórshavnar kommunu skulu hava møguleika at búgva í einum góðum bústaði, í einum góðum býi við fjølbroyttari fólkasamanseting»*

Umsitingin hevur tørv á, at ymisk evnir verða umrødd. Hesi evnir eru:
a) Skal kommunan útvega bústaðir, innan hvørji økir og hvussu skal hetta gerast?
Kommunan hevur í fleiri áratíggju staðið á odda fyri at veita útstykkingar av ymiskum slag, soleiðis at borgarin í kommununi hevur møguleika fyri at búseta seg. Í sambandi við gerð av bústaðarpolitikkinum er spurningurin um hvør leikluturin hjá kommununi

skal vera í framtíðini, soleiðis at tørvurin á  eldrabústøðum, lestrarbústøðum og annars bústøðum verður nøktaður og samstundis tryggjar fjølbroytta fólkasamanseting. Um hugt verður eftir bústaðarviftuni, so sæst at vit eru í undirskoti av íbúðum, sum eisini vísir, at vit í dag ikki hava eina nóg breiða viftu av bústaðarsløgum.

b) Skal kommunan samstarva við ymiskar aktørar?
Tað er týdningarmikið at taka støðu til kostnaðarstøði á bústøðunum í kommununi, og hvussu kommunan kann verða við til at tryggja ein nøktandi kostnað av bústøðum í kommununi, soleiðis at fjølbroytta fólkasamansetingin verður varðveitt. Ymiskir møguleikar eru fyri at samstarva við aktørar uttanfyri kommunala økið. Sí viðheftu fílu '**Samstarv við aktørar**', j.nr. 17/00899-6, um hvussu samstarv kann fremjast við ymiskar aktørar.

c) Skal kommunan samstarva við privatar lendiseigarar?
Sum kunnugt eigur kommunan einans avmarkað lendi, og seinastu árini hevur kommunan víðkað býin við at keypa lendi frá Búnaðarstovuni. Um burðardygg bygging skal raðfestast, so verður neyðugt at kommunan raðfestir bygging innanfyri verandi bý, sum sostatt er við til at tætta um býin. Ein møguleiki at samstarva við privatar lendiseigarar um at útstykkja innanfyri verandi byggiøki, har leiðingar, infrakervið, gerandis hentleikar o.a. longur er á staðnum. Harumframt kann kommunan vera við til at vísa á og hjálpa lendiseigarum við at útstykkja og byggja í samljóð við ynskini í bústaðarpolitikkinum.

d) Hvussu skal kommunan veita lendi til bygging?
Vanligt hevur verið, at kommunan keypir lendi til útstykkingar, men skal kommunan framhaldandi gera hetta ella skal kommunan virka fyri, at lógarheimild verður framd, sum gevur kommununi rætt til at ognartaka lendi til bústaðar bygging?

e) Hvussu skal kommunan handfara burðardyggan tættleika?
Ynski er um at verandi býur eins og aðrir býir í heiminum raðfestir burðardyggan tættleika, soleiðis at kommunan verður savnað, men so sanniliga eisini fyri at minka um íløgu-, rakstrar- og viðlíkahaldsútreiðslur í sambandi við infrakervi, leiðingar, bussleiðina, kavarudding, gerandis hentleikar osfr. Burðardygg menning er somuleiðis varðveiting av fríøkjum, soleiðis at trivnaður í býnum er tryggjaður. Verandi byggisamtykt tryggjar, at avís fríøkir í býnum verða varðveitt, men neyðugt verður at hyggja eftir, um óbygd byggilendi kunnu verða við til at fremja burðardyggan tættleika.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at nevndin umrøður viðhefta tilfar fyri at koma til eina visjón fyri bústaðarpolitikkin og út frá dátugrundarlagnum kjakast um hesar spurningar:
a) Skal kommunan útvega bústaðir, innan hvørji økir og hvussu skal hetta gerast?
b) Skal kommunan samstarva við ymiskar aktørar?
c) Skal kommunan samstarva við privatar lendiseigarar?
d) Hvussu skal kommunan veita lendi til bygging?
Hvussu skal kommunan handfara burðardyggan tættleika?

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2017:** Málið umrøtt og samtykt at umsitingin leggur kjakupprit til bústaðarðpolitikk fyri á næsta fundi.

**Ískoyti:**

Kunnað verður um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Málið varð lagt fram og kjakuppritið kemur í oktober.

**Ískoyti:**
Kjakuppritið fyri Bústaðarpolitikkin er nú liðugt og verður lagt fram.

Bústaðarpolitikkurin er sprottin úr Dátugrundarlagnum fyri Bústaðarpolitikkin, sum lýsir býarmenningina higartil og fólkatals- og bústaðarframskrivingar.

Kjakuppritið lýsir:
- Støðuna í dag
- Visjón og stevnumið
- Tørvsgreining og átaksætlan

Visjónin handan bústaðarpolitikkin er at:

*«Allir borgarar í Tórshavnar kommunu skulu hava møguleika at búgva í einum tíðarhóskandi bústaði, í einum virknum høvuðsstaði við fjølbroyttari fólkasamanseting»*

og stevnumið handan politikkin eru:

*«Pláss fyri fleir - nú og í framtíðini»*

*«Fjølbroytni innan bústaðarslag, -stødd, eigaraviðurskifti og kostnaðarstigi»*

Umsitingin hevur tørv á, at byggi- og býarskipanarnevndin umrøður visjón og stevnumið handan bústaðarpolitikkin og niðanfyristandandi punktir, har greitt verður frá, hvat Tórshavnar kommuna vil viðv. bústaðarbygging, og hvussu hetta verður loyst við støði í teimum omanfyrinevndu stevnumiðum. Sí niðanfyristandandi:

**«Pláss fyri fleir – nú og í framtíðini»**

| **Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU VILJA VIT:** |
|---|
| 1. Hava størri útboð av leigubústøðum |
| 2. At privatir partar gerast ein størri aktørur í leiguíbúðarbyggingini |
| 3. At tað kemur umferð í bústaðarmarknaðin |
| 4. At borgarar kunnu seta búgv í eigarabústaðir |
| 5. At ung støðast í høvuðsstaðnum |

| **HETTA LOYSA VIT VIÐ AT:** |
|---|
| |

1. Kommunan samstarvar við Bústaðir um verkætlanirnar um fleiri leigubústaðir, ið eru í gerð, og arbeiðir við at betra tilgongdina til framtíðar verkætlanir.

2. Kommunan stuðlar undir, at privatir aktørar eisini gerast partur av leigubústaðarbyggingini. Kommunan ynskir at arbeiða fyri, at privata vinnan fær líknandi treytir í mun til atgongd til kommunalt lendi sum Bústaðir, tá tað snýr seg um at byggja leigubústaðir.[3] Í hesum sambandi arbeiðir kommunan við at fáa landsmyndugleikarnar at tryggja, at lógar-grundarlagið stuðlar undir leigubústaðarbygging. Kommunan tekur við leiklutinum sum slóðari stig til at fáa privatar aktørar, so sum byggivinnuna, pensjónsfeløg og fíggingarstovnar at fara í samstarv um at byggja leigubústaðir.

3. Kommunan mælir til, at tað eisini verður bygt rørsluvinarligt, soleiðis at fólk við rørslutarni fáa bústaðir, og at eldri fáa møguleika at sleppa úr stórum sethúsum og inn í minni eldravinarligar (leigu)bústaðir, sum ikki krevja viðlíkahald. Við hesum skapa vit tøk familjuhús og virka fyri at varðveita fleiri barnafamiljur í býnum, og skapa somuleiðis smærri og meiri nøktandi bústaðir til tey eldru. Stuðulsskipan er til at byggja rørsluvinarligar leiguíbúðir.

4. Leypandi menna útstykkingarætlanir til sethúsabygging og blandaða bústaðarbygging, soleiðis at framtíðar býarøki framhaldandi gerast fjølbroytt og til ein breiðan málbólk.

5. Menna útboðið av fyribils bústaðartilboðum, t.d. leiguíbúðir, við tí fyri eyga at eggja og gera tað lættari hjá ungum at flyta til høvuðsstaðin. Harumframt at stuðla undir at fáa fleiri lestrarbústaðir, soleiðis at fleiri ung, sum hava í hyggju at flyta heimanífrá, verða verandi í kommununi.

**«Fjølbroytni innan bústaðarslag, -stødd, eigaraviðurskifti og kostnaðarstigi»**

**Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU VILJA VIT:**

1. Hava ein fjølbroyttan bústaðarmarknað

2. Arbeiða fyri eini býartætting

3. Tryggja grøna umhvørvið í og rundan um verandi og nýggj bústaðarøki

**HETTA LOYSA VIT VIÐ AT:**

1. Tryggja, at framtíðar útstykkingarætlanir í ávísan mun taka atlit at eini fjølbroyttari fólkasamanseting. Fyri at røkka hesum verður í størri mun neyðugt at virka fyri, at íbúðarbyggingin verður raðfest. Í hesi tilgongd skal serlig hædd takast fyri, at vit fáa blandaða bústaðarbygging og ikki býlingar, har ávísir samfelagsbólkar eru í meiriluta. Her skal talan tí vera um bústaðarøki, har bústaðirnir hava blandað eigaraviðurskifti og kostnaðarstøði.

2. Vísa á lendismøguleikar og tøkar bygningar í verandi býi, og seta krøv t.d. við at broyta serstøku byggisamtyktirnar fyri hesi øki, soleiðis at framtíðar bústaðarbyggingin verður tættað. Lendi inni í býnum eru sera avmarkað og kostnaðarmikil. Kommunan eigur sjálv avmarkað lendi í verandi býi, men hesi eru ikki samanhangandi og liggja oftani uppat privatum lendi (sí Mynd 11). Fyri at skapa ein burðardyggan tættleika í býnum, vil kommunan eggja privatum eigarum at byggja bústaðir, har leiðingar, infrakervi, gerandis hentleikar o.a. longu eru á staðnum. Kommunan kann vera við til at vísa á og hjálpa lendiseigarum at útstykkja og byggja í samljóð við ynskini í bústaðarpolitikkinum.

3. Skráseta og góðskumeta grønu økini í býnum, sum kunnu mennast til at gerast virkin grøn fríøki til gagns fyri trivnaðin í býnum og ikki at nýta gott dyrkilendi til bústaðarbygging. Hetta er eisini ein partur av Grønu ætlan, sum kommunan er í holt við at dagføra.

Harafturat skal støða takast til, um *Bústaðarpolitikkurin* skal leggjast út til almenna hoyring. Við eini almennari hoyring kann politikkurin gerast meiri fólksligur, og borgarar í Tórshavnar kommunu kunnu fáa eina kenslu av at vera ein partur av útinnanini av politikkinum.

Skjøl:
Bústaðarpolitikkur, journal nr. 17/00899-21

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla nevndini til at nevndin umrøðir visjónina fyri bústaðarpolitikkin og omanfyristandandi punktir og at taka støðu til um bústaðarpolitikkurin skal leggjast út í almenna hoyring fyri síðani at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2017:** Útsett.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og virkandi býararkitekturin mæla til, at nevndin umrøður visjónina fyri bústaðarpolitikkin og omanfyristandandi punktir, at taka støðu til um bústaðarpolitikkurin skal leggjast út í almenna hoyring fyri síðani at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, at taka hjáløgdu kort, síðu 28, 29 og 34, úr og at umsitingin kemur aftur við einum hoyringsleisti.

**Ískoyti:**
Á seinasta fundi í byggi- og býarskipanarnevndini varð samtykt at taka undir við omanfyristandandi tilmæli, og at hjáløgdu kort á síðu 28, 29 og 34, vórðu tikin úr skjalinum. Hetta er nú gjørt, og umsitingin er farin í holt við at kanna møguligar hoyringsleistir. Ein endaligur leistur verður at leggja fram á fyrsta fundi í komandi ári.

**Skjøl:**
*Bústaðarpolitikkur og fylgiskjøl 11. des. 2017*, journal nr. 17/00899-24

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið til umrøðu av omanfyristandandi visjón, stevnumið og átaksætlan, fyri síðani at leggja bústaðarpolitikkin út til almenna hoyring fyrst í komandi ári, tá umsitingin er komin við einum hoyringsleisti.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. desember 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. desember 2017:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Umrøtt og fer til hoyringar.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur samansett ein hoyringsleist til bústaðarpolitikkin og evnað eitt skjal um talgilda borgaraluttøku. Sambært skjalinum 'Talgild borgaraluttøka', verður rokkið út til flestu borgarar í teimum ymsu aldursbólkunum við at sameina talgilda og fysiska luttøku.

*Borgarafundir*
Fyri at røkka málbólkin 50+ er neyðugt við einari sameining av talgildum mannagongdum, kjakfundum, prentaðum kunningartilfari og lýsingum í útvarpi og sjónvarpi.

Málbólkurin 35-50 ár møtir vanliga ikki upp til fundir, men tað vísir seg, at tey eru meiri hugaði til kjak á almennum fundum heldur enn á alnótini. Tó kann hugsast, at júst hetta evnið kann fáa fleiri av hesum at møta upp, orsakað av at hetta er eitt sera viðkomandi evni fyri yngri málbólkarnar.

Mælt verður til, at ein borgarafundur verður hildin í Finsen og í Hoyvík. Somuleiðis kann hugsast um møguliga at hava ein borgarafund á Argjum. Til borgarafundin verður mælt til:
- at hava eitt fólk til at stýra kjakinum
- at fáa eitt fólk til at skriva viðmerkingar niður
- at hava tónleikainnsløg, sum hóska til høvið og sum draga fólk til tiltakið
- at lýsa við borgarafundi á facebook, heimasíðu, KVF

**Filmur**
Fyri at gera tað lætt hjá borgarum at fáa innlit og kunning um bústaðarpolitikkin, verður mælt til, at talgilda hoyringin verður lýst við einum stuttfilmi, sum lýsir kjarnuevnini í politikkinum. Uppskot til ein stuttfilm:
- stuttfilmur við flottum og dragandi filmsbrotum
- tónleikur (ikki frásøgufólk). Vísandi til skjalið 'Talgild borgaraluttøka' síða 25, hyggja 95% av facebook-brúkarum eftir youtube-brotum uttan ljóði. Tryggjast skal, at stuttfilmurin er skiljandi og kemur til sín rætt.
- til ber at hava tekst um kjarnuevnini í politikkinum, sum lýst verða við greiðum spurningum til borgaran, sum soleiðis lýsa hugsanina hjá borgarunum.

Hugsanin er síðani at leggja stuttfilmin sum eina youtube-útgávu á:
- facebooksíðuna hjá Tórshavnar kommunu
- facebookbólkar hjá eigarafeløgum og á bólkin "Fjølbroyttir bústaðarmøguleikar"
- smá brot á Instagram vangamyndina hjá Tórshavnar kommunu, sum somuleiðis verða løgd út á facebook við Instagram
- www.torshavn.fo fyri at røkka út til tíðindamiðlarnar

Á henda hátt er møguligt at fáa viðmerkingar v.m. frá borgarum. Harafturat ber til at vísa til prentaði eintøk av politikkinum í Snarskivuni og talgilda politikkin á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu, har borgarin eisini hevur møguleika at koma við viðmerkingum.

Týdningarmikið er, at Tórshavnar kommuna svarar øllum viðkomandi viðmerkingum á facebook og instagram skjótast gjørligt, tí á henda hátt verða uppsløg tikin í álvara.

**Skjøl:**
Talgild borgaraluttøka, journal nr. 17/00899-28.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at taka undir við

hoyringsleistinum omanfyri, sum verður framdur við kunnandi borgarafundum, einum stuttfilmi, lýsingum á heimasíðuni, sosialu miðlunum, í útvarpi og sjónvarpi, umframt at sjálvur bústaðarpolitikkurin verður lagdur út á heimasíðuna hjá Tórshavnar kommunu og prentaði eintøk verða at fáa í Snarskivuni.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Bústaðarpolitikkurin hevur ligið til almenna hoyring í 3 mánaðir. Fleiri enn 200 fólk hava møtt upp til teir fýra borgarafundirnar, sum hava verið hildnir í Finsen, skúlanum á Argjahamri, skúlanum við Løgmannabreyt og í Nólsoy, og kommunan hevur móttikið áleið 50 skriftligar viðmerkingar.
Viðmerkingarnar hava verið ymiskar. Nógvar viðmerkingar hava verið ítøkiligar, aðrar um ávís viðurskifti, sum hava ligið uppat bústaðarpolitikkinum. Fleiri viðmerkingar hava verið frá fólki, sum annaðhvørt vanta ella ynskja annan bústað. Eisini eru fólk komin við góðum hugskotum og íblástri til bústaðarviðurskiftini í kommununi. Viðmerkingarnar eru flokkaðar, og svar til viðmerkingarnar verða løgd út á heimasíðuna.

Viðmerkingarnar liggja til grunda, nú endaligi bústaðarpolitikkurin skal leggjast fyri politisku nevndirnar aftur. Serliga eru viðurskifti viðvíkjandi infrakervi (s. 9 í politikkinum) og bústaðir til eldri (s. 24 í politikkinum) nágreinað, og stytt er sum heild um tekstin í politikkinum.

**Skjøl:**
*Bústaðarpolitikkur fyri Tórshavnar kommunu (j.nr.17/00899-34)*

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at góðkenna broytingarnar í politikkinum, at samtykkja bústaðarpolitikkin og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

## 155/18 Íbúðarbygging undir Kongavarða

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.05.2018 | 139/18 | 18/01973-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 184/18 | 18/01973-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 155/18 | 18/01973-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kommunuætlanini og bústaðarpolitikkinum fyri Tórshavnar kommunu eru visjónirnar fyri kommununa, at fleiri bústaðir skulu gerast í miðbýnum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tað eru bygd 5 íbúðarhús Undir Kongavarða og sambært uppruna ætlanini fyri økið, so er pláss fyri trimum íbúðarhúsum afturat sunnanfyri verandi hús.

Tórshavnar kommuna eigur matr. nr. 255a, Argir, og tað ber væl til at halda áfram við byggingini av íbúðarhúsum.

Verandi íbúðarhús eru bygd av einum privatum byggiharra. Húsini eru í 6 hæddum við íalt 10 íbúðum í hvørjum húsi.

Tað er umráðandi at tey 3 punkthúsini, sum verða bygt afturat, verða gjørd samsvarandi heildarætlanini fyri alt økið. Tað vil siga at húsini í stødd koma at svara til tey húsini sum eru har og í útsjónd fella væl inn í økið.

<u>Slag av íbúðum:</u>

Dømi 1:
Allar ella minst helvtin av íbúðunum verða leiguíbúðir sum eru rørsluvinarligar og at hetta verður gjørt eftir sama leisti sum við verkætlanini 'Íbúðarbygging á Frúutrøð', í sambandi við bygging, fígging og umsiting.

Hetta merkir, at tey sum bjóða uppá verkætlanina helst eru toymi samansett við ráðgevum, umboð frá byggivinnuni, íleggjarum og møguliga eisini persónum/fyritøkum, ið kunnu umsita leiguíbúðirnar.
Verkætlanin verður boðin út alment í undangóðkenning (prækvalifikatión) og kunnu øll, sum lúka ávísar treytir, koma við eini áhugafráboðan, soleiðis at fleiri fáa møguleikan at bjóða uppá verkætlanina.
Vinnandi tilboðsgevi fær optión uppá lendið, og ein søla verður ikki framd, fyrr enn kommunan hevur góðkent eitt liðugt verkætlanaruppskot. Verður ongin verkætlan innan eitt ásett tíðarskeið t.d. 2 ár, ella um kommunan ikki kann góðkenna verkætlanina, fellur optiónin burtur og ongin søla fer fram.

Dømi 2:
At grundstykkið verður boðið út alment til at byggja 3 íbúðarhús á, sum verða í 6 hæddum, við uml. 10 íbúðum í hvørjum húsi.

Kommunan skal gera eitt útbjóðingartilfar, við ymiskum treytum, ynskjum og ásetingum um m.a.:
- Slag av bygging, stødd, útsjónd o.a.

- Vegatkoma, parkering, fríøkir, leiðingar o.a.
- Ávirkan á økið, eigarafelag o.líkn.
- Tíðarætlan fyri bygginginа
- Kostnaður
- Útlutan av íbúðum
- V.m.

Á hendan hátt kann verkætlanin skjótt bjóðast út og ein byggiharri kann skjótt fara í gongd við bygginginа.

Bæði dømini omanfyri stuðla væl undir visjónunum hjá kommununi um at fáa til vega fleiri bústaðir, við støði í fjølbroyttum bústaðarmøguleikum og við einum breiðum borgaraskara. Møguleiki fyri at eldri ella rørslutarnað kunnu búgva á økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í umráðispartinum A3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Sambært ásetingunum ber ikki til at gera útstykkingar í A3 uttan við serstakari byggisamtykt og neyðugt er eisini við serstakari byggisamtykt fyri at byggja í 6 hæddum.

**Umhvørvisárin**
Flokkur 1

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ikki verið hjá øðrum enn.

**Skjøl**
Tekning av øki at frámatrikulera (kemur til fundin).

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | x |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at eitt passandi øki verður frámatrikulerað til at byggja 3 íbúðarblokkar á, at umsitingin ger uppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið at leggja fyri nevndina aftur, at umsitingin ger uppskot til útbjóðingartilfar eftir dømi 2 omanfyri, at leggja fyri nevndina aftur og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskippanarnevndini og beina málið í býráðið

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

# 156/18 Bústaðarskylda

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.05.2018 | 151/18 | 18/01975-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 183/18 | 18/01975-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 156/18 | 18/01975-1 |

**Upprunin til málið:**
Fleiri hús í Havnini standa tóm, og serliga er tað í ávísum pørtum av havnini, sum t.d. í gomlu Havnini. Býarskipanarliga er hetta tyngjandi fyri trivnaðin og sosiala virksemið í einum býi, tí einki lív er í einum grannalagi ella myrkt er í vindeygunum, tá ongin býr í einum húsi ein part av árinum. Býarskipanardeildin hevur skrásett ognir í miðbýnum, har eingin er skrásettur at búgva - sí kortskjøl; *Yvirlit – eingin skrásettur á bústaðnum* journal nr. 18/01975-2 og *Kort – eingin skrásettur á bústaðnum* journal nr. 18/01975-3.

Í løtuni verða nógvir nýggir bústaðir bygdir í kommununi, og fyri at lofta trupulleikanum við tómum húsum, sum somuleiðis kann gerast ein størri trupulleiki í nýggju býlingunum, er málið vorðið búgvið til at taka spurningin viðvíkjandi bústaðarskyldu upp aftur til viðgerðar.

Føroyar gerast somuleiðis eitt alsamt meiri áhugavert ferðavinnumál, og kann roknast við, at hús verða keypt til ferðavinnu endamál, heldur enn at vanligi føroyingurin fær ognað sær eini hús í Tórshavnar kommunu.

Bústaðarskyldan er ein háttur at basa trupulleikanum við at fleiri hús standa tóm, men eisini kann ljós varpast á møguleikan, at áseta ein form fyri ognarskatt á hús nr. 2 hjá fólki.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Sum nú er, ásetur kommunan bústaðarskyldu í servituttin á ognini, sum er ein privat avtala millum keypara og kommununa. Avbjóðingin við hesum er, at tað ikki finst nøkur mannagongd fyri, hvussu kommunan handhevjar hesa avtalu ella hvørjar avleiðingarnar eru, um avtalan ikki verður fylgd.
Í høvuðsheitum er trupulleikin tann, at tað finst ongin føroysk lóg, sum heimilar kommunum at áleggja bústaðarskyldu á ognir í kommununi – tað eru bert bøndur og prestar, sum hava bústaðarskyldu Føroyum.

- Tað verður ógvuliga trupult/kanska ógjørligt uttan lóggávu at áleggja bústaðarskyldu á verandi ognir/bústaðir – sum hava bygt/keypt undir øðrum treytum. Tí er spurningurin, um talan ikki einans kann vera galdandi fyri keyp og sølu av húsum eftir at bústaðarskylda er komin í gildi?

- Skal bústaðarskyldan verða tengd at einum ávísum persóni? Ella skal eigarin av ognini hava skyldu til at tryggja, at onkur býr/leigar í bústaðnum eitt ávíst tíðarskeið um árið.

- Mælt verður til at heita á Kommunufelagið, um at kanna um tað kann áleggjast bústaðarskylda í byggisamtyktum.

- Spurningurin um bústaðarskyldu er ein spurningur, sum Løgtingið má geva heimild fyri við lóg.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Einki

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Bústaðarskylda á Reyni 2013-2551* journal nr. 14/00802

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Einki

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Frá løgdeildini:
Í Danmark er heimild fyri beinleiðis ”bústaðarskyldu” at finna í landbrugsloven. Her hevur eigarin av landbrúki skyldu at búgva á landbrúksognini. Líknandi ásetingunum í føroysku lógini um embæti og størv í fólkakirkjuni.
Harumframt hevur Danmark eina “boligreguleringslóg”, ið kommunurnar sjálvar gera av, hvørt tær seta í gildi. Okkum kunnugt, hava flestar kommunur í Danmark sett nevndu lóg í gildi.
Boligreguleringsloven gevur donsku kommununum sera inntrívandi møguleikar fyri at tryggja, at fólk eru í flest øllum bústøðum í kommununi. Boligreguleringslógin fevnir um allar bústaðir – tað verur seg almenna ella privata ogn.
Bústaðarskylda vil siga, at tú skalt hava adressu í fólkayvirlitinum á staðnum, har ognin liggur. Sostatt hava eigarar, sambært donsku boligreguleringsloven, skyldu at búgva (skrásettir í fólkayvirlitinum) í ogn síni, um ikki, kann verða álagt eigarum at leiga út ogn sína, og harvið tryggja, at fólk býr í ognini.

**Skjøl**
*Bústaðarskylda á Reyni 2013-2551* journal nr. 14/00802-6
*Yvirlit – eingin skrásettur á bústaðnum* journal nr. 18/01975-2
*Kort – eingin skrásettur á bústaðnum* journal nr. 18/01975-3

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávísøkir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | | x | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | x | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og virkandi tekniski stjórin mæla til at umrøða málið, at heita á Kommunufelagið og landsmyndugleikarnar at taka málið upp aftur til viðgerðar og at koma við uppskoti til eina skipan og mannagongdir, sum kommunurnar kunnu arbeiða út frá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2018:** Samtykt at heita á landsins myndugleikar um at útvega kommununi lógarheimild at lýsa bústaðarskyldu á útvaldum økjum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.
Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Samtykt við sjey atkvøðum fyri, tveimum ímóti og fýra blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Jákup Dam, Bogi Andreasen, Gunvør Balle og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddu: Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus.

# 157/18 Frílendi í Hoydølum - skýli á matr. nr. 58a, Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2017 | 220/17 | 17/03502-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 273/17 | 17/03502-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 39/18 | 17/03502-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 80/18 | 17/03502-1 |
| 5 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 66/18 | 17/03502-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.05.2018 | 142/18 | 17/03502-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 186/18 | 17/03502-1 |
| 8 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 157/18 | 17/03502-1 |

**Upprunin til málið:**
Frílendisætlanin í Hoydølum, politisk ætlan fyri dalin framvið Hoydalsá, j. nr. 14/00813-13.

**Lýsing av málinum - samandráttur**
At byggja tvinni skýli til frítíðarvirksemi, sokallaði "shelters" har fólk kunna søkja sær skjól. Bygningarnir eru 2,75 m x 3.65 m x 1,5 m, timbur við flagtaki.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ætlaða byggingin er í Hoydølum í umráðisparti D1, við serstakari byggisamtykt frá 1996, harumframt eru ásetingar um náttúrufriðing (skriv er sent náttúrufriðingarmyndugleikanum) og fráleika til stórar áir. Søkjast skal somuleiðis um byggiloyvi.

Staðsetingin av skýlunum liggur innanfyri viðarlundaøkið, ásetingarnar í serstøku byggisamtykt eru:

*8. gr.* ***Bygging, stødd, staðfesting og skapilsi húsanna o.a.***
*a. Á økinum skal ikki verða bygt.*
*b. Tó kann á økinum A í frámerkta D3-partinum verða bygt til almennar stovnar (skúla) aftur at verandi bygningum eftir ætlan, sum byggimyndugleikin og náttúru- og skógfriðingarmyndugleikarnir hava góðkent.*
*c. Á økinum C kunnu verða bygdir amboðsskúrar til urtagarðsrøkt, í mesta lagi 10 m² til víddar og eftir nærri góðkendum reglum.*

*11. gr.* ***Undantaksloyvi frá byggisamtyktini og broytingar í henni.***
*Byggimyndugleikin kann geva loyvi til smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt, um so er, at dámurin av náttúruøkinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa og varðveita, verður ikki broyttur av teirri orsøk.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Liggur á matr. nr 58a, trøð í Hoydølum, um 13.600 m$^2$ til víddar. Trøðin er partur av makaskiftinum við Mentamálaráðið og skúladepilin Glasir, ið er partur av lendisætlanini fyri ovastu Hoydalar. Makaskiftisskeytið liggur til avgreiðslu hjá løgdeild kommununnar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Bygging av tveimum skýlum uml. 20 m$^2$ tilsamans

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

Ongin viðmerking

**Umhvørvisárin**
Umhvørvisflokkin 0

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Mentamáladeildin metir at slík skýli kunnu viðvirka til at gera tað enn meiri áhugavert og hugaligt at ferðast eftir lendisgøtunum tað verið seg við rørslu ella ítrótti fyri eyga, bæði hjá einstaklingum og bólkum. Sum eitt ískoyti til verkætlanina kundi verið umhugsað at framleitt okkurt slag av kunning ella upplýsing um t.d. nátturu, mentan v.m., ið er viðkomandi í mun til økið. Eitt nú kunning um frílendisætlanina, vøkstur ella djóralív í økinum ella eitt hvørt forvitnisligt innan mentan, siðsøgu v.m.

**Skjøl**
TK journal nr. 17/03502-3 Shelter_skitsa 1
TK journal nr. 17/03502-3 Shelter_skitsa 2
TK journal nr. 17/03502-3 Shelter_skitsa 3
TK journal nr. 17/03502-3 Shelter_konstruktión 1
TK journal nr. 17/03502-3 Shelter_konstruktión 2
TK journal nr. 17/03502-3 Shelter_mát
TK journal nr. 17/03502-3 Krógv (framløga)
TK journal nr. 17/03502-4 Serstøk byggisamtykt fyri økið fram við Hoydalsá_kort
TK journal nr. 17/03502-5 Frílendisætlanin_framløga

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvis avleiðingar** | | x | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Eftir ætlan verða tvey skýli gjørd fyri ávikavist 80.000 kr. stykkið.

Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til, at játtaðar verða 160.000 kr. av verkætlan L62023 “Frílendið við Hoydalsá” til at fremja verkætlanina ultimo 2017 og primo 2018.

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 160.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 80.000 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato 2017-2018 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | Á | | Av | | Lokað | |
|---|---|---|---|---|---|---|

| Upphædd íalt | Deild | Verkætlan | | Deild | Verkætlan | | verkætlan | Eykajáttan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dkk 160.000 | 6275 | Gomul | | 6275 | L62023 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at játta kr. 160.000 av verkætlan L62023 "Frílendið við Hoydalsá" til verkætlanina at fremja tvinni skýli ultimo 2017 og primo 2018, at heimila umsitingini at biðja Skógrøkt um gerð av arbeiðinum, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina at umrøða og endurskoða útsjóndina á skýlunum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur umrøtt útsjóndina á skýlunum, sum eru evnaði til staðsetingina og umhvørvið, og gjørt smærri tillagingar í mun til útsjóndina og myndina av ætlaða skýlinum, sí skjalið *skýli,* journal nr. 17/03502-8.

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin vísir til tilmælið omanfyri, har mælt verður til at játta kr. 160.000 av verkætlan L62023 "Frílendið við Hoydalsá" til verkætlanina at fremja tvinni skýli primo 2018, at heimila umsitingini at biðja Skógrøkt um gerð av arbeiðinum, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Atkvøtt varð um uppskot frá Annfinni Brekkstein at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð einmælt samtykt.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur enn einaferð umrøtt útsjóndina á skýlunum, hesaferð saman við leiðarinum á Skógrøktini. Peningur er tøkur til uppruna sniðið, men um útsjóndin skal broytast, so er talan um størri upphædd enn hana, sum er játtað.

Grundað á ójøvnu undirtøkuna og dýrkanina av verkætlanini, um sniðið skal broytast enn meira, mælir umsitingin til at sleppa ætlanini, og heldur at nýta tær 160.000 kr til gøtugerð í økinum.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at sleppa verkætlanini um fremjan av tvinni skýlum, at játta tær 160.000 kr. til gøtugerð í Hoydølum/Ternuryggi av L62023 – frílendið við Hoydalsá og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipananrnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

## 158/18 Umsókn um brúksrætt til økið norðanfyri gøtuna niðan til Tølthøllina burtur av Flætnahaga, tað ið verður nevnt Lítlafjall (2008-1137)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 167/17 | 17/02742-21 |
| 2 Tekniska nevnd | 07.11.2017 | 62/17 | 17/02742-21 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2017 | 218/17 | 17/02742-21 |
| 4 Tekniska nevnd | 28.11.2017 | 71/17 | 17/02742-21 |
| 5 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 317/17 | 17/02742-21 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.01.2018 | 5/18 | 17/02742-21 |
| 7 Mentamálanevndin | 11.12.2017 | 336/17 | 17/02742-21 |
| 8 Fíggjarnevndin | 17.01.2018 | 18/18 | 17/02742-21 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.06.2018 | 153/18 | 17/02742-21 |
| 10 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 206/18 | 17/02742-21 |
| 11 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 158/18 | 17/02742-21 |
| 12 Tekniska nevnd | 20.06.2018 | 42/18 | 17/02742-21 |
| 13 Mentamálanevndin | | | 17/02742-21 |

**Umsókn frá felagnum Føroysk Ross, um øki, har felagið kann seta upp fjós og hava skipaðar umstøður fyri rossunum.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Anna Louisa Joensen: Umsókn um brúksrætt til økið norðan fyri gøtuna niðan til Tølthøllina burtur av Flatnahaga, tað ið verður nevnt Lítlafjall 2008-1137/10 SG

Umboð fyri umsøkjaran koma inn at greiða frá málinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16.juni 2008:** Kunnað var um málið.

**-Ískoyti:**
Nýggj staðseting er gjørd til øki til Føroysk Ross, vísandi til fundin tann 16. juni 2008.

Flatnahagi er ogn hjá Tórshavnar kommunu og liggur sum 4. grundumráði í byggisamtyktini

Økið er uml. 27.700 m til víddar burtur av Flatnahaga matr. nr. 1160a, norðanvert Tvøránna og Kráarheyggj, sí hjálagda kortuppdrátt av økinum.

Leigarin ella brúkarin av Flatnahaga, Júst Rubeksen, skal hava fráboðan um broytingina, og sáttmálin við hann lagast til nýggju viðurskiftini.

Atkomuvegur er eftir trønni hjá fyrr Jákupi á Dul sála, sum nú er lutað sundur í traðarbrúk og er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

**Tilmæli:**
Býarargartnarin mælir til at staðseta økið her, og at løgdeildin skipar fyri avtalu um brúksrættindi við Føroysk Ross.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. oktober 2008:** Samtykt at taka undir við staðsetingini og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini, og at gera uppskot til leigusáttmála at leggja fyri fíggjarnevndina á næsta fundi.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til leigusáttmála millum Tórshavnar kommunu og Føroysk Ross. Av tí, at ætlanin hjá umsøkjaranum er at byggja bygning á leigaða økinum verður mett, at leigumálið má ganga yvir 25 ár.

Hetta letur seg bert gera, um økið, ið ætlanin er at leiga umsøkjaranum, verður frábýtt, tí sambært matrikullógini er ikki loyvt at lata øðrum til brúks partar av einum føstum eigindómi longur enn 10 ár.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla fíggjarnevndini til at góðkenna fyriliggjandi leigusáttmála og taka undir við, at økið, ið ætlanin er at leiga umsøkjaranum, verður frábýtt matr. nr. 1160a, Tórshavn og fær sjálvstøðugt matr. nr.

**Fíggjarnevndin 19. november 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum til 25 ára leigusáttmála.

**Býráðið 27. november 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**-Ískoyti:**
25 ára leigusáttmáli um eitt øki í Flatnahaga, part av matr. nr. 1160a, Tórshavn er sendur felagnum Føroya Ross til undirskrivingar.

Felagið Føroya Ross hava við skrivi dagfest 25. apríl 2009, j.nr. 2009-1364, biðið um at fáa eitt øki, ið liggur uppat hinum feløgunum, tí tey meta at tað økið sum tey hava fingið er ov dýrt at gera byggibúgvi. Tey vísa á økið sum liggur millum Føroya Ríðingarfelag og Íslandsrossafelagið.

Kommunan hevur við skrivið dagfest 29.05.2009 svara aftur, at nevnda økið sum talan er um, er partur av øki, sum Býráðið í 2006 samtykti at leiga til Føroyskt Íslandsrossafelag og at tað tí ikki ber til at ganga umsóknini á møti.

Borgarstjórin hevur biðið um at fáa málið á skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. juni 2009:** Nevndin samtykti at umsitingin kannar eftir um tað ber til at finna eitt annað øki.

**Ískoyti III:**
Anna Louisa hevur í telefonsamrøðu við byggideildina og formansskapin í byggi- og býarskipanarnevndina ynskt, at hon kann hava sítt rossavirksemi í Dølum í Kirkjubø. Í og á økinum har, sum tað gamla vakstrarhúsið stendur.

Matrikul nr. 37-3b Kirkjubøar bygd
Eigari av økinum er Føroya Jarðargrunnur
Festari er Dorthea Winther
Brúkari er Sjúrður Patursson

Eigari av vakstrarhúsinum er Høgni Jensen (HJ)

Vídd á matrikul nr. 3b er uml. 14.000 m²
Vídd á vakstrarhúsi er uml. 1400 m²
Byggisamtykt fyri økið er C1A: Vinnuendamál, vinnuvirki við matvøruframleiðslu og tænastuvirksemi í hevur samband við hetta.

Tórshavnar kommuna eigur ikki økið, og byggisamtyktarásetingarnar fyri økið eru ikki samsvarandi við ynskinum hjá felagnum Føroys kRoss.

Í telefonsamrøðu við Føroysk Ross v/ A.L. Joensen, 14. september 2009, sigur ALJ, at hon hevur avtalað við eigaran av vakstarhúsinum HJ, at felagið kann verða har í vetur. Økið norðanvert vakstarhúsið er áhugavert, liggur væl fyri til atkomu við alfara veg. Gamli vegurin til Kirkjubøar liggur her. Umsøkjarin umhugsar at taka upp samband við Búnaðarstovuna um møguleikan at skipa virksemi á hesum staðið. Byggisamtyktin fyri tað økið er § 13, K, Landbúnaður. Ì tann mun at Matrikulstovan kann góðtaka, at virksemið hjá felagnum er í samsvari við ásetingarnar fyri hagan, og Búnaðarstovan og festarin eisini taka undir við hesum, er staðseting her ein møgulig loysn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at vísa á nevnda økið sum ein býarskipanarligan møguleika.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. september 2009:** Nevndin samtykti, at umsitingin setir seg í samband við umsøkjaran um formligu viðurskiftini í sambandi við staðsetingina í Dølum í Kirkjubø.

**Ískoyti:**
Síðani omanfyristandandi hava fleiri staðsetingar verið í uppskoti. Tað hevur ikki rokkið á mál.

Nú er nýggj staðseting funnin og umsókn er send kommununi, har FAFU (Felagið Alarar av Føroyskum Upprunarossum) søkir um lendið til fjósbygging til føroysk ross. Økið, uml. 5.600 m$^2$, liggur úti í Havnardali dygst eystanfyri leiguøkið, sum Føroya Ríðingarfelag hevur, sí skjalið *FAFU øki.*

Fundur var við FAFU, har umsitingin vísti á eitt lendi til fjósbygging. FAFU hevur síðani kannað viðurskiftini viðvíkjandi tí økinum, sum kommunan vísti á sum ein møguleika, men meta tey ikki, at tey fíggjarliga kunnu megna at gera økið byggibúgvið. Felagið hevur tí hugt eftir møguligum øðrum loysnum.

Umsitingin hevur verið á staðnum og hugt eftir lendinum, ið søkt verður um. Mett verður, at økið er egnað til endamálið. Vegasamband og veitingar, vatn, kloakk v.m. er í grannalagnum. Ávísir víðkanarmøguleikar eru til rossavirksemi og er høvuðsynskið hjá býarskipan at rossavirksemið er samlað. Ætlaða staðsetingin er eisini í tráð við býarplanleggingina.

Lendið liggur í 4. grundumráði, og neyðugt verður at endurskoða og broyta byggisamtyktina fyri økið.
Uppskot til leigusáttmála er gjørt við FAFU, sí skjalið *sáttmáli*, journal nr. 17/02742-25.

**Skjøl:**
*FAFU øki*, journal nr. 17/02742-27

*Sáttmáli,* journal nr. 17/02742-25

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla nevndini til at góðkenna lendið, ið søkt verður um, treytað av at byggisamtyktin verður broytt, at góðkenna uppskotið til leigusáttmála, og at beina málið í mentamálanevndina, teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Tróndur Sigurðsson, samtykti at senda málið til hoyringar hjá Felagnum Føroysk Ross, Føroya Ríðingafelag og Føroyskt Íslandsrossafelag.

Ein minniluti, Bogi Andreasen og Helena D. á Neystabø, tekur undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Trý hoyringssvar eru frá: FR. Føroya Ríðingarfelag, FÍ. Føroyskt Íslandsrossafelag og FFR Felagið Føroysk Ross.

Viðmerkingarnar fevna um rættargildi/legitimitet hjá FAFU sum felag. At talan ikki er um veruligt felag, og at felagið av hesum ikki hevur rætt at tillutast øki á nevnda stað. Eisini verður ivast um álvarsemi og skynsemi í teirra virksemi at umgangast ross.

Formaður FAFU sigur, at felagið er ikki skrásett enn, men at arbeitt verður at skráseta felagið. Viðtøkur eru gjørdar.

FAFU hevur peikað á nevnda økið sum egnað til teirra virksemi.

Umsitingin metir ikki, at viðmerkingarnar hava steðgandi virkna, men at loyvi skal verða treytað av, at byggisamtyktin verður broytt, at felagið verður skrásett, og at uppskotið til sáttmála skal góðkennast, so at øll formlig viðurskifti eru avgreidd, áðrenn endalig avtala verður gjørd um leigumál.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at góðkenna lendið, ið søkt verður um treytað av, at byggisamtyktin verður broytt, at felagið verður skrásett, at góðkenna uppskotið til sáttmála, og at beina málið í mentamálanevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 07. november 2017:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2017:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Helena Dam á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin vísa til samtyktina í byggi- og býarskipanarnevndini.

**Tekniska nevnd 28. november 2017:** Ein meiriluti, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal, samtykti at mæla byggi- og býarskipanarnevndini til at taka málið upp til nýggja viðgerð vísandi til at hoyringin vísir á stór ivamál um, hvørt hetta er røtt staðseting til ætlaða virksemið.

Ein minniluti, Bogi Andreasen, vísir til samtyktina í byggi- og býarskipanarnevndini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein luttók ikki i viðgerðini av málinum.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 11. desember 2017:** Samtykt at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina við tí grundgeving, at hoyringsskrivini vísa á ivamál um ætlaðu staðsetingina.

**Ískoyti:**
Í sambandi við innkomnu hoyringssvarini, sum vísa á ivamál um ætlaðu staðsetingina, so metir umsitingin ikki, at viðmerkingarnar hava steðgandi virkna. Ivamálini í hoyringssvarunum eru í stuttum:

- at talan ikki er um eitt veruligt og formligt felag (ikki skrásett), og at mælt verður til at fáa hoyringsskriv frá Búnaðarstovuni
- at økið er vindhart og liggur tætt upp at bygdum øki
- at viðurskiftini í sambandi við rossahald møguliga ikki altíð hava verið góð og skipaði

Vísandi til tilmælið frá fundinum í byggi- og býarskipanarnevndini tann 8. november 2017, verður mælt til, at loyvi einans verður givið treytað av, at FAFU gerst eitt skrásett felag, t.v.s. at talan verður um eitt formligt felag.

Frástøðan frá bygdum øki til lendið, ið søkt verður um, er áleið 70m. Verður hugt eftir leigumálinum hjá Føroya Ríðingarfelag, so liggur avmarkingin væl tættari upp at bygdum øki, umframt at leigumálið fevnir um sama slætta, sum í hoyringsskrivinum verður at meta sum eitt vindhart øki. Harumframt mæla verandi feløg sjálvi til at víðka um verandi virksemið á sama umbidna lendi.

Umsitingin tekur ikki støðu til viðurskifti í sambandi við rossahald, tí hetta ikki hevur ávirkan á staðsetingina.

Harumframt verður víst á, at FAFU hevur fingið stuðul til ryssufjós, bygt í haganum hjá Eyðfinn Dalsgarð. Í skrivi frá FAFU, *Partsinnlegg og rættleiðing til hoyringsskriv ísv umsókn um lendi til fjós til FAFU*, verður víst á, at fjósið er bygt, soleiðis at tað lættliga kann flytast á lastbili, um betri staðseting finst.

Ávísir víðkanarmøguleikar eru til rossavirksemið úti í Havnadali, og er høvuðsynskið í sambandi við býarskipanarlig viðurskifti, at rossavirksemið er samlað á einum stað. Ætlaða staðsetingin er eisini í tráð við býarplanleggingina. Umsitingin mælir tí til, at loyvið skal verða treytað av, at byggisamtyktin verður broytt, at felagið verður skrásett, og at uppskotið til sáttmála skal góðkennast, so at øll formlig viðurskifti eru avgreidd, áðrenn endalig avtala verður gjørd um leigumál.

**Skjøl:**

- Partsinnlegg og rættleiðing til hoyringsskriv ísv umsókn um lendi til fjós til FAFU, journal nr. 17/02742-45

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at halda fast í tilmælinum frá 8. november 2017, at góðkenna lendið, ið søkt verður um treytað av, at byggisamtyktin verður broytt, at felagið verður skrásett, at góðkenna uppskotið til sáttmála, og at beina málið í teknisku nevnd, mentamálanevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. januar 2018:** Samtykt at útseta málið til felagið er skrásett, ein ítøkilig ætlan fyriliggur um virksemið og hvussu økið verður skipað og at allir partar eru hoyrdir.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Á seinasta fundi í byggi- og býarskipanarnevndini tann 16. januar 2018 varð samtykt at útseta málið, til felagið varð skrásett og fleiri upplýsingar vórðu sendir kommununi í sambandi við eina ítøkiliga ætlan og skipan av økinum.

Í skrivi til kommununa, sí skjalið *Upplýsingar um FAFU,* leggur felagið FAFU m.a. soleiðis fram:

- Felagið FAFU er nú skrásett í vinnuskránna hjá TAKS.

- FAFU hevur valt at tillaga ta fyrst umhugsaðu byggiætlanina nakað, sí kortskjalið *FAFU_Skipan av økinum*. Í staðin fyri tvey smærri fjós verður ein minni ríðihøll bygd, umleið 18-20 metrar breið og umleið 30-35 metrar long, sum básar eftir tørvi kunnu innrættast í. Síðurnar á høllini verða ætlandi 3 metrar høgar.

- Ynski er at staðseta høllina sum ferhyrningurin við krossi á kortskjalinum. Kring bygningin verða fest útigonguøki við haldgóðum gyrðingum. Fyri vestan og ovarlaga á tí merkta økinum á kortinum, dygst í vegin, sum gongur niðan til fyrrverandi vatnbrunnin, og áraka matr. 1160e verður atkoma og parkeringspláss.

- Fjarstøðan frá ætlaðu høllini til kloakkveiting er uml. 35 metrar, til vatnveiting uml. 45 metrar og til elveiting 95 metrar.

- Í fyrstu atløgu verða tøðini sópað upp í ein tættan trailara við loki og verða tøðini eftir avtalu við nærhendis festarar breidd í hagan í støðum, har hetta ikki er til ampa fyri innsavnan av drekkivatni ella fyri umhvørvið annars.

- Sum frá líður, tá fígging til tað gerst tøk, og við loyvi frá Tórshavnar kommunu, er seinni ætlanin at útvega eina lokaða, luktfría skipan til kompostering av tøðunum.

**Skjøl:**
*FAFU_Havnardalur*, journal nr. 17/02742-55
*FAFU_Skipan av økinum*, journal nr. 17/02742-56
*Upplýsingar um FAFU*, journal nr. 17/02742-60

**Tilmæli:**

Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at halda fast í tilmælinum frá 8. november 2017, at góðkenna lendið, ið søkt verður um, treytað av:
- at byggisamtyktin verður broytt
- at øll loyvi frá Tórshavnar kommunu og øðrum myndugleikum verða fingin til vega
- at sáttmáli verður gjørdur millum umsøkjaran og kommununa

og at beina málið í teknisku nevnd, mentamálanevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. juni 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Helena Dam á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minnilluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 20. juni 2018:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Turið Horn, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018**: Ein meirilutin Annika Olsen, Turið Horn og Gunvør Balle tekur undir við Teknisku nevnd.

Ein minniluti Annfinn Brekkstein og Tróndur Siguðsson tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Atkvøtt varð um uppskot frá Anniku Olsen um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð einmælt samtykt.

# 159/18 Støðutakan um leingjan av sáttmálanum við Sp/f Gundurs Bussar um framhaldandi koyring av bussleiðini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 14.03.2017 | 21/17 | 17/00267-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.03.2017 | 66/17 | 17/00267-2 |
| 3 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 104/17 | 17/00267-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 05.06.2018 | 39/18 | 17/00267-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 185/18 | 17/00267-2 |
| 6 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 159/18 | 17/00267-2 |

**Málslýsing:**
Tórshavnar kommuna hevur sáttmála við Sp/f Gundur´s bussar um rakstur av bussleiðini í Tórshavnar kommunu, tíðarskeiðið er frá 1. apríl 2011 - 1. apríl 2018. Àseting er í sáttmálanum við Sp/f Gundur´s bussar um leingjan av sáttmálanum. Tórshavnar kommuna hevur møguleika í sáttmálaskeiðinum at leingja sáttmálanum í eitt ár í senn, upp til tvey ár.

Grein 3 í sáttmálanum ásetur, at Tórshavnar kommuna skal boða arbeiðstakaranum, sum er Sp/f Gundur´s bussar, frá, um sáttmálaskeiðið verður longt, í seinasta lagi eitt ár áðrenn sáttmálin gongur út ella við styttri freist, um partarnir semjast um tað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at leingja sáttmálan við Sp/f Gundur´s bussar í 1 ár. Ì hesum tiðarskeiðinum verður arbeitt við at fyrireika og gera nýtt útbjóðingartilfar til Bussleiðina. Eisini skal samráðast við Sp/f Gundur´s bussar um broytingar av sáttmálanum og serliga broytingar í farleiðunum.

**Tekniska nevnd 14. mars 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. mars 2017:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við teknisku nevnd og leingja sáttmálan við Sp/f Gundur's Bussar í 1 ár. Í hesum tíðarskeiðinum verður arbeitt við at fyrireika og gera nýtt útbjóðingartilfar til Bussleiðina. Eisini skal samráðst við Sp/f Gundur's Bussar um broytingar av sáttmálanum og serliga broytingar í farleiðunum í longda tíðarskeiðinum.

**Býráðsfundur 30. mars 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sáttmálin við Sp/f Gundur´s bussar loyvir, at hann verður framlongdur við einum ári í senn, upp til tvey ár. Núverandi sáttmáli gongur út 1. apríl 2019 og skal Sp/f Gundurs bussar í seinasta lagi hava svar áðrenn 1. juli 2018, um sáttmálin verður framlongdur við einum ári afturat.

**Tilmæli:**

Virkandi tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at leingja sáttmálan við Sp/f Gundur´s bussar við 1 ári afturat, fram til 1. apríl 2020 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 05. juni 2018:** Samtykt at leingja sáttmálan við 6 mðr. afturat fram til 1. oktober 2019 ella, um tað ikki ber til, fram til 1. apríl 2020.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

# 160/18 Umsókn um at broyta byggisamtyktina í sambandi við matr. nr. 1292f og 1292a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 38/18 | 18/00747-3 |
| 2 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 65/18 | 18/00747-3 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.05.2018 | 144/18 | 18/00747-3 |
| 4 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 160/18 | 18/00747-3 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar kommuna hevur fingið umsókn um at byggja hotell á matr. nr. 1292f og 1292a, við Oknarvegin.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við ætlanir um at byggja hotell við Oknarvegin skal marknaumskipan fara fram millum matr. nr. 1292f, Tórshavn og matr. nr. 1292a, Tórshavn, sambært skjal nr. *18/00747-4 – Marknaumskipan.*

Matr. nr. 1292f og 1292a, Tórshavn liggja í øki A1 og C3 í 3. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Fyri at marknaðarumskipa matriklarnar og fyri at loyvi skal kunna verða at byggja hotell í økinum, má alt økið broytast til C3 øki.

Býarskipanardeildin metir, at hetta hóskar seg væl, av tí tað verður ein natúrlig leinging av tí C3 økinum, sum longu er. Hettar hevur eisini við sær eina meira natúrliga avmarking av A1 økinum, ið liggur eystanfyri økið, sum ætlanir eru at byggja hotell á.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru millum annað:

1. *Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.*

Ásetingar fyri C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru millum annað:

1. *Umráðisparturin verður í síni heild lagdur til miðstaendamál, t.e. handlar, skrivstovuhøli, ráðleggingarvirki og tænastuvirki, ið hava samband við hetta. Loyvt er eisini at byggja skúlar, almennar stovnar og íbúðir.*

Umframt at økið, eftir broyting, liggur C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, liggur økið eisini í serstøku byggisamtykt nr. 3, B1 og eru ásetingar har millum annað:

> *Eindirnar B1, B2 og B3 kunnu bert verða nýttar til handilsbúðir, skrivstovur, fyrisiting, heilsubótarhøli, byggingar til mentanar-endamál (bókasavn, kykmyndahøll o.a.) og tílíkt.*

Sostatt er eitt hotell ikki í stríð við ásetingarnar fyri C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, ella ásetingarnar fyri B1 øki í serstøku byggisamtykt nr. 3.

**Skjøl**
18/00747-2 – *Ávegis myndugleikauppskot_smallsize*

18/00747-4 – *Marknaumskipan*
18/00747-5 – *Hotel Oknarvegur – fyri broyting*
18/00747-5 – *HotelOknarvegur – eftir broyting*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | | | | |
| Umhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☒**

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin mælir til at góðkenna uppskotið um at broyta almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu sambært kortskjølunum og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti**:
Í sambandi við almennu hoyringina av broytingini í byggisamtyktini hevur Tórshavnar kommuna fingið eitt mótmæli. Mótmælarin mótmælir ætlanini at broyta A1-øki til C3-øki og orsøkin er:

1. *"Partur av bóndahúsinum á eystara Húsagarði (ofta nevnd Mexico) eru millum tey elstu húsini í Havn. Guðrun Rubeksen, sum var bóndadóttur á Húsagarði, hevur sagt mær, at tann lægra lonin er bygd í 1670-árunum. Seinri er bygt upp í húsini... Eftir mínum tykki eru húsini friðingarverd.*
*Húsagarður var í fleiri hundrað ár á Húsabrúgv, men í 1939 vórðu bóndahúsini tikin niður og flutt niðan í Gundadal, sum lá til Húsagarð. Orsøkin var hon, at tað var ikki hildið at vera hóskiligt, at ein bóndagarður við fjósi og køsti lá miðskeiðis í Havnini. Nýtt fjós varð bygt í Gundadali. Og hetta fjósið var millum fyrstu nútímans fjósini í Føroyum. "*

2. *"Nú er næstan eingir grønir blettir eftir í sjálvari Havnini. Tí eigur hesin bletturin at fáa frið. Tað er higartil eydnast at varðveita ein grønan geira frá gomlu ognini hjá Torvald Poulsen niðan til Húsgararð. Talan er um eina heild, sum hevur eitt estetiskt viðrið, og sum eigur at liggja sum ein grønur geiri fram við R.C. Effersøesgøtu. "*

Ad. 1 – Bóndahúsini á Húsagarði eru ikki á listanum hjá Tjóðsavninum yvir friðaðir bygningar og er ikki fevnt av løgtingslógini nr. 11 um friðan av fornminnum og bygningum. Í Tórshavnar býaratlasi, sum er ein skráseting av varðveitingarvirðum í Tórshavn, sum býráðið lat gera í 2007, eru bóndahúsini ei heldur skrásett sum varðveitingarverd.

Tó hevur umsitingin samskift við savnsarkitektin á Tjóðsavninum, har ynski varð lagt fram at fáa skrásett bygningin, at møguliga fáa fatur á tilfarinum ella at fáa flutt húsini. Umsitingin fer ikki inn yvir hetta, men vísir á, at Tjóðsavnið kann í samráð við eigaran av bóndahúsinum gera avtalu um skráseting, tilfar og at fáa húsini flutt.

Ad. 2 – Matr. Nr. 1292a og 1292f liggja frammanundan í C3 og A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er øki ætlað bygging. Sostatt ávirkar hendan broytingin í almennu byggisamtykini fyri Tórshavnar kommunu ikki tær ætlanir, ið eru fyri grøn øki í býnum.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at halda fast við broytingini, sum samtykt á býráðsfundi 22. mars 2018 og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Bogi Andreasen, samtykt at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, taka undir við tilmælinum, men mæla til at senda málið til Fornminnismyndugleikarnar.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Atkvøtt varð um uppskot frá Marin Katrinu Frýdal um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð einmælt samtykt.

| | **Býráðsfundur**<br>20. juni 2018 | Blað nr.: 603<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 161/18 Orkuumvæling í Svimjihøllini – Knýta svimjihøllini í fjarhita

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.05.2018 | 150/18 | 18/01992-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 181/18 | 18/01992-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 161/18 | 18/01992-1 |
| 4 Býráðsfundur | | | 18/01992-1 |

**Upprunin til málið:**
Sí niðanfyri.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við at fjarhita leiðingarnar eru lagdar niðri í Gundadali verður arbeitt við at knýta kommunalu bygningarnar í fjarhitan hjá Fjarhitafelagnum, í 2018 er ætlanin at knýta svimjihøllini í Fjarhitan. Svimjihøllin hevur størstu orkunýtslu av teimum kommunalu bygninginum.

Kostnaðarmetingin fyri samlaðu verkætlanina er 1.135.000,- kr.

Húsaumsitingin hevur avsett 135.000,- kr. til hesa orkuumvælingina í 2018.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Eingir

**Upplýsingar frá umsitingini**
Eingir

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Eingin

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Eingir

**Umhvørvisárin**
Svimjihøllin fær grøna orku, og hetta minkar um $CO_2$ útlátið uml. 9 ferðir

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Eingir

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

Tórshavnar Kommuna hevur avtalu við Magn, ið inniber at oljukostnaðurin er lægri enn fjarhitakostnaðurin er í løtuni. Tað merkir, at svimjihøllin fær ein eyka kostnað fyri raksturin av fjarhitanum.

Harafturímóti verður minni viðlíkahald av tí man sleppur undan skorsteininum, ketlinum og oljutanganum.

**Tilmæli:**

Virkandi tekniski stjórin og leiðarin á Húsaumsitingini mæla til at játta 1.0 mió. til hesa verkætlan av 6177, sum er ætlað ESCO Orku og umhvørvistiltøk.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býraðið til tvær viðgerðir, sum eykajáttan.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini og játta kr. 1,0 mió. av konto 6177.

# 162/18 Arbeiðsbólkur at endurskoða reglurnar um samsýning av kommunustýrislimum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 200/18 | 18/01897-1 |
| 2 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 162/18 | 18/01897-1 |
| 3 Býráðsfundur | | | 18/01897-1 |

**Upprunin til málið:**
Til tess at lýsa, um samsýningarnar til kommunustýrislimir eru á einum hóskandi støði í mun til arbeiðsøki og ábyrgd, mælir borgarstjórin til at seta arbeiðsbólk at endurskoða samsýningarnar og arbeiðsumstøðurnar annars hjá kommunustýrislimum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við, at alsamt fleiri uppgávur eru lagdar føroysku kommununum at umsita, er arbeiðsøkið hjá kommunum víðkað og sostatt eisini arbeiðsuppgávurnar og ábyrgdin, ið eru álagdar limunum í føroysku kommunustýrunum.

Kommunustýrislimir verða samsýntir sambært kunngerð nr. 93 frá 9. september 2014 um samsýning o.a. sambært kommunustýrislógini. Kunngerðin hevur heimild í § 9 í kommunustýrislógini, løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.

Síðani kommunustýrislógin kom í gildi 1. Januar 2001 er kunngerðin um samsýningar broytt nakrar ferðir, seinast 9. september 2014.

Síðani tá er eitt nú eldraøkið lagt til kommunurnar at umsita, og borgarstjórin metir, at tað hevði verið hóskandi at endurskoða reglurnar, ið kommunustýrislimir verða løntir eftir.

Tá ið reglurnar um samsýning av landsstýris- og tingfólkum hava verið endurskoðaðar, hevur ein óheft nevnd gjørt hesa endurskoðan og tilmælið hesum viðvíkjandi til Løgtingið.

Á sama hátt – og soleiðis, at kommunustýrislimir ikki sjálvir skulu gera tilmæli um, hvussu limir í kommunustýrunum skulu samsýnast – verður mælt til at seta eina óhefta nevnd við serkønum innan lønar- og kommunustýrisviðurskifti at endurskoða reglurnar um samsýning av kommunustýrislimum og gera tilmælið til fíggjarnevndina um, hvørjar broytingar, nevndin heldur, eiga at verða gjørdar í hesum reglum.

Nevndin skal í arbeiði sínum m.a. taka støði í tí veruleika, at kommunurnar umsita fleiri málsøki í dag, enn tær gjørdu áður, og at arbeiðsbyrðan og ábyrgdin hjá kommunustýrislimum er økt.

Mælt verður til, at nevndin skal viðgera spurningin um, hvørt:

- verandi upphæddir í kunngerðini um samsýning av kommunustýrislimum eiga at verða reguleraðar í mun til ábyrgd og tign hjá kommunustýrislimum.
- tað er rætt at rinda eftirløn av samsýningini til kommunustýrislimir.
- borgarstjórarnir skulu samsýnast og hava eftirløn samsvarandi landsstýrisfólkum/løgmanni

- aðrar tillagingar av reglunum og arbeiðsumstøðunum hjá kommunustýrislimunum eiga at verða gjørdar.

Tað er ikki býráðið sjálvt, ið hevur heimild at broyta reglurnar um samsýning av kommunustýrislimum. Fíggjarmálaráðið hevur ábyrgdina av hesum reglum, og arbeiðið hjá óheftu nevndini skal tí vera grundarlag undir einari møguligari áheitan á Fíggjarmálaráðið um at endurskoða kunngerðina um samsýning av kommunustýrislimum.

Í tann mun, nevndin kemur við tilmælum um at broyta kunngerðina um samsýningar til kommunustýrislimir, og Fíggjarmálaráðið tekur undir við einari áheitan frá Tórshavnar kommunu um at gera uppskotnu broytingarnar, verður mælt til, at broytingarnar fáa virknað frá komandi býráðsvalskeiði.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.
Kunngerð nr. 93 frá 9. Septemver 2014 um samsýningar o.a. sambært kommunustýrislógin
Kommunustýrisskipanin fyri Tórshavnar kommunu

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | 300.000 kr. | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Borgarstjórin mælir til at seta eina óhefta nevnd við serkønum innan lønar- og kommunustýrisviðurskifti at endurskoða reglurnar um samsýning av kommunustýrislimum, og hvørt tað er hóskiligt at gera aðrar tillagingar av arbeiðsumstøðunum hjá

kommunustýrislimum og at játta kr. 300.000 av konto 20910 sum eykajáttan til arbeiðið hjá nevndini.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 300.000 til arbeiðið hjá nevndini sum eykajáttan og beina málið í býráðið, har tað krevur tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

## 163/18 Skúlin á Fløtum - hølisviðurskifti (Realskúlin)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 308/17 | 17/03883-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 3/18 | 17/03883-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 06.02.2018 | 58/18 | 17/03883-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 08.02.2018 | 70/18 | 17/03883-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 90/18 | 17/03883-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 11.04.2018 | 129/18 | 17/03883-2 |
| 7 Mentamálanevndin | 23.04.2018 | 150/18 | 17/03883-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 24.04.2018 | 130/18 | 17/03883-2 |
| 9 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 82/18 | 17/03883-2 |
| 10 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 167/18 | 17/03883-2 |
| 11 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 139/18 | 17/03883-2 |
| 12 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 114/18 | 17/03883-2 |
| 13 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 163/18 | 17/03883-2 |
| 14 Býráðsfundur | | | 17/03883-2 |

**Upprunin til málið:**
Uppskot frá skúlastjóranum í Skúlanum á Fløtum um, hvussu høli í skúlanum kunnu skipast.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í oktober var dialogfundur millum leiðsluna í Skúlanum á Fløtum og umboð fyri mentamáladeildina. Eitt evni á fundinum var hølisviðurskiftini. Skúlin á Fløtum húsast í hesum seks eindum: í Kongagøtu (garðinum hjá Frk. Cohr), í Fríðrik Petersens gøtu, við Landavegin, á Frælsinum/Handan Á, á Argjavegi og í Gundadali.

Frá februar 2018 fer ein stova at vanta í í Gundadali, tí skúlin skal úr gamla húsinum hjá Fótbóltssambandinum. Í gamla húsinum er ein 8. flokkur, tað er ikki pláss fyri honum í hølunum, sum verða leigað í bygninginum hjá Fótbóltssambandinum.

Næmingatalið í komandi 9. 8. og 6. árgangi. er ov høgt. Hesir árgangir hava verið fýra spor, tá skúlarnir vórðu lagdir saman og so koma tvey spor aftrat úr Sankta Frans skúla, sostatt er neyðugt við hølum til ávikavist fýra og seks flokkar í hesum árgangum.

Tað er tørvur á einum høli á uml. 20 $m^2$ í veghædd til Litir í Leiki, tí tað riggar ikki so væl, at frítíðarskúli og Litir í Leiki hava tað eina fyribilshølið í Kongagøtu í felag, tí har eru stór og dýr ljóðføri inni.

Sum er, er skúlin á  nógvum matriklum, so tað er ikki ein loysn at finna høli aðrastaðni enn, har skúlin er framman undan. Skúlin hevur víst á møguleikan at fáa Realskúlan aftur, nú Heilsuhúsið flytur haðani.

Skúlastjórin hevur sent uppskot um eina loysn. Sambært hesum uppskoti, fær Skúlin á Fløtum  Realskúlan, og hann verður so brúktur til 3. flokk, og soleiðis verður øll grunddeildin savnað í Kongagøtu. Í hesum bygningi er eisini pláss fyri virkseminum hjá Litum í Leiki, sum nú er í tí eina fyribilshølinum í garðinum hjá frk. Cohr. Um forskúli verður stovnaður skúlaárið 2019/2020 hevði kanska borið til, at hann var í Realskúlanum saman við fyrsta flokki. Men ivasamt er, um tað er nóg gott pláss til tríggjar flokkar aftrat í bygninginum.

Um bert ein árgangur verður í Realskúlanum, so er pláss til annað virksemi eisini t.d. býarsavn.

Um skúlin fær ein part av Realskúlanum, soleiðis at pláss er fyri einum árgangi og Litum í Leiki har, so ber til at flyta úr Gundadali og siga leigumálið upp. Sambært leigusáttmálanum kann leigumálið tó í fyrsta lagi sigast upp til 01.04.2019.

Skúlin metir ikki, at tað er so umráðandi, at fótbóltsflokkarnir hava høli í Gundadali, tí tað er gott busssamband og lætt at koma aftur og fram í sambandi við undirvísing og venjing á vøllunum í Gundadali.

Útreiðslurnar til leigu fyri hølini í Gundadali eru 24.540 kr. um mánaðin. Um tað ber til at siga leigumálið upp til juli 2018, so kann skúlin byrja at flyta, tá skrivligu próvtøkurnar eru síðst í mai og flyta útgerð og innbúgv úr hølunum. Skíggjar og talvur verða so settar upp í Kongagøtu, og neyðugt er ikki við nýíløgu til útgerð og innbúgv.

Skúlin og frítíðarskúlin hava skrivstovu í Móttøkuhúsinim, og heilsufrøðingurin hevur eisini høli har. Um skúlin fær høli í Realskúlanum, ber væntandi til at flyta úr Móttøkuhúsinum. Skrivstovurnar kunnu kanska vera á loftinum og heilsufrøðingurin í somu hølum, sum hann var í, tá skúlin var í Realskúlanum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | | | | |
| Unhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at umrøða uppskotið.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti**

Foreldraumboðini í skúlastýrinum í Skúlanum á Fløtum taka undir við uppskotinum hjá skúlaleiðsluni, at Skúlin á Fløtum fær Realskúlan at ráða yvir, og umboðini heita í teldubrævið dagfest 11. desember 2017 á Tórshavnar kommunu at bera so bandi, at tað ber til at savna grunddeildina í miðbýnum.

Í teldubrævinum frá foreldraumboðunum í skúlastýrinum í Skúlanum á Fløtum stendur m.a. "Tað sum vit meta vera serliga átrokandi í hesum uppskoti er, at skúlin fær hølini í Realskúlanum saman við bygningunum í Kongagøtu at ráða yvir.
Vit meta, at tað er neyðugt at savna alla innskúlingina og tilboðini, ið eru tengd at henni, á einum stað.
Her hugsa vit um frítíðarskúlan, ein møguligan komandi forskúla, Litir í Leiki og at 1.-3.fl. ið náturliga hoyra saman, eru staðsettir saman."

Umsitingin metir ikki, at Realskúlin er egnaður til ein árgang á tríggjar flokkar umframt forskúla og mælir tí frá at skipa forskúla har.

3. flokkur skúlaárið 2018/2019 var í eindini á Frælsinum í fyrsta flokki, er fluttur í eindina Kongagøtu hetta skúlaárið og skal so flyta aftur næsta skúlaár, um skúlin ikki fær høli í Realskúlanum. Um so verður, verður skúlin á somu matriklum um nú, og 3. flokkur fer so væntandi í eindina í Fríðrik Petersensgøtu.

Uttan mun til hvat annað virksemi verður í Realskúlanum er umráðandi, at Litir í Leiki fær eitt høli í bygninginum, og hølið má vera í veghædd.

Tá 8. F skal úr gamla FSF húsinum í vár, flytur hann í eindina á Frælsinum. Tað er ikki besta loysnin, tí har verður hann saman við miðdeildini, tað sum er eftir av hesum skúlaárinum.

Um Skúlin á Fløtum fær Realskúlan, eru tveir møguleikar. Annar er at siga leigumálið við Fótbóltssambandið upp, og hin er, at skúlin fer úr eindin í Fríðrik Petersensgøtu, sum so kann brúkast til okkurt annað virksemi. Verður leigumálið sagt upp, so verða skúlaárið 2018/2019 fýra flokkar í eindini í Fríðrik Petersensgøtu. Tað verða ítróttaflokkarnir, sum verða tveir 8. flokkar og tveir 9. flokkar. Hinir flokkarnir í hesum árgangum verða antin í eindini á Frælsinum ella í eindini á Argjavegi. Skúlin hevur ikki tikið endaliga støðu til tað enn.

Til tess at fremja hesa ætlan, er neyðugt við ávísum tillagingum í bygninginum. Húsaumsitingin greiðir nærri frá neyðugu tillagingunum.

Víst verður í hesum sambandi eisini til mál 17/03897 Bráðfeingistørvur á dagstovnaplássum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at umrøða ætlanina við skúla í realskúlanum.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Málið umrøtt.

**Ískoyti**
Síðan seinasta fund er komin teldupostur frá foreldraumboðunum í skúlastýrinum í Skúlanum á Fløtum við áheitan at lata Skúlan á Fløtum hava økið við Kongagøtu og Realskúlan í tvey ár afturat. Teldupostur dagfestur 24. januar 2018 við áheitanini er hjálagdur.

Umsitingin vísir til mál um bráðfeingis plásstørv á dagstovnøkinum j.nr. 17/03897, har avgjørt er, at dagstovnur verður skipaður í realskúlanum, harumframt eisini høli til Litir í leik hjá Skúlanum á Fløtum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin lata nevndini skrivið til kunningar.

**Mentamálanevndin 06. februar 2018:** Útsett.

**Mentamálanevndin 08. februar 2018:** Samtykt at heita á umsitingina at kanna møguleikan fyri at hýsa 3. flokki í Skúlanum á Fløtum í umhvørvinum við Kongagøtu og Finsen.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur kannað møguleikan at finna onnur høli í nánd av Skúlanum í Kongagøtu, soleiðis at øll grunddeildin í Skúlanum á Fløtum kann verða á einum stað.

Hølini í kjallaranum í Finsen út móti Tórsgøtu, sum eru ætlað til café, eru ikki tikin í nýtslu enn. (Tekning er hjáløgd). Har eru nøkur arbeiði, sum ikki eru liðug, t.d. ljós, el-stikk, radiatorar, partur av gólvinum og okkurt er eftir at mála. Samskifti er við Bústaðir um, at hesi arbeiðið verða gjørd. Haraftrat verður neyðugt at gera skilaveggir í café-økinum – ein við dupulthurð, ið býtir høli í tvey og ein út móti gongini. Hølini til undirvísing mugu lúka vanlig krøv til ljóðviðurskifti.

Um møguligt verður at leiga hesi høli til Skúlan á Fløtum, er neyðugt, at skúlin eisini fær høli 1.01 í Realskúlanum til undirvísing.

Ætlanin er, at tveir flokkar verða í Finsen og ein í Realskúlanum, og at Litir í Leiki kunnu so haraftrat brúka 1.01, tá flokkurin ikki brúkar tað hølið, og haraftrat gomlu sangstovuna í Finsen.

Í kjallaranum í Finsen verða tvey flokshøli (café-økið verður býtt sundur til tvey flokshøli), og gongin verður brúkt til felagsøki. Høvuðsinngongdin verður í tunlinum undir Auluni í Finsen, og hølið, sum er avmerkt til starvsfólk verður brúkt til bólka- og samrøðurúm. Hølið sum er avmerkt til inngongd til sunnaru stovuna.

Hølini mugu vera klár til undirvísing 15. august í 2018. Innbúgv og kt-útbúnaður skal bíleggjast. Veitingartíðin er uml. tríggjar mánaðir og uppsetingin eini tvær vikur, sostatt er neyðugt, at hølini eru klár 1. august.

Skúlin útvegar innbúgv og talvur til hølini í Realskúlanum og talvur til hølini í Finsen. Tórshavnar kommuna útvegar innbúgv, amboð og gardinur til flokshølini í Finsen, innbúgv til karnapparnar, mottir og gaderobu við inngongdina. Kostnaðarmetingin fyri hetta er 300.000 kr.

Leigan fyri kjallaran í Finsen verður ætlandi greið innan medio mars. Ætlandi skal møguliga leigumálið byrja 1. juli 2018.

Á fundinum verður greitt frá tilgongdini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Tekstur kemur týsdagin.

**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Ískoyti**
Bústaðir bjóðar kommununi at leiga høli í Finsen til Skúlan á Fløtum. Leigumálið er fyri tvey ár. Leigukostnaður er ikki endaliga ásettur.

Litir í Leiki heldur í løtuni til í sangstovuni í Finsen, og tí er undirvísingin hjá Musikkskúlanum í kontrabassi eisini flutt úr fyribilshølunum í garðinum hjá Frk. Cohr og í sangstovuna í Finsen.

Um skúlin fær høli í Finsen og eitt høli í Realskúlanum, so øll grunddeildin verður savnað í umhvørvinum við Kongagøtu, eru tríggir møguleikar lýstir niðanfyri, um hvussu skúlin kann skipa grunddeildina.

*a. Fyrsti flokkur í Finsen*
Skúlaárið 2018/2019 eru 46 næmingar skrivaðir inn í fyrsta flokk í Skúlan á Fløtum, og er tað bert grundarlag fyri tveimum flokkum. Sostatt ber til, at fyrsti árgangur verður í hølunum í Finsen, og hinir báðir árgangirnir í grunddeildini verða verandi í Kongagøtu. Skúlin á Fløtum fær so eingi høli í Realskúlanum, og Litir í Leiki heldur fram í sangstovuni.

Vansin við hesi loysn er, at hon forðar fyri møguleikanum at stovna ein flokk aftrat í Skúlanum á Fløtum, um so skuldi verið, at næmingatalið veksur, og Mentamálaráðið játtar kommununi at stovna ein flokk aftrat í hesum árgangi.

Ein annar vansi er, at klædnagoymslan hjá frítíðarskúlanum er í Kongagøtu.

Aftrat hesum kemur, at skúlin hevur roknað við at kunna brúka starvsfólkarúmið í Kongagøtu til starvsfólk burtur av og ikki til serundirvísing, fundir o.a. Tí við hølunum í Finsen og í Realskúlanum var møguleiki at brúka tað eina undirvísingarhølið til serundirvísing, bólkarúm, fundir o.a.

Í Finsen er eitt rúm í lonini út móti Sjúrðargøtu, sum kann verða brúkt til serundirvísing. Vansin við tí er, at børnini skulu út fyri at koma til hølið. Tað er tó beint tvørtur um garðin, so úr skúlastovunum í Finsen er talan bert um at fara tvørtur um garðin, men úr bygninginum í Kongagøtu er nakra longri, og talan er jú um ta yngstu deildina í skúlanum.

*b. Triði flokkur í Finsen og Realskúlanum*
Næmingatalið 2018/2019 í triðja árgangi er 61, og talan er sostatt um tríggjar flokkar.

Fyrimunir eru, at 3. árgangur verður i Finsen og í 1.01 í Realskúlanum, tí hann er tann elsti árgangurin, kennir umhvørvið væl, megnar best at flyta seg í umráðnum, fara til felagstiltøk í bygninginum í Kongaøtu og fara oman í útiøkið hjá skúlanum og Grasagarð, hóast tað er eitt sindur longri at fara enn úr bygninginum í Kongagøtu.

Her ber eisini væl til at gera royndina, at tann eini flokkurin, Litir í Leiki-næmingarnir, verða í Realskúlanum í eini stovu við vanligum innbúgvi, sum skúlin tekur við úr eindini í Fríðriks Petersensgøtu. Møguleikin er so at gera royndir við øðrvísi innbúgvi í Finsen og brúka royndirnar frá tí, tá innbúgv verður keypt til nýggja bygningin úti á Fløtum.

Um 3. árgangur verður í Finsen og Realskúlanum, verður eitt flokshøli tøkt í Kongagøtu, sum so kann verða brúkt til serundirvísing, bólkarúm, fundarhøli o.a. Hesi høli mangla í eindini í Kongagøtu.

Vansarnir við hesi loysn eru, at 3. árgangur ikki er savnaður í sama bygningi, og at tann eini flokkurin heldur til í hølum í einum bygningi, sum ein dagstovnur er í. Tað er ivasamt, um tað er sambæriligt, at skúli og dagstovnur húsast í sama bygningi og so tætt hvørjum øðrum.

*c. Triði flokkur í Finsen*
Tað ber til at savna 3. árgang, um skúlin umframt hølini við caféøkið fær hølið í Finsen á horninum Tórsgøta/Sjúrðargøta til flokshøli. So verða allir tríggir flokkarnir í hesum árgangi á sama stað, og loysnin við hesum hølum gevur møguleika fyri betri samanhangi, tí hølini eru í sama bygningi, á somu hædd og inngongdin er úr sama tunli.

Við hesi loysn verður eisini tað eina hølið í Kongagøtu tøkt, og tað ber til at skipa serundirvísingsøkið har og bøta munandi um starvsfólkaviðurskiftini, soleiðis at starvsfólkarúmið verður starvsfólkarúm burtur av.

Henda loysnin ávirkar hølisviðurskiftini hjá Listgrafiska verkstaðnum, sum ætlanin var skuldi halda til í Finsen í hølinum á horninum móti Tórsgøtu/Sjúrðargøtu. Her er tó annar møguleiki, har Listgrafiska verkstaðið fær onnur høli í ovaru fimleikahøllini og tilhoyrandi hjáhølum í Finsen, sum ætlaði eru til myndlistaverkstøð (sí mál 17/01361).

*Annað*
Uttan mun til hvør loysnin verður, er neyðugt, at Litir í Leiki framhaldandi kann nýta sangstovuni í Finsen, til skúlin flytur á sumri 2020.

Tað verður ikki neyðugt at játta eyka til útreiðslur til el og hita til hølini í Finsen, tí skúlin hevur játtan til eindina í Fríðriks Petersensgøtu, og tær útreiðslurnar hevur skúlin ikki, tá hann flytur úr bygninginum.

Skúlin tekur ikki undir við loysn a: at fyrsti flokkur er í Finsen. Við hesi loysn missir skúlin munandi meir enn hann fær, sostatt gevur tað ikki meining at flyta úr eindini í Fríðriks Petersensgøtu, og skúlin vil so heldur halda fast við bygningin í Fríðriks Petersensgøtu. Tað

triðja undirvísingarhølið er ein treyt, sum skúlin heldur fast við. Haraftrat metir skúlin, at tað er rættast, at fyrsti og annar árgangur eru í Kongagøtu, tí teir árgangirnar ganga í frítíðarskúla, og frítíðarskúlin brúkar eisini hølini í Kongagøtu.

Skúlin tekur heldur ikki undir við loysn b: at triði árgangur er í Finsen og í hølinum 1.01 í Realskúlanum, tí skúlin metir, at avbjóðingarnar við, at skúli og dagstovnur eru í sama bygningi, og hølini eru síð um síð, eru ov stórar.

Skúlin tekur undir við loysn c: at 3. árgangur fær caféøkið og hølið á horninum Tórsgøta/Sjúrðargøta í Finsen.

Skúlin leggur dent á, at hølisviðurskiftini hjá starvsfólkunum í Kongagøtu eru ikki í lagi, tí serundirvísing, starvsfólkarúm og fundarhøli eru í sama høli, eitt høli sum er 20 $m^2$ . Nú bert tveir 1. flokkar verða í Skúlanum á Fløtum, ber til at bøta um hesi viðurskifti við at skipa alt serøkið í eindini í Kongagøtu í einum flokshøli í Kongagøtu.

Samanumtikið tekur skúlin hvørki undir við loysn a ella b, skúlin tekur undir við loysn c., og um tað ikki ber til at fáa triðja flokshøli í Finsen, ynskir skúlin at verða verandi í Fríðriks Petersensgøtu.

Við loysn c. verður bygningurin í Fr. Petersensgøtu 9 tøkur til annað endamál.

Um avgjørt verður at fremja ætlanina at savna triðja árgang í Finsen, verður tørvur á fígging til ymiskt innbúgv o.a., umframt til leigukostna til Bústaðir fyri hølini. Leigukostnaðurin verður væntandi tøkur til fundin mánadagin. Til ein komandi fund kemur tilmæli um, hvussu útreiðslurnar kunnu fíggjast.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at savna triðja árgang í Finsen og at farið verður undir endaligar samráðingar við Bústaðir um avtalu í Finsen um leigu og ávísa innrætting av hølunum í caféøkinum og at leggja málið fyri aftur til komandi fund.

**Mentamálanevndin 23. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Samráðingar hava verið við Bústaðir um innrætting og leigu, hølini talan er um eru 250 $m^2$. Uppskot er, at leigan verður 925 fyri $m^2$, hetta íroknað útreiðslurnar, ið Bústaðir hevur at innrætta hølini til skúlabrúks. Hølini í Finsen verða klár í august 2018. Innrættingarætlanin er góðkend av byggivaldinum.

Kostnaðarmeting til innbúgv skúlastovur, karnappar, garderobu, nætmingaskáp, skáp til goymslu, gardinur og mottur er 300.000 kr. Ætlanin er, at hetta innbúgvið verður brúkt aftur í bygningin úti á Fløtum, tá skúlin flytur út hagar í 2020. Ætlanin er at keypa tvey ymisk sløg av stólum til næmingar umframt nøkur einkultborð, nøkur dupultborð og nøkur bólkaborð, so alt

innbúgvið ikki er sama slag. Hetta gevur møguleika at innrætta stovurnar ymiskt, og at laga innbúgvið til ymsan tørv og ymiskt virksemi.

Av tí, at innbúgvið tvs. borð, stólar, skáp verður brúkt aftur í Skúlanum á Fløtum, verður mælt til at játta 300.000 kr. av játtanini til verkætlanina av 4176 Nýbygging skúlar (L41012).

Útreiðslurnar til leigu í 2018 eru 96.350 kr., tær verða býttar millum 4117 Skúlin á Fløtum og 4140 Ætlanir á skúlaøkinum. Í fíggjarætlan 2019 verður so lagt upp fyri, soleiðis at útreiðslurnar til leigu eru á játtanini hjá Skúlanum í Fløtum, og skúlin fær kompensatión fyri tann partin av leiguni, sum skúlin hevur goldið frá august til desember 2018.

Uppskot til leigusáttmála verður tøkt mánadagin.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja

a) At gera leigusáttmála við Bústaðir um hølini í Finsen til skúlabrúks
b) At játta 300.000 kr. av 4176 Nýbygging skúlar (L41012) á konto 4117 Skúlin á Fløtum

og beina punkt a) í fíggjarnevndina og punkt b) í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir, sum eykajáttan.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, mæla til at finna eina loysn fyri Listagrafiska verkstaðið, áðrenn støða verður tikin til hetta mál.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Býráðslimirnir Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein skjóta upp, at Skúlin á Fløtum sleppur at disponera yvir gamla Realskúla, soleiðis at 1.-3. flokkur kann húsast í skúlanum í Kongagøtu og í Gamla Realskúla.

Ætlanin um at innrætta Gamla realskúla til dagstovn eigur tí at verða endurskoðað soleiðis, at frítíðarskúli verður staðsettur á øðrum staði. Alt hetta so leingi sum byggingin av skúlanum á Fløtum er ávegis. Tá ið Skúlin á Fløtum flytir út á Fløtir, er støðan ein onnur.

Grundgevingar okkara fyri hesum uppskoti til viðgerðar og avgerðar er, at vit halda at Skúlin á Fløtum eigur rætt til at nýta Gamla realskúla. Talan er í hesum føri um tíðaravmarkaða loysn, sum eisini gevur Býráðnum stundir til at finna út av endaliga, hvat Gamli realskúli skal brúkast til.

Vit taka at heilum huga undir við, at Skúlin á Fløtum skal kunna hýsa 1.-3. flokk í hølum kring Gamla Kommunuskúlan, og samstundis vilja vit vísa á ta sannroynd, at íbúgvarnir í Finsen ikki halda tað vera eitt gott hugskot at skúli flytir inn í kjallaran har.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Atkvøtt varð um ískoytið frá Helenu Dam á Neystabø, Hallu Samuelsen, Heðini Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Tróndi Sigurðsson og Annfinn Brekkstein til býráðsfundin 20. juni 2018, ið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Ruth Vang.

# 164/18 Listaverkstøð í Finsen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 106/17 | 17/01361-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 173/17 | 17/01361-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 08.11.2017 | 279/17 | 17/01361-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 324/17 | 17/01361-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 294/17 | 17/01361-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 6/18 | 17/01361-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 06.02.2018 | 53/18 | 17/01361-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 107/18 | 17/01361-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 69/18 | 17/01361-1 |
| 10 Mentamálanevndin | 11.04.2018 | 146/18 | 17/01361-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 23.04.2018 | 152/18 | 17/01361-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 137/18 | 17/01361-1 |
| 13 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 120/18 | 17/01361-1 |
| 14 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 164/18 | 17/01361-1 |
| 15 Mentamálanevndin | 18.06.2018 | 234/18 | 17/01361-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 213/18 | 17/01361-1 |

**Málslýsing:**
Í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu er m.a. orðað viðv. skapandi list:

**"Skapandi list, mentan og siðsøga í kommununi**
Íløgur í mentan og list, eru íløgur í okkara egna samleika. At kenna og vera partur av søguni, er ein virðismikil førningur og tí eiga søvn at verða sjónligir partar av høvuðsstaðnum.
...
Listahús eigur at útvegast, har listafólk í kveikjandi umhvørvi kunnu fáa frið at skapa. "

**Myndlistaverkstað í Finsen**
Slíkt verkstað kundi verið hugsað í ovaru høllini í Finsen (fyrrv. fimleikahallunum í fyrrv. kommunuskúlanum). (sí hjálagdar myndir og tekning).
Høllin er partur av høvuðsumvælingin av Finsen til lestrarbústaðir hvat viðvíkur útveggum, vindeygum og taki, men er annars ogn hjá kommununi. Høllin fer at fáa hita frá Finsen.

Ynski er hjá myndlistafólki um at fáa betri møguleikar fyri verkstøðum. Ein fyrimynd er t.d. listaverkstað í Tróndheimi. Sí www.lkv.no

Høllin kundi verið avsett til verkstað hjá myndlistafólki og umsitin av myndlistafelagnum sbrt. nærri avtalu við kommununa viðv. upptøku, skipan, gjaldi v.m. Hugsanin er at rindast skal leiga fyri hølini og at tey so vítt til ber hvíla í sær sjálvum fíggjarliga.

Tað er hugsandi at har kundi verið einir 10-12 básar til listafólk.

Samskift hevur verið við teknisku fyrisiting/Húsaumsitingina um standin av høllini v.m. Ætlanin er at halda fram við greiningunum og fáa endaliga avkláring í mai 2017. Hugsanin er at minimalt skal gerast við hølini.

Ætlandi verður farið í samskifti við felagið hjá Myndlistafólki at gera uppskot til avtalu um,

hvussu virksemi kann skipast har.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða nærri frá fyribils metingum viðv. uppstartskostnaðum og rakstri av hølunum, umframt tíðarætlan.

Henda verkætlan vil innibera at verkætlanin um innandura spæliland í hallunum í Finsen (mál 16/02253) verður slept í hesum umfari.

Býarskipanardeildin vísir á, at í heildarætlanini fyri Finsen hevur málið verið at ymisku hølini, sum eru afturat sjálvum lestrarbústøðunum skulu vera útatvend og bjóða býnum og borgarum inn o.s.fr. Ovara høllin er serstøk m.a. við góðum ljósi og útsýni til garðin í Finsen. Ein vandi við at gera myndlistaverkstað er, at virksemi verður ov innatvent og ikki uppnær endamálinum m.a. um at fáa lív í umhvørvi kring Finsen.

Tí er neyðugt, um avgjørt verður at fara víðari við hesi verkætlan, at umsitingin í dialoginum við listafólkini fær greinað, hvørt virksemi kann skipast soleiðis, at tað kann innganga í visjónina um útatvent virksemi, sjónliggera list, framsýningar o.a.
Hartil er hóskandi at verkætlanin verður gjørt tíðaravmarkað og eftirmett t.d. innan 1 ár.

**Grafiska listaverkstaðið í Finsen (listgrafo)**
Er longu lutvíst staðsett og íverksett í hæddini undir auluni. Er ætlað til verkstað hjá listafólki innan grafikk (sí mynd og tekning). Hølini tilhoyra Bústaðir, men eru ætlaði til mentanarligt endamál, har tað verður rindað fyri rakstur og bygningsviðlíkahald, men ikki beinleiðis leiga.

Ætlanin er at gera avtalu við felagið fyri listagrafikarar. Hugsanin er áhugaði søkja um upptøku til at brúka hølini hjá felagnum sbrt. upptøkureglugerð sbrt. avtalu við kommununa um upptøku, skipan og gjald. Hugsanin er at rindast skal fyri hølini.
Samskift hevur verið við teknisku fyrisiting/Húsaumsitingina um standin av hølunum v.m. Ætlanin er at halda fram við greiningunum og fáa endaliga avklárimg í mai 2017. Áðrenn verkætlan kann fremjast er neyðugt at endalig avtala kemur við Bústaðir um bygningsviðlíkahald o.a.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða nærri frá fyribils metingum viðv. uppstartskostnaðum og rakstri av hølunum, umframt tíðarætlan.

Eins og fyri møguliga myndlistaverkstaðið, er hóskandi at skipa verkætlanina sum eina tíðaravmarkaða roynd og við eftirmeting.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a) at viðgera um farast skal víðari við fyrireiking av verkætlan um listagrafiskan verkstað og herundir samráðingar við avvarðandi felag um treytir v.m. fyri virkseminum
b) at viðgera um farast skal víðari við fyrireiking av verkætlan um myndlistaverkstað og herundir samráðingar við avvarðandi felag um treytir v.m. fyri virkseminum.

**Mentamálanevndin 3. mai 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum a og b.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið á fundi við umboð fyri Føroysk myndlistafólk og ListGraFo. Hesi hava latið inn uppskot/frágreiðing um, hvussu tey kundu hugsað sær at virka í hølunum í Finsen. Sí hjáløgdu skjøl.

Ein avbjóðing, sum serliga tykist gera seg galdandi fyri listgrafiska verkstaðin, er húsaleigan. Enn er ikki endaliga greitt, hvør fermetrakostnaðurin verður fyri raksturin av í listgrafisku hølunum og myndlistaverkstaðnum, men fyri tað fyrra helst nakrar túsund kr. um mánaðin og tað seinna nakað hægri.

Í tí sambandi hevur samband eisini verið við Tórshavnar Kvøldskúla um til ber at kombinera skeiðsvirksemi hjá skúlanum við virksemið hjá listgrafiska felagnum. Skúlin er sum útgangsstøði jaligur um hetta, og letur tað upp fyri virksemi, ið kann vera ymiskar tíðir á degnum gjøgnum alla vikuna.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til, at umsitingin kemur við endaligum tilmæli til fundin í september.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti 8. november 2017:**
Viðv. listgrafiska verkstaðnum

Samskifti hevur verið við felagið Listgrafo og Kvøldskúlan um møguleikarnar. Felagið ynskir at hava hølini burturav og sigur seg vera til reiðar at rinda fyri kostnaðin av hølunum. Endaligi kostnaðurin er treytaður av brúksavtaluni millum Bústaðir og kommununa. Hesin kemur til viðgerðar í fíggjarnevndini 15. november 2017. Hølini vera ætlandi tøk seinni í november. Ávíst ivamál er um tørv á útsúgving til arbeiðið við vandamiklum løgi. Hetta er ikki kostnaðarmett.

Fyrivarni hjá umsitingini fyri hesi loysnini er mest um nýtslan av hesum serstaka høli verður nóg nógv til at felagið burturav skal hava tey.

Viðv. Myndlistaverkstaðnum

Samskifti hevur verið við Føroysk myndlistafólk um møguleikarnar. Umrøtt hevur verið antin at skipa tað sum verkstøð fyri tey sum eru at rokna sum yrkislistafólk. Hin møguleikin er at skipa virksemi meiri sum ein verkstað fyri yngri listafólk, ið ikki eru at rokna sum yrkislistafólk ella eina samanseting av báðum. Um fyrra loysnin verður valt metir umsitingin at tað er best um felagið sjálvt gerð avtalu við kommununa um virksemi og tekur sær av umsitingini av hølunum, upptøku v.m. Sum er eru hølini ikki klár at taka í nýtslu. Ymiskar ábøtur eru neyðugar. Herundir serliga viðv. brunaviðurskiftum, umframt aðrar ábøtur innan HVS, el v.m. Mett verður hóskandi at fáa ráðgeva at gera eina lýsing av viðurskiftunum. Umsitingin greiðir nærri frá hesum á fundinum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til at umsitingin kemur við tilmæli til komandi fund.

**Mentamálanevndin 08. november 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti**

**Viðv. Listgrafiska verkstaðnum**
Samráðingarnar við Bústaðir um brúksavtalu fyri Listatornið í Finsen eru lidnar og kemur málið ætlandi fyri í fíggjarnevndini í desember. Í rundum tølum fevnir fyrrv. Evningsstovan, um umleið 1/3 av fermetrunum í Listatorninum og skal felagið tá rinda umleið 5.000 kr. / mánaðin íroknað el&hita fyri hølini.

Samstundis verður mett, at tað hevði verið ynskiligt, um listgrafiska undirvísingin hjá Kvøldskúlanum var í somu hølum. Umsitingin og Kvøldskúlin meta at tað hevði verið ein fyrimunur og hevði kunna økt um nýtslustigið, umframt at Kvøldskúlin so kann nýta verandi listgrafiska hølið til onnur undirvísingarendamál. Eisini verður mett, at ein møgulig avtala eigur at vera tíðaravmarkað t.d. til 2 ár ella at hava møguleika fyri uppsøgn við rímiligum skotbráði.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til og gera tilmæli til fíggjarnevndina um:
a). hvørt Listgrafo skal fáa í boði leigusáttmála
b). hvørt Listgrafo og listgrafiska virksemi hjá Kvøldskúlanum eigur at vera í felag í hølunum

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Samtykt at taka undir við loysn b og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við ráðgeva fyrireika arbeiðsætlan og kostnaðarætlan fyri Myndlistaverkstaðið í Finsen. Sí hjálagt kostnaðarmeting v.m. Talan er um metingar, ið skulu takast við ávísum fyrivarni. Eisini hevur verið samskift við Byggi- og umhvørvisdeildina viðv. fyritreytum og krøvum um í mun reglurnar í byggikunngerðini fyri Føroyar.

Samanlagt er samlaða metingin fyri hondverkaraútreiðslur (HVÚ) 524,7 tkr., umframt ráðgeving (ca. 6% av HVÚ) og ókent (ca. 15% av HVÚ) og MVG (6,25% av øllum postum). Møguliga kunnu einstakir postar takast út.

Støða er ikki tikin til fígging av verkætlanini.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á Húsaumsitingini mæla mentamálanevndini til at viðgera metingina og taka støðu til um um farast skal víðari við ætlanini.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Málið umrøtt.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur spurt ráðgevan um hvat kostnaðurin vildi verið um ovara høllin verður umvæld, men ikki niðara. T.v.s. hvat krevst av umvælingum v.m. í trappuøkinum upp til ovaru høllina. Metingin er at 496 tkr. koma aftur í hondverkaraútreiðslum, umframt kostnaðurin til ráðgeving, ókent og mvg. T.v.s. uml. 631 tkr. Sí hjálagt tilfar.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin lata hervið nevndini hesar upplýsingar til umrøðu við atliti til møguligt tilmæli á komandi fundi.

**Mentamálanevndin 06. februar 2018:** Umrøtt.

Ískoyti
Vísandi til samtyktina í mentamálanevndini 29. november 2017 hevur samskifti verið við Listgrafo um samhýsing í hølunum í Finsen saman við Kvøldskúlanum. Sí hjálagt uppskot til avtalu.

Fyri at fáa hølini klár til endamálið hjá Listgrafo og Kvøldskúlanum er neyðugt við ymiskum ábótum o.a. Hetta er mett til umleið 100 tkr. og verður ætlandi framt innan raksturin hjá Kvøldskúlanum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka undir við uppskotinum til avtalu og beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mánadagin.

**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Ískoyti**
Málið er nú gjøgnumgingið av nýggjum saman við Húsaumsitingini, umframt at ráðgevin hevur samskift við byggivaldið um fyritreytirnar í verkætlanini. Byggivaldið boðar frá, at arbeiðast kann víðari við verkætlanini, tó so, at endaligt byggiloyvi skal fáast til vega, áðrenn farið verður í gongd.

Um ynski er at fara í gongd við at gera myndlistaverkstað í ovaru høllini, eru hondverkaraútreiðslurnar (HVÚ) mettar til 524,7 tkr. umframt ráðgeving (ca. 6% av HVÚ), ókent (ca. 15% av HVÚ) og kommunalt MVG (6,25% av øllum postum). Um farið verður undir arbeiðið í ovaru høllini og ikki samstundis undir arbeiðið í niðaru høllini, er neyðugt at gera trappuuppgongdina millum báðar hallirnar. Metingin fyri tað arbeiðið er 496 tkr., umframt somu postar til ráðgeving, ókent og kommunalt mvg. Samanlagt gevur tað umleið 1,3 mkr.

Ætlanin er at bjóða arbeiðið út í innbodnari licitatión. Arbeiðið kann hóskandi verða boðið út í mai/juni til at verða útint tíðliga í heyst.

Við atliti til at fáa góðar prísir verður mett best, um arbeiðið í ovaru høllini var gjørt samstundis sum arbeiðið í niðaru høllini t.e. virknishøllini í Finsen – sí mál 17/01362, men er tað ikki alneyðug trey og krevur meirfígging uppá uml. 1,5 mkr.

Á løgukonto 5775 eru tøkar 921 tkr. fluttar frá verkætlan L57027 frá 2017 – sí mál 16/03404. Restin av fíggingini til verkætlanina, uml. 400 tkr., verður skotið upp at fíggjað av løgukonto 5775, smærri ítróttaanlegg, har 1,5 mkr. eru tøkar.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, leiðari á Húsaumsitingini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fara undir útboð av arbeiðinum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 23. apríl 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Heðin Mortensen og Halla Samuelsen atkvøða blankt.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við mentamálanevndini og játta kr. 921 tkr., ið eru tøkar fluttar frá verkætlani L57027 frá 2017 umframt 400 tkr. av løgukonto 5775, smærri ítróttaranlegg, sum eykajáttan til arbeiðið. Málið beint í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum og mæla til at fara aftur til upprunaætlanina at nýta hølini til alment innandura spælipláss.

**Ískoyti:**
Í skrivið dagfest 17. mai 2018 hava býráðslimir fyri Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin ynski um at fáa málið um hølisviðurskifti hjá Listgrafo á skrá til fyrst komandi býráðsfund.

**Viðv.sáttmála við Listagrafo um leigumál í Finsen, sum er góðkendur í bæði mentamálanevnd og fíggjarnevnd**.
Undirritaða fer vegna Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin í Tórshavnar Býráði at biðja um at fáa eitt mál á skrá á næsta býráðsfundi. Tað snýr seg um leigusáttmálan, sum er gjørdur við felagsskapin Listagrafo um leigumál í Finsen.

Og sum eisini fevnir um, at Kvøldskúlin skal arbeiða har ávís avtalaði tíðspunkt. Hesin sáttmálin er sum skilst góðkendur tann 24. Apríl í ár.

Sum skilst hava tey nú fingið boð um, at tey ikki sleppa inn har kortini.

Hesum kunnu vit í andstøðuni ikki taka undir við. Tí hetta er ein tilgongd, sum hevur staðið uppá í nógv ár. Og tey hava bíðað í tolni eftir avtaluni, sum er staðfest í einum av bæði Mentamálanevndini og fíggjarnevndini góðkendum sáttmála – og sum listabólkurin eisini hevur góðtikið.

Soleiðis kann mann ikki fara við fólki, felagsskapum og skúlum – og tað kunnu vit í andstøðuni ikki góðtaka.

Tað verður víst til, at Skúlin á Fløtum skal disponera yvir hølunum. Vit hava sum andstøða ferð eftir ferð víst á, at sjálvandi skulu vit gera alt vit eru ment til tess at Skúlin á Fløtum kann húsast á so fáum matriklum sum møguligt, meðan bygt verður. Og júst tú skutu vit upp, at Skúlin á Fløtum fekk Gamla realskúla at húsast í, inntil byggjaríið verður liðugt. Tá ber so til at gera Gamla realskúla um til ein dagstovn. Tørvurin á dagstovnaplássum eigur at verða loystur á annan hátt beint nú – til dømis við at brúka allan brúna Skúla til endamálið.

Vit fara tí at krevja málið á næsta býráðsfund, soleiðis at vit kunnu samtykkja, at Býráðið heldur gjørdar avtalur og sáttmálar við Listabólkin Listagrafo og við Kvøldskúlan.

Vinarliga
Vegna Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin í Tórshavnar Býráði
Helena Dam á Neystabø
Heðin Mortensen
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bjørghild Djurhuus og
Annfinn Brekkstein

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Síðani viðgerðina seinast hevur samskifti verið millum Tórshavnar kommunu og Listgrafo um viðurskiftini og hvør onnur møgulig hølisloysn kundi verið hóskandi til virksemi felagsins. Felagið metir, at niðara høllin í Finsen og hjárúmið norðanfyri eru meiri áhugaverd enn ovara høllin og hjárúmini har. Felagið ynskir ein leigusáttmála um hølini skjótast tilber. Í máli 17/01362 Virknishøll í Finsen er innleiðandi viðgjørt at gera eina virknishøll í niðaru høllini í Finsen.

Í sambandi við fyrireiking av málunum eru ávegis tekniskar greiningar og kostnaðarmetingar gjørdar av ráðgeva og Húsaumsiting fyri bæði niðaru høllina sum virknishøll og í sambandi við hetta málið um listaverkstøð. Mett verður, at tað lutfalsliga skjótt ber til at fáa greinað viðurskiftini viðv. við atliti til at broyta endamál og ístaðin gera listaverkstøði í niðaru høllini ístaðin teirri ovaru høllini.

Í næstum kann farast í samráðingar við Listgrafo um innrætting og krøv til hølini, soleiðis at neyðug teknisk fyrireiking og byggimálsviðgerð kann fremjast, sum so síðani kann vera grundarlag fyri einum leigusáttmála.

Harumframt kann eisini eftirfylgjandi farast í samráðingar við Myndlistafelagið um møguleikan fyri myndlistaverkstaði í parti av niðaru høllini í Finsen.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til:

a) um farast skal í samráðingar við Listgrafo við tí endamáli at gera leigusáttmála og fyrireika listgrafiskan verkstað í parti av niðaru høllini í Finsen,

b). um farast skal í samráðingar við Myndlistafelagið um at gera leigusáttmála og fyrireika myndlistaverkstað í parti av niðaru høllini í Finsen.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 18. juni 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir a) og b).

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Helena Dam á Neystabø, mæla til at halda fast í uppskot í skrivi, dagfest 17. mai 2018, sum gongur út uppá at Býráðið heldur gjørdar avtalur og sáttmálar við Listabólkin Listagrafo og við Kvøldskúlan .

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn tekur undir við Mentamálanevndini.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur undir við minnilutanum í Mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Helenu Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Annfinn Brekkstein og Bjørg Dam:

Mælt verður til at halda fast í uppskoti í skrivi 17. mai 2018, sum gongur út uppá, at býráðið heldur gjørdar avtalur og sáttmálar við Listabólkin, Listagrafo og við Kvøldskúlan.

Broytingaruppskotið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti:

Fyri atkvøddu: Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Ruth Vang.

Síðani varð atkvøtt um samtyktina hjá meirilutanum í fíggjarnevndini 20. juni 2018, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri og seks ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

## 165/18 Talgildu Føroyar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 154/18 | 18/00052-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 209/18 | 18/00052-3 |
| 3 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 165/18 | 18/00052-3 |

**Upprunin til málið:**
Í vár samtykti løgtingið verklagslógina um Talgildu Føroyar. Við lógini fáa vit eitt betri og virkisførari Føroyar. Landið hevur sett 90 mió. kr. til endamálið næstu árini. Í hesum sambandi ynskir Fíggjarmálaráðið við verkætlanini Talgildu Føroyar at bjóða eina samstarvsavtalu millum Tórshavnar kommunu og Talgildu Føroyar.

Í trá við tann leistin sum KT-deildin hjá Tórshavnar kommunu arbeiðir fram til, so verður hendan samstarvsavtala eitt fundament undir at røkka málunum við at talgilda Tórshavnar kommunu í tann mun at kommunan og harvið Føroyar verða meir enn kappingarførar í Norðuratlantsmótinum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Talgildu Føroyar verkætlanin byrjaði í 2015. Verkætlanin byrjaði við, at ein heildarætlan fyri talgilding av føroyska samfelagnum varð gjørd. Orsakað av at verkætlanin skal fevna um alt tað føroyska samfelagið, vórðu allir týðandi áhugapartar bjóðaðir at luttaka – ein sera týðandi áhugapartur er kommunurnar. Kommunurnar luttóku í tí í arbeiðinum, bæði við umboði í stýrisbólki fyri verkætlanina og eisini við umboði í teimum arbeiðsbólkum, sum skrivaðu heldarætlanina.

Heilt frá byrjan hevur ætlanin verið, Talgildu Føroyar skulu koma øllum føroyingum til góðar, og tí hevur verið neyðugt at fáa allar teir týðandi partarnar at seta krøv og at fíggja verkætlanina. Hetta er eisini eitt ynski, sum Løgtingið hevur sett fram í samband við verklagslógina fyri Talgildu Føroyar.
Samstarvið millum áhugapartarnar og umboð fyri Fíggjarmálaráðið og Talgildu Føroyar byrjaði tíðliga í 2016. Áhugapartarnir fevna um bæði privatar og kommunalar aktørar. Tilgongdin hevur havt við sær, at avtala er gjørd við privatu áhugapartarnir um at fíggja verkætlanina. Viðvíkjandi kommunum hevur eisini nógv samskifti verið ma.a høvdu Fíggjarmálaráðið og Talgildu Føroyar kunningarfundir kring landið, har allar kommunur vóru bjóðaðar at luttaka. Kommunufelagið hevur eftir hesar fundir heitt á Fíggjarmálaráðið um at taka samskifti upp við hvørja kommunu við tí fyri eyga at gera samstarvsavtalu um Talgildu Føroyar.

Fyri kommunufyrisitingarnar sjálvar og fyri borgarar og vinnulív í kommununum fara Talgildu Føroyar at viðføra fleiri ágóðar. Hesir umfata m.a.:

- **Ókeypis og lætt atkomulig grunddata**
  Við Talgildu Føroyum verða upplýsingar um fólk (Landsfólkayvirlitið), virki, bústaðir, ognir (tinglýsing og matrikkul) og kort (geodata) léttari atkomulig og ókeypis at fáa hendur á. Hesi data verða grundarsteinar undir skipanir so sum, barnansingarskipan, ArcGis, útboðsportalur og einari nýggjari heimasíðu har borgarar hava møguleika at avgreiða síni viðurskiftir við Tórshavnar kommunu.

- **Færri tvískrásetingar og minni umsiting av grundardátum**
  Data verður ókeypis og kemur at minka um dupultskráseting og umsiting av data í ymiskum skipanum og harvið verða við til at minka um tíðina til saksviðgerðir. Borgarin kemur sostatt at merkja betur og skjótari tænastu. Nevnast kann at persóndata verður í dag manuelt viðlíkahildið í fleiri databasum.

- **Ein felags borgaraportalur og talgildur samleiki sparir útreiðslur**
  Við at gagnnýta felags borgaraportal og samleika, sum borgarar brúka at rita inn og undirskriva á talgildum tænastum, sleppa kommunurnar undan menningar- og rakstrarútreiðslum og kunnu somuleiðis effektivisera mannagongdir.

Við at fíggja Talgildu Føroyar fáa kommunurnar ávirkan á verkætlanina á fleiri økjum. Fyrst og fremst kunnu kommunurnar saman velja 1 umboð í stýrisbólkin fyri verkætlanina. Stýrisbólkurin er mannaður av trimum fólkum: Eitt umboð vegna landið, eitt vegna allar privatar íleggjarar og eitt umboð vegna kommunurnar. Haraftrat fáa kommunrnar møguleika at luttaka í teimum einstøku verkætlanunum, m.a. í tilvísingar- og verkætlanarbólkum.

Leggjast kann at hesum at Tórshavnar kommuna hevur fingið í boðið at hava tað eina plássi í stýrisbólkinum fyri alla verkætlanina.

Uppskot til fíggingarleist sæst niðanfyri:

**Fíggjarætlan býtt í áhugabólkar (Túsuind kr.)**

| Verkætlanir | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Land (60%) | 10.000 | 20.000 | 20.000 | 20.000 | 20.000 | 90.000 |
| Kommunur (17%) | | | 8.500 | 8.500 | 8.500 | 25.500 |
| Sponsorar (23%) | | 8.625 | 8.625 | 8.625 | 8.325 | 34.500 |
| **Tilsamans** | **10.000** | **28.625** | **37.125** | **37.125** | **37.125** | **150.000** |

**Fíggjarætlan býtt á kommunur - 173 kr./borgara/ár**

| Kommuna | Fólkatal | Tilsamans 2018-2020 (Túsind kr.) | Pr. Ár 2018-2020 (Túsind kr.) |
|---|---|---|---|
| Tórshavn | 20.551 | 10.644 | 3.548 |
| Klaksvík | 4.972 | 2.575 | 858 |
| Runavík | 3.911 | 2.026 | 675 |
| Eystur | 2.017 | 1.045 | 348 |
| Vága | 1.995 | 1.033 | 344 |
| Tvøroyri | 1.702 | 882 | 294 |
| Sunda | 1.687 | 874 | 291 |
| Fuglafjørður | 1.499 | 776 | 259 |
| Vágs | 1.325 | 686 | 229 |
| Nes | 1.239 | 642 | 214 |
| Vestmanna | 1.207 | 625 | 208 |
| Sørvágs | 1.115 | 577 | 192 |
| Sjóar | 949 | 492 | 164 |
| Hvalba | 715 | 370 | 123 |
| Eiði | 688 | 356 | 119 |
| Kvívík | 578 | 299 | 100 |
| Sandur | 533 | 276 | 92 |
| Skopun | 448 | 232 | 77 |
| Hvannasund | 396 | 205 | 68 |
| viðareðið | 351 | 182 | 61 |
| Sumba | 347 | 180 | 60 |
| Porkeri | 306 | 158 | 53 |
| Kunoy | 135 | 70 | 23 |
| Skálavík | 131 | 68 | 23 |
| Húsavík | 116 | 60 | 20 |
| Hov | 109 | 56 | 19 |
| Fámjin | 87 | 45 | 15 |
| Skúvoy | 42 | 22 | 7 |
| Húsar | 42 | 22 | 7 |
| Fugloy | 41 | 21 | 7 |
| **Tilsamans** | **49.234** | **25.500** | **8.500** |

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til at fáa heimild at gera samstarvsavtalu um talgildu Føroyar og at peningur verður settur av til endamálið.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

Gunvør Balle og Helena Dam á Neystabø luttóku ikki í viðgerðini av málinum vísandi til, at tær mettu seg vera ógegnigar at luttaka í viðgerðini.

# 166/18 Eykajáttan 2018

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 124/18 | 18/01522-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.04.2018 | 131/18 | 18/01522-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 98/18 | 18/01522-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 133/18 | 18/01522-1 |
| 5 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 166/18 | 18/01522-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Ískoyti:**
Tilfar kemur til fundin.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Tikið av skrá.

**Málslýsing:**
Tøkur peningur í Tórshavnar kommunu var við ársskifti 231 mió. kr. Tilráðingin er, at kommunan hevur eitt minsta gjaldførið á 80 mió. kr. Orsøkin til økta gjaldføri eru fleiri. Í ársroknskapinum 2017 kann staðfestast, at skattainntøkurnar eru hægri enn mett í fíggjarætlanini. Játtan at flyta fram er fyri løgur 78 mió. kr. og fyri rakstur 5,4 mió. kr. 50 mió. kr. av innistandandi eru ætlaðar at fíggja íløgur í 2018. Mett verður eisini at kommunan fær inntøku vegna sølu av grundøkjum í árinum. Tøkur peningur, tá árið er gjørt upp er mettur at verða 29,3 mió. kr. sum kunnu ráðast yvir. Fleiri rakstrarstøð eru við manglandi fígging og kann tøkið peningurin nýtast til fígging av hesum.

**Tænastumannaeftirlønir**
Játtanin fer til eftirlønir hjá fyrrverandi borgarstjórum og tænastamanna settum starvsfólkum. Um viðkomandi er deyður, til avvarðandi teirra, sum tá sambært lóg hava rætt til eftirløn. Fleiri fólk enn ætlað í fíggjarætlanini hava fingið tænastamannaeftirløn. Játtanin var 3 mió. kr., útgoldið var 3,5 mió. kr.

**Naina**
Sambært løgtingslóg nr. 18 frá 9. apríl 1964 um raksturin av Hvíldarheiminum Naina rindar kommunan tann partin av rakstrinum, sum ikki verður goldin við játtan á fíggjarløgtingslógini og av Heilsutrygd, í mun til dagarnar, íbúgvar í kommununi hava verið á heiminum.

Kontan hevur haft hall síðani 2014. Játtanin hevur verið í millum 1,6 og 1,9 mió. kr. um árið, meðan raksturin hevur verið í millum 2 og 2,3 mió. kr. Játtanin til Hvíldarheimið Naina er 2018 2 mió. kr.

**NSR**
Játtanin var til útreiðslur til Námsfrøðiliga Sálarfrøðiliga Ráðgeving (Sernám). Málsøkið var burturav landsins, men av tí at mett var, at tað var eitt framstig fyri tænastustigið, játtaði kommunan at gjalda fyri vanligan skrivstovurakstur og løn til ein skrivara. Mentamálaráðið yvirtók allar rakstrarútreiðslur pr. 1. januar 2015, síðani hevur rakstrarstaði ikki haft nakra játtan og stavar hallið frá 2014.

**Renovatión**
Kommunala Brennistøðin hevur til endamáls at røkja kommununnar uppgávur og skyldur í sambandi við burturkast. Meirnýtslan í 2017 stavar í høvuðsheitum frá eldsbruna í ruskgoymsluni, og viðførdi skaða á bygning, herundir vindeygu, hurðar og el-installatiónir, umframt at kranin gjørdist vrak. Um eykajáttan ikki verður givin fer tað at ganga út yvir virksemi á brennistøðini í 2018.

**Lønarbroytingar**
Lagt var upp fyri eini lønarhækkan á 2% í fíggjarætlanini fyri 2018. Gongdin í sáttmálasamráðingunum á almenna arbeiðsmarknaðinum, fyri sáttmálar sum gingu út 30/9-2017, hevur á nøkrum økjum viðført umfatandi lønarhækkingar. Ramman hevur verið 2,3% fyrra árið og 2,5% seinna árið. Útgangsstøði var at man skuldi samráðast í krónum og í nøkrum samráðingum er man farin burtur frá hesum til at samráðast um prosentir.

Avleiðingin er at lønarhækkanin fyri lægri lønir er hægri í prosentum, enn fyri tær hægru lønirnar. Tórshavnar kommuna hevur nógv starvsfólk í lægra lønarbólkinum.
Nýggi sáttmálin millum Fíggjamálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar viðførdi stórar broytingar, bæði strukturelt og ein høga lønarhækkan hjá landinum. Samráðingarnar á kommunala økinum eru lidnar og liggja lønarbroytingarnar á einum væl hægri støði enn tikið var hædd fyri í fíggjarætlanini.
Lønarhækkanin er sera ymisk fyri tey ymisku feløgini. Út frá teimum sáttmálum sum eru undirskrivaðir og frá innanhýsis tølum er greitt, at lønarhækkanin fer at vera væl meira enn 2% og væl meira enn ramman var upprunaliga. Mælt verður tí til at leggja upp fyri lønar broytingum við 5 mió. kr.

**Læknahøli**
Játtanin er til útreiðslur sambært løgtingslóg nr. 28 frá 23. apríl 1999 um kommunulækna skipan við seinni broytingum. Sambært lógini er tað ábyrgd kommununnar at útvega og rinda viðtaluhøli við neyðugum innbúgvi, tólum og amboðum til kommunulæknarnar og bera útreiðslurnar av rakstri og viðlíkahaldi. Eisini skal kommunan útvega frían bústað til frítíðar- og langtíðaravloysarar.

Heilsumálaráðið hevur fráboðað kommununi, at tveir nýggir læknar eru normeraðir til Tórshavnar kommunu at seta skjótast gjørligt. Kommunan skal í hesum sambandi fáa til vega nýggj læknaviðtaluhøli. Neyðugur peningur er ikki settur av til endamálið í fíggjarætlanini fyri 2018.

**Ansingarpláss**
Játtanin er til vantandi ansingarpláss í kommununi uml. 46 vøggustovu- og 17 barnagarðspláss. Harafturat er neyðugt at fíggja 3 mió. kr. við sparingini orsakað av verkfallinum.

**Løgur barnaansing**
Játtanin skal brúkast til at fáa fleiri dagstovnapláss, harundir tillagingarnar av realskúlanum.

**Aðrar útreiðslur**
Hendan konta er til óvæntaðar inntøkur og útreiðslur. Kontan hevði eitt hall á 704 t.kr. Játtanin til aðrar útreiðslur í 2018 er sostatt við framfluttum 1,75 mió. kr. 2,8 mió. kr. er játtaðar til serstaka viku fyri tímalønt. Í árinum væntast harumframt øktar útreiðslur til løgfrøðiligar tænastur m.a. í sambandi við fleiri byggimál.

**Karlamagnusarbreyt**
Neyðugt er at bøta um viðurskiftini á Karlamagnusarbreyt. Sambært skeytinum hevur kommunan ymiskar skyldur. 3,7 mió. kr. eru ætlaðar asfaltering af felagsøkjunum sambært skjeytum, ferðslutrygdarviðurskiftir, parkeringspláss og annað. Neyðugt verður eisini at peningur verður settur av til endamálið á fíggjarætlanini í 2019.

**Byggi- og umhvørvisdeildin**
Talið av starvsfólkum á byggideildini hevur verið tað sama í nógv ár. Í januar 2017 kom nýggj bygningskunngerð (BK17), sum krevur nógv meira av byggimálsviðgerðini enn áður, eisini er øll brunateknisk málsviðgerð flutt til kommunurnar at umsita.

Hesi seinastu árini er talið av byggimálum, fyrispurningar og øðrum nógv vaksið. Í 2015 var talið av givnum byggiloyvum uml. 200 og seinastu 2 árini hevur hetta talið verið uml. 300, sum er ein øking uppá uml. 40%.

Skal kommunan framhaldandi kunna bjóða eina góða og skjóta tænastu til okkara borgarar, so er neyðugt at seta fleiri starvsfólk á byggi- og umhvørvisdeildini.

**Talgildu Føroyar**
Løgtingið hevur samtykt verklagslógina um Talgildu Føroyar. Við lógini verður mett at vit fáa eitt betri og virkisførari Føroyar. Landið hevur sett 90 mió.kr. til endamálið næstu árini og ynskir í hesum sambandi eitt samstarv við m.a. kommunurnar.

Samlaða fíggjarætlanin fyri verkætlanina er 150 mió. kr. Harav er býtið millum týðandi áhugapartarnar ætlað soleiðis : landi 60 %, kommunur 17% og sponsorar 23% Lagt er upp til, at allar kommunur rinda lutfalsliga, tað vil siga eftir fólkatali. Fyri Tórshavnar kommunu merkir hettar eitt árligt gjald á uml. 3,5 mió. kr. næstu 3 árini.

**Fyribyrgjandi verkætlanir innan almanna- og heilsuøkið**
Játtaðar verða kr. 1 mió til kontu 2460 stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsuøkið. Sambært nýggjum leiðreglum fyri kontuna er endamálið við játtanini at stuðla undir fyribyrgjandi og heilsumennandi verkætlanum, tiltøkum, átøkum og tilboðum innan almanna- og heilsuøkið, sum kunnu vera borgarum og virkisøkjum kommununnar til gagns bæði í stutttíðar- og langtíðarhøpi.

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til, at tøki peningurin verður nýttur til at fíggja niðanfyri standandi rakstrarstøð við manglandi fígging soleiðis:

| | |
|---|---:|
| Tænastumannaeftirlønir | 546.000 |
| Naina | 1.516.000 |
| NSR | 197.000 |
| Renovatión | 1.700.000 |
| Lønarbroytingar | 5.000.000 |
| Læknahøli | 3.000.000 |
| Ansingarpláss | 2.000.000 |
| Løgur barnaansing | 2.000.000 |
| Aðrar útreiðslur | 4.841.000 |
| Karlamagnussarbreyt | 3.700.000 |
| Byggi- og umhvørvisdeildin | 300.000 |
| Talgildu Føroyar | 3.500.000 |
| Fyribyrgjandi verkætlanir | 1.000.000 |
| | 29.300.000 |

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um eykajáttan og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrinu Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Ruth Vang settu fram soljóðandi broytingaruppskot:

2,5 mió. kr. verða settar av til Talgildu Føroyar. 600 t.kr. verða settar av til vetrarfriðing.

KFUM verður stuðla við 100 t.kr. 280 t.kr. verða settar av til liðugtgerð av neystinum úti á Bakka.

Og at uppskotið soleiðis broytt verður sett undir atkvøðugreiðslu:

**Yvirlitið Eykajáttan 2018 Broytingaruppskot**

| Deild | Navn | Projekt | | kr. |
|---|---|---|---|---|
| 1560 | Tænastumannaeftirlønir | | Tænastumannaeftirlønir | 546.000 |
| 2101 | Naina | | Naina | 1.516.000 |
| 4143 | NSR | | NSR | 197.000 |
| 7110 | Renovatión | | Renovatión | 1.700.000 |
| 20910 | Aðrar inntøkur | | Lønarbroytingar * | 5.000.000 |
| 2210 | Kommunulæknatænastur | | Læknahøli | 3.000.000 |
| 3199 | Regulering barnatal | | Ansingarpláss | 2.000.000 |
| 6110 | Røkt og umvæling av bygningum | | Løgur barnaansing | 2.000.000 |
| 20910 | Aðrar inntøkur | | Aðrar útreiðslur | 4.841.000 |
| 6475 | Byggibúning bústaðir | Nýtt projekt L nr. | Karlamagnussarbreyt | 3.700.000 |
| 1313 | Tekniska fyrisitingin | | Byggi- og umhvørvisdeildin | 300.000 |
| 2460 | Stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsumál | | Fyribyrgjandi verkætlanir | 1.000.000 |
| 7317 | Talgilding til borgaran | | Talgildu Føroyar | 2.500.000 |
| 6275 | Fríðkan av kommununi | Nýtt projekt L nr. | Vetrarfriðing | 600.000 |
| 5366 | Stuðul annars | | Stuðul annars - KFUM | 100.000 |
| 6110 | Røkt og umvæling av bygningum | | Liðugtgerð av neystinum úti á Bakka | 280.000 |
| | | | | 29.280.000 |

**Skal fordeilast út á avvarandi rakstrarstað,*
*tá lønardeildin hevur uppgjørt eykakostnaðin fyri lønarhækkingarnar.*

Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>20. juni 2018 | Blað nr.: 634 |
| | Formansins merki: |

# 167/18 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2018

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.02.2018 | 60/18 | 18/00018-1 |
| 2 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 45/18 | 18/00018-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 87/18 | 18/00018-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 125/18 | 18/00018-1 |
| 5 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 99/18 | 18/00018-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 158/18 | 18/00018-1 |
| 7 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 134/18 | 18/00018-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 212/18 | 18/00018-1 |
| 9 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 167/18 | 18/00018-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| | **Býráðsfundur**<br>20. juni 2018 | Blað nr.: 635 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Ískoyti:** Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2018:** Framlagt og góðkent

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
Roknskapur fyri februar og mars verður lagdir fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. mai 2018**: Framlagt og góðkent.

**Ískoyti**:
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Framlagt og góðkent**.**

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Framlagt og góðkent.

# 168/18 Bygging av dagstovni í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 19.03.2015 | 39/15 | 14/03251-17 |
| 2 Mentamálanevndin | 18.03.2015 | 60/15 | 14/03251-17 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.03.2015 | 76/15 | 14/03251-17 |
| 4 Kollafjarðarnevndin | 27.05.2015 | 3/15 | 14/03251-17 |
| 5 Kollafjarðarnevndin | 19.10.2015 | 12/15 | 14/03251-17 |
| 6 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 191/16 | 14/03251-17 |
| 7 Fíggjarnevndin | 16.06.2016 | 238/16 | 14/03251-17 |
| 8 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 170/16 | 14/03251-17 |
| 9 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 187/18 | 14/03251-17 |
| 10 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 176/18 | 14/03251-17 |
| 11 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 168/18 | 14/03251-17 |

## Málslýsing:

Víst verður eisini til mál 14/01859. Nú byggisamtyktin fyri ætlaða økið við Botnánna til nýggja dagstovnin er góðkend av landsstýrinum, er klárt at fara í gongd við at fyrireika byggiverkætlanina. Fyrsta stig er at fáa til vega kravspesifikatión og byggiskrá fyri nýggja stovninum.

Á íløguætlanini fyri 2014 eru kr. 14 mió settar av til nýggjan dagstovn í Kollafirði. Áður eru játtaðar kr. 1,5 mió til keyp av grundøkið og fyrireikingar v.m. Mett verður, at fíggjartøvur til fyrireikingar, kravspesifikatión, byggiskrá og útbjóðingartilfar er kr. 1 mió.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at játta kr. 1 mió av íløgukontu 3175 Dagstovnur í Kollafirði til nevndu fyrireikingar.

**Trivnaðarnevndin 10. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. juni 2014**: Samtykt at játta 1 mió av konto 3175 til fyrireiking av dagstovni í Kollafirði, at bjóða dagstovnin út í umvendari licitatión og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Kollafjarðarnevndin 07. oktober 2014:** Borgarstjórin kunnaði um, at um 10 dagar verður klárt at senda út kravspecificatión til tveir arbeiðstakarar sum síðani skulu geva tilboð upp á arbeiðið.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað var um málið.

**Kollafjarðarnevndin 10. november 2014:** Borgarstjórin kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
Tilboð eru komin inn og meting gjørd, sum verður løgd fram fyri nevndini á fundinum.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at geva umsitingini heimild til at samráðast við lægsta tilboðsgevara um sáttmála.

**Mentamálnevndin 25. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 11. mars 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Samráðing hevur verið við Sp/f Bulur, sum hevði lægsta tilboð. Gjørd er uppseting av tilboðsupphædd og viðmæltum tilkeypum, byggiharraútreiðslum v.m., sí yvirlit. Mælt verður til tilkeyp fyri kr. 1.119.500, herundir at fáa til vega jarðhitaskipan til bygningin, so at samlaði totalarbeiðstøkusáttmálin verður áljóðandi kr. 13.970.280. Við byggiharraútreiðslum, grundøki, listprýði v.m. verður samlaði kostnaðurin kr. 19.939.556.

Byggitíðin er mett til 13 mánaðir. Tøkar til dagstovn í Kollafirði á íløgujáttanini eru kr. 8,8 mió umframt áður samtyktar kr. 2,5 mió, harav uml. kr. 0,1 mió er brúkt til fyrireikingar. Samlaður íløgutørvur í 2016 verður sostatt kr. 8,75 mió.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at gera totalarbeiðstøkusáttmála við Sp/f Bulur áljóðandi kr. 13.970.280, og at játtaðar verða kr. 19.939.556 til verkætlanina.

**Mentamálanevndin 18. mars 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at restfíggingin verður fingin til vega av løgukarminum fyri 2016 og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. marts 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at játta restfíggingina kr. 8,75 mió. av íløgukarminum fyri 2016 og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur fyri læstum hurðum 19. mars 2015:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur fyri læstum hurðum 19. mars 2015:** Einmælt samtykt.

**Kollafjarðarnevndin 27. mai 2015:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Eftir ætlan skal dagstovnurin avhendast á ólavssøku í 2016 frá arbeiðstakaranum, síðani skal umsitingin og leiðslan á stovninum arbeiða við at keypa innbúgv o.a áðrenn flutt verður inn.

**Kollafjarðarnevndin 19. oktober 2015:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**

Útbjóðingartilfar til veitan og uppsetan av innbúgvi til nýggja dagstovnin í Kollafirði er fyrireikað saman leiðsluni á stovninum og boðið út 18. mai 2016. 6 fyritøkur vórðu bjóðaðar. 3 fyritøkur valdu at geva tilboð.

Listi yvir innbúgv snúi seg um tað mesta, sum skal til fyri at ein nýggjur stovnur skal kunna takast í nýtslu, herundir borð og stólar til børn og starvsfólk, sofur, hillar, reolir, goymsluskáp, pussliborð, innandura leikur og súkklur til uttandurabrúk. Undantøk vórðu køkar og klæðiskáp til børn, sum var við í tilboðnum hjá heildararbeiðstakara, Sp/f Bulur. Nakað av innbúgvi frá verandi stovnum verður endurnýtt á nýggja stovninum.

Trý tilboð komu inn til freistina 08. juni 2016, harav eini tilboðsgevarin eisini gav eitt alternativt tilboð.

Tilboðini vóru sum fylgjandi:

| | |
|---|---|
| EIKIN | kr. 627.978,00 |
| NEMA | kr. 454.520,00 |
| BLIKA | kr. 439.458,00 |
| BLIKA, alternativt tilboð | kr. 418.822,00 |

Umsitingin hevur gjøgnumgingið tilboðini. Bílígasti tilboðsveitarin hevur einki frávik frá snið og dygd, sum verður fyriskrivað í útbjóðingini, men í alternativa tilboðnum eru slík frávik. Tí verður mælt til ikki at taka av alternativa tilboðnum.

Tilboðið er eisini innanfyri kostnaðarmetingina. Fígging er tøk í samlaðu projektjáttanini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at at taka av tilboðnum frá Sp/f Blika áljóðandi kr. 439.458,00.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

Sjúrður Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Løgukonta 2775 L31005 Dagstovnur í Kollafirði skal lokast, og sambært leiðslukunningini staðfest ein meirnýtsa uppá kr. - 46.371,00.

Verkætlanin varð boðin út í heildararbeiðstøku. Arbeiðið og samstarvið við arbeiðstakaran gekk sum heild væl, og stovnurin varð tikin í nýtslu við lítlari seinking. Bygningurin er handaðar Húsaumsitingini hjá TK í samband við 1. árs eftirlit.

Ætlanin at listprýða stovnin dró nógv út. Játtanin til endamálið er við fráboðan tikin úr verkætlanini, men verður roynt endurfíggjað av aðrari játtan, sí mál 17/03637.

Orsøkin til meirnýtsluna er fyrst og fremst, at tekniska fyrisiting hevur trekt 485.000,00 av verkætlanini til tekniskar betringar uttanfyri arbeiðstøkumark. Talan er einamest um leiðingsarbeiði í lendinum, og sum ikki av sett av í uppruna kostnaðarmetingini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og trivnaðarstjórin mæla til at loka verkætlanina løgukonta 3775 L31005 Dagstovnur í Kollafirði, og at fíggja meirnýtsluna kr. 46.371 av kontu 3215 aðrar útreiðslur barnaansing. Málið beinast í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

# 169/18 Flytilig áskoðarapláss o.a. í.s.v. útbyggingina av Høllini á Hálsi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 103/17 | 17/01304-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.05.2017 | 135/17 | 17/01304-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 26.07.2017 | 190/17 | 17/01304-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 26.07.2017 | 166/17 | 17/01304-1 |
| 5 Býráðsfundur | 26.07.2017 | 188/17 | 17/01304-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 28.09.2017 | 221/17 | 17/01304-1 |
| 7 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 229/17 | 17/01304-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 28.09.2017 | 228/17 | 17/01304-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 228/17 | 17/01304-1 |
| 10 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 238/17 | 17/01304-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 16.10.2017 | 262/17 | 17/01304-1 |
| 12 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 265/17 | 17/01304-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 199/18 | 17/01304-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 175/18 | 17/01304-1 |
| 15 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 169/18 | 17/01304-1 |

**Málslýsing:**
Kommunan er væl í gongd við útbyggingina av Høllini á Hálsi við nýggjari høll afturat, umframt hølir til judo, borðtennis v.m. Umframt nýggjum stórum parkeringsøki, ið er tikið í nýtslu. Sí mál 14/04763.

Í teirri verkætlanini eru nakrar veitingar, ið eru sonevndar byggiharraveitingar, t.v.s. ikki partur av arbeiðstøkunum.Talan er um flytiliga áskoðarapláss (teleskop-tribunur), umframt mál, ljóðanlegg og máltalvur.

Verkætlanarbólkurin fyri útbyggingina hevur gjørt undankanning og viðgerð av viðurskiftunum. Inn er komin nøkur ref. tilboð. Við støði í teimum kann hugsast t.d. uml. 527 setur í hvørjum enda umframt uml. 148 setur í eystaru langsíðu, umframt part av verandi setrum. Tað gevur uml. 1500 setur, umframt nøkur standipláss. Tó ávíst fyrivarni fyri brunafarleiðum v.m.

Endasetrini liggja um kr. 3500 – 4000 setrið og síðusetrini uml. kr. 2500-3000 setrið. Tað gevur eina útreiðslu á uml. 4.4 mio.kr íroknað kommunalt mvg.

Hava eisini viðgjørt møguleikan at taka verandi síðutribunur burtur og er tað mett til uml. 1.000 tkr. (krevur detailprojekt) og so setur afturat. Hetta gevur fyrimunin at tilber at koma longri burtur frá bananum, har trygdarfrástøðan í dag er heldur tepur.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða nærri frá málinum við støði tekningum.

Í byggiverkætlanini er ein pulja til ókent og í verandi støðu eru uml. tkr. 2.000 eftir, men enn er alt ov týðiliga at siga um nakað leypur av í teirri puljuni. Eisini hevur verið umrøddur møguleikin fyri at “selja” tribunur.

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða spurningin um flytbar áskoðarapláss v.m. við atliti til møguligar fíggjarligar raðfestingar til 2018.

**Mentamálanevndin 03. mai 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 11. mai 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur kannað og greinað málið víðari og fingið fleiri tilboð til vega

**Viðv. verandi áskoðaraplássum**
Sum heild verður mett, at tað er ein fyrimunur at fáa hesar tiknar niður og sett flytilig áskoðarapláss ístaðin. Tað gevur væl størri fleksibilitet í høllini og betri pláss, umframt at trygdin í sambandi við dystir gerst betri, tí at leikvøllurin ikki kemur eins tætt uppá áskoðararnar. Til dystir er frástøðan sum er ov tepur og krevur tað undantak frá galdandi reglum hjá EHF fyri altjóða dystir. Valið stendur í millum at gera arbeiðið nú í summar ella á sumri 2018.

Tilboð er komið uppá arbeiðið frá Suðuroyar Betongsaging Sp/f viðv. niðurtøkuni av verandi áskoðaraplássum og er á uml. 500 tkr. Hetta er nakað lægri enn áður mett, av tí at meðan arbeiðið uppá nýggju høllina er í gongd, ber í størri mun til at brúka størri amboð og at taka áskoðaraplássini út í størri pettum og soleiðis gera arbeiðið léttari og skjótari. Avbjóðingin er hinvegin, at um arbeiðið skal gerast er neyðugt at byrja innan 2-3 vikur fyri ikki at órógva virksemi í verandi høll í heyst. Onnur avbjóðingin er, at tá áskoðaraplássini eru tikin niður, vil ganga ein tíð í millum niðurtøkuna og til nýggj eru komin, tó so, at tað er hugsandi at onkrir fyribils pallar helst kunnu gerast, umframt at størri dystir annars mugu spælast í Hoyvíkshøllini ella Høllini í Kollafirði. Hartil kemur at gólvið skal gerast o.a. í tí sambandi. Hetta arbeiðið er mett til kr. 400 tkr.

**Viðv. kostnaði á flytiligum áskoðaraplássum**
Tilboðini, ið eru innheintaði higartil, eru at rokna sum fyribils tilboð so kommunan kann fáa eina hylling á kostnaðinum. Ætlanin er at fara í eitt formligt innboðið útboð sbrt. innkeypspolitikkinum hjá kommununi. Tað er hugsandi at útboðið vil geva nakað lægri prísir enn teir, sum eru komnir higartil, tó so at endaliga tilgongdin vil staðfesta tað nærri.

Fyribils verður mett, at setur í endunum av høllini kosta uml. 3300 kr./setrið og setur í síðuni á høllini uml. 2500 kr./setrið (tá íroknað sjálvt anleggið, setur, uppseting v.m.). Fleiri

uppsetingar eru hugsandi, men t.d. kundu verið umleið 1050-1100 endasetur og umleið 600-800 síðusetur. T.v.s. ein samlaður mettur kostnaður á umleið 6.000 tkr.

Veitingartíðin til áskoðaraplássini er uml. 3 mánaðir, umframt uppseting á nakrar vikur, meðan niðurtøkan av verandi áskoðaraplássum er mett til uml. 2-3 vikur.
Ljóðanlegg, máltalvur og mál
Fyribils verður mett at hesi kunnu útvegast fyri umleið 300-400 tkr.

Fígging
Í verandi støðu ber ikki til at siga um nakað verður at leypa av í sambandi við arbeiðs-tøkurnar, ið eru í gongd í.s.v. útbyggingina av Høllini á Hálsi. Neyðugt verður við eykajáttan um henda verkætlan skal fremjast í ár. Tó er hugsandi, at veitingin av flytiligu áskoðaraplássunum kann fella hinumegin árskiftið.

Málið kemur fyri býráðið aftur, at taka av tilboði.

**Tilmæli**
Kommunustjorin, trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a) at fara undir at taka niður verandi áskoðarapláss á eystaru síðu í verandi høll

b) at fara undir útboð av flytiligum áskoðaraplássum á.v.v. á norðaru síðu, sunnaru síðu og eystaru síðu.

c) at fara undir at heinta inn tilboð uppá máltalvur v.m.

d) at fíggja verkætlanin av konto 6175 - Umsiting og røkt av fastari ogn (íløgur)

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 26. juli 2017:**
Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí broyting, at veitingin verður boðin út alment og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. juli 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. juli 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mikudagin.

**Mentamálanevndin 28. september 2017:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 28. september 2017:** Útsett.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Kommunan hevur havt alment útboð av veiting av flytiligum áskoðaraplássum.

Inn komu fýra boð. Teirra boð vóru:

| | |
|---|---|
| Eikin/Unisport | 6.965.436 kr. |
| Inventartænastan | 5.600.000 kr. og alternativ 5.320.000 kr. |
| Laiderz | 5.876.841 kr. |
| Nema | 5.536.024 kr. |

Í útboðstilfarinum var ásett at mett verður um tilboðini við besta lutfall millum fylgjandi metingartættir:

a). Samlaður kostnaður - 70%
b). Dygd/funktión - 20%
c). Tænasta - 10%

Í sambandi við gjøgnumgongd av tilboðunum kom umsitingin eftir at tilboðini ikki í nøktandi mun vóru samanberilig. Tí var avgjørt at vita um veitararnir kundu lata inn tilboð uppá á.v.v. stól ella benkur av samanberiligari góðsku til áskoðarаplássini í endunum.

Allir 4 fingu møguleikan og lótu inn tilboð uppá samanberiligar stólar, ið góvu fylgjandi stig og samlaður kostnaður

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nema | 8,5 stig | - | 6.086.024 kr. |
| Laiderz | 10 stig | - | 4.927.880 kr. |
| Eikin/Unisport | 6,9 stig | - | 5.474.564 kr. |
| Inventartænastan | 8,4 stig | - | 5.289.936 kr. |

Bert 3 feløg lótu tilboð fyri benkur allastaðni og vóru tey:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nema | 9,3 stig | - | 5.000.000 kr. |
| Laiderz | 10 stig | - | 4.850.869 kr. |
| Inventartænastan | 8,2 stig | - | 5.159.270 kr. |

Hartil koma eyka plátur til seta undir áskoðarаplássunum í endunum fyri umleið 100.000.kr.

**Niðurtøka av verandi áskoðarаplássum og nýtt gólv**
Arbeiðstøkurnar eru mettar til 1.200.000 kr.

**Mál og máltalvur til nýggju høllina**
Mett til umleið 350.000 kr.

**Samanlagt**
6.577.880, umframt kommunalt MVG – tils. 6.989.000 kr.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja, at kommunan fer undir endaligar samráðingar og gera sáttmála við Laiderz á í mesta lagi 4.927.880 kr., umframt áseta ein karm á 1.300.000 kr. til niðurtøku av verandi áskoðarаplássum, gólv vm. og áseta ein karm á 350.000 kr. til mál og máltalvur vm. Verkætlan á tils. 6.989.000 kr. íroknað kommunalt MVG verður fíggjað av konto 6175 *og flutt á projektkonto L57003.* Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 16. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Gunvør Balle.

Atkvøddu blankt: Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus, Heðin Mortensen og Gunvør Balle

Atkvøddi blankt: Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø og Tróndur Sigurðsson.

**Ískoyti:**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar. Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin, "Høllin á Hálsi, flytilig áskoðarapláss" L57003A skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest eitt avlop uppá kr. 20.836,00.

Verkætlanarbólkurin fyri útbygging av Høllini á Hálsi hevur eftirmett verkætlanina. Mett verður at arbeiðið gekk væl. Flytiligu áskoðaraplássini komu fram til tíðina og vórðu lidnar áðrenn evstamark, sum vóru finalurnar í steypakappingini í hondbólti hálvan februar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, virkandi tekniski stjórin, deildarleiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at loka verkætlan L57003A og at avlopið verður flutt á løgukarmin. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

**<u>FUNDURIN LOKIN KL. 22:00</u>**

**<u>GERÐABÓKIN GÓÐKEND:</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Helena á Dam Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andreasen | Annfinn Brekkstein |
| Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal | Bjørghild Djurhuus |
| Gunvør Balle | Turið Horn | Ruth Vang |
| | Bjørg Dam | |